| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 88<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 23. februar 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 29/23-56/23

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Olga Knudsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Barbara Vang

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 89<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 29/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 91 |
| 30/23 | 20/04133-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina | 92 |
| 31/23 | 20/04136-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina | 94 |
| 32/23 | 20/04142-1 | Val av limi í nólsoyarnevndina | 96 |
| 33/23 | 23/00617-2 | Matr.nr. 135pt, Hoyvík. Oman Gil 5. | 97 |
| 34/23 | 20/01753-2 | Matr.nr. 1160f, Tórshavn. Sp/f Berg Hestar. | 99 |
| 35/23 | 23/00811-2 | Nevndarlimur Visit Tórshavn 2023 | 104 |
| 36/23 | 21/05162-2 | Fyrispurningur frá Kvívíkar kommunu um samstarv um framhaldsdeild | 106 |
| 37/23 | 17/00792-2 | Føroya Sjósavn : Umsókn um eykajattan 2017 í sambandi við verkætlanina "Nýtt Sjósavn" | 111 |
| 38/23 | 18/04076-1 | Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting | 117 |
| 39/23 | 23/00631-1 | Røktarheim - uttanumøki | 123 |
| 40/23 | 23/00097-1 | Hoyvíksvøllur - Nýtt graslíki v.m. | 125 |
| 41/23 | 22/05163-1 | Nýggj ljósskipan á Tórsvølli | 128 |
| 42/23 | 22/03166-5 | Fríksúlin í Havn: Umsókn at stovna forskúla | 132 |
| 43/23 | 23/00597-2 | Forskúli í Kollafjarðar skúla | 137 |
| 44/23 | 22/00894-1 | Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla | 140 |
| 45/23 | 23/00259-1 | Dagstovnurin Hans Andrias Djurhuus - úbygging | 149 |
| 46/23 | 22/07254-2 | Umvæling og útbygging av kapellinum á matr. nr. 995, Tórshavn | 154 |
| 47/23 | 15/03750-9 | Tannlæknastovan : Umbøn ella tilmæli um setan av arbeiðsbólki til útgreinan av framtíðarkarmunum fyri barnatannrøktina (2007-2871) | 157 |
| 48/23 | 17/03628-1 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 165 |
| 49/23 | 19/01370-1 | Havnin sum súkklubýur | 177 |
| 50/23 | 18/01811-1 | Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli | 182 |
| 51/23 | 23/00574-1 | Útbjóðing av lendi til spæli- og ítróttarvirksemi | 186 |
| 52/23 | 23/00611-1 | Bátahylurin í Álakeri - keyp av aldubrótara | 188 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 53/23 | 22/00477-2 | Keyp av skrivstovubygningi hjá P/F Faroe Ship á Eystaru bryggju | 190 |
| 54/23 | 23/00874-1 | Gjøld - Eldraøkið | 192 |
| 55/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 194 |
| 56/23 | 22/01221-1 | Heildarætlan fyri dagstovnaøkið | 196 |

**Til viðgerðar**

# 29/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

## 30/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 260/20 | 20/04133-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 30/23 | 20/04133-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

**§ 27** í kommunustýrisskipanini ásetur:

***1. petti.*** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.

Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

***2. petti.*** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikkur
4. Heilsu og umsorganartænasta
5. Fólkaheilsa

***3. petti.*** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál og kommunalar íbúðir og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í Trivnaðarnevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |

| | |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Tróndur Sigurðsson |
| Jákup Dam | Elsa Berg |
| Gunvør Balle | Ruth Vang |

Býráðsfundur 23. februar 2023: Vald vóru:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |
| Kristianna Winther Poulsen | Tróndur Sigurðsson |
| Jákup Dam | Elsa Berg |
| Gunvør Balle | Súsanna Olsen |

# 31/23 Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 258/20 | 20/04136-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 31/23 | 20/04136-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29**. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 26 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** Umhvørvisnevndin hevur 5 limir.
**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Brennistøðin,
2. Ruskinnsavnanin
3. Jarnmóttøku kemikaliur, spilloljuslamsúgving,rottangatøming, tyrving o.a.
4. Náttúru og umhvørvi
5. Frílendi
6. Framtíðar orka
7. Umhvørvismál
8. Umhvørvisátøk so sum umhvørvisvika v.m.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Elsa Berg | Ruth Vang |
| Gunvør Balle | Jákup Dam |

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Elsa Berg | Súsanna Olsen |
| Gunvør Balle | Jákup Dam |

## 32/23 Val av limi í nólsoyarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 6/21 | 20/04142-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 32/23 | 20/04142-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 34 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Nólsoy verður vald ein nevnd við 5 limum.
Tríggir valdir av og millum borgararnar í Nólsoy eftir reglunum í kommunalu vallógini.
Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.
Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Á kommunuvalinum 10. november 2020 vóru vald: Rebekka Gade, Bjørn Elíson og Maud Wang Hansen.

"Luttalsval smb. § 28 stk. 3 í kommunustýrislógini, ið er soljóðandi:
Stk. 3. Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær."

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess.

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald varð Ruth Vang.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Vald varð Súsanna Olsen**.**

# 33/23 Matr.nr. 135pt, Hoyvík. Oman Gil 5.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 57/23 | 23/00617-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 33/23 | 23/00617-2 |

**Upprunin til málið.** Fyrispurningur frá eigara.

**Lýsing av málinum.**

Óbygt grundstykki matr.nr. 135pt, Oman Gil.

Stykkið er til víddar 318m2, og er grovplanerað.

Í samband við at kommunan hevði tørv á at keypa matr.nr. 138dq, innaftur, varð gjørd ein makaskiftisavtala við eigararnar.

Kommunan keypti matr.nr. 138dq, Hoyvík, og fingu eigararnir av matr.nr. 138dq, Hoyvík, sambært makaskiftisavtaluni matr. nr. 135pt, Oman Gil 5, til ognar. Sí mál 21/01606.

Grundstykkið matr.nr. 135pt, varð av meklarafelagnum Skyn virðismett til 1,4 mill. kr. og var metingin grundarlag undir prísáseting í tinglýsta makaskiftis skeytinum.

Eigarar upplýsa, at tað er ivasamt um tey fara undir at byggja á grundstykkinum, innan tíðarfreistina, og ynskja tey at vita, um kommunan ynskir at keypa stykkið aftur. Um ikki, ynskja tey at fáa loyvi til at selja stykkið víðari.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** 21/01606

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Vísandi til, at talan er um eitt makaskiftis grundstykki, mælir kommunustjórin frá, at keypa stykkið matr.nr. 135pt, Hoyvík aftur. Í staðin verður mælt til, at loyva verandi eigarum, at selja stykkið matr.nr. 135pt, Hoyvík í fríðari sølu.

Víðarisøluskeytið skal vísa til verandi tinglýstar servituttir.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

# 34/23 Matr.nr. 1160f, Tórshavn. Sp/f Berg Hestar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 159/20 | 20/01753-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 296/20 | 20/01753-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 270/20 | 20/01753-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 324/22 | 20/01753-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 56/23 | 20/01753-2 |
| 6 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 34/23 | 20/01753-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn dagfest 19.05.2020

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr. nr. 1160f, Tórshavn. Vídd 4.551m2. Leigumál fyriliggur við Sp/f Berg hestar viðvíkjandi matrikul 1160f, og harumframt eitt øki uttanfyri. Samlaða leigugjaldið er 5.000 kr. pr. ár.

Verandi leigusáttmálið er undirskrivaður 27.11.2006, og hevur gildið 20 ár frá undirskrivingardegi, t.v.s. til 27.11.2026.

Hevur leigarin hildið sínar skyldur sambært sáttmálanum, og skal kommunan ikki sjálv brúka økið, kann leigumálið verða longt.

Verandi sáttmáli er komin í gildið, ístaðin fyri uppruna 15 ára sáttmála 10.12.1999.

Sambært grein 3 framgongur, at leigarin fær ikki endurgjald fyri arbeiðið, ið er lagt í økið, tá hesin leigusáttmáli gongur út. Leigarin hevur skyldu at taka burtur alt, ið er flutt til økið, fast sum leyst, og ruddað økið, tá leigumálið heldur uppat. Verður hetta ikki gjørt, kann býráðið gera hetta fyri leigarans rokning.

Um sáttmálin verður uppsagdur av kommununi áðrenn 20 ár, t.v.s. áðrenn 2026, verður virðisminkingin av ríðihúsinum sett til 1/20 um árið.

Sambært tingbókarváttan, er leigusáttmálin tinglýstur í matr.nr. 1160f, og eru ognarveðbrøv tinglýst i bygninginum.

Advokatur felagsins søkir vegna leigaran, um at keypa matr.nr. 1160f, alternativt at keypa sjálvt undirlendið undir ríðihøllini.

Um tað ikki letur seg gera at fáa økið til keyps, verður í øðrum lagi søkt um nýggjan 30 ára leigusáttmála.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Sambært § 44. í kommunustýrislógini má føst ogn hjá kommununi ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment.

Sí tó kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn, sum gevur møguleika fyri sølu uttan alment útboð, men tó so, at søla altíð skal verða til marknaðarprís.

Ein tílík søla skal góðkennast av kommunala eftirlitinum.

Advokatur umsøkjarans, metir, at vísandi til at bygningur stendur á økinum, er heimild til at selja økið, vísandi til § 2. stk. 1 litra 3, sum ásetur , at søla av økjum, sum eru minni enn 300 fermetrar til víddar og sum ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á, eru frítikin fyri kravinum um alment útboð. Advokaturin metir, at innihaldið er púra greitt, at um tað ikki letur seg gera at byggja á økið, so er ikki neyðugt við almennum útboði.
Advokaturin metir, at landstýrismaðurin við heimild í § 2. stk 2. eigur at víkja kravinum um alment útboð, tá talan er um at selja ogn undir einum verandi virkisbygningi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnaskrivstovuni, mæla til at beina málið í býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Leigarin á økinum hevur upplýst fyri umsitingini, at neyðugt er at gera ábøtur á ognina á leigaða økinum, og til tess at fáa fígging, er umráðandi at fáa longt leigumálið.

Leigusáttmálin ásetur, at hevur leigarin hildið sínar skyldur sambært sáttmálanum, og skal kommunan ikki sjálv brúka økið, kann leigumálið verða longt.

Av tí at leigumálið liggur í einum øki, sum er lagt út til framtíðar vegaloysnir av Oyggjarvegnum og oman á Marknagili og út í Havnardal, er ikki óhugsandi, at leigumálið verður ávirkað av hesum ætlanum, og tí má ein leingjan av leigumálinum taka hædd fyri hesum.

Skotið verður tískil upp at leingja leigumálið í 10 ár, so tað fer úr gildi 31. desember í 2036, men við tí fyrivarni, at skal kommunan brúka økið innan hetta tíðspunkt, skal leigarin fara av økinum móti at fáa ávíst annað øki til virksemi sítt men uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt i økið.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at leingja leigumálið til 31. desember 2036 undir teirri fortreyt, at skal kommunan brúka økið í sambandi við framtíðar vegagerð, skal leigarin fara av økinum uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt í økið, men samstundis fáa ávíst annað øki til virksemi sítt.

Mælt verður somuleiðis til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020**: Ein meiriluti, Annika Olsen, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum um at leingja sáttmálan og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt at leingja leigumálið til 31. desember 2036 undir teirri fortreyt, at skal kommunan brúka økið í sambandi við framtíðar vegagerð, skal leigarin fara av økinum uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt í økið, men samstundis fáa ávíst annað øki til virksemi sítt.

**Ískoyti:**
Sp/f Berg Hestar hevur síðani 1996 havt leigusáttmála við Tórshavnar kommunu um eitt øki við Oyggjarvegin. Á økinum hevur felagið bygt fjós, umframt at eigararnir av Berg Hestum hava bústað í bygninginum og reka ból og biti úr sama húsi. Talan er um vinnuligt virksemi, ið verður rikið á leigaðum øki.

Verandi leigusáttmáli er frá 2006 og kom í staðin fyri uppruna 15 ára sáttmála frá 1999. Víddin á leigumálinum er 4.551 m², men veruliga víddin á tí, ið leigarin hevur ræði á, og sum er hegnað av, er útivið 18.000 m².

Leigusáttmálin er galdandi í 20 ár, tvs. fram til 27/11 – 2026. Leigutakaran søkir í umsókn tann 5/12 – 2022 um at fáa longt leigumálið. Skal kommunan ikki sjálv brúka økið, tá ið sáttmálin gongur út, kann leigumálið verða longt.

Mælt verður til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina at taka støðu til, um leigumálið kann verða longt, ella um útlit eru fyri, at kommunan sjálv fær tørv á lendinum innan eitt ávíst áramál til innkomuveg, tunnil ella annað.

Verður sáttmálin longdur, verður mælt til at leingja hann til 27/11 2036, ið eru 10 ár longri enn sáttmálin frá 2006 ásetur. Tá verður samlaða leigutíðarskeiðið 37 ár.

Somuleiðis mælt til at regulera leiguna, vísandi til, at talan er um vinnuligt leigumál. Leigugjaldið á 5.000 kr. er ikki marknaðarleiga fyri vinnuligt virksemi og fyri at leiga undirlendi undir á bústaði og ogn, ið verður leigað út í vinnuligum høpi.

Mælt verður til at regulera leigusáttmálan, so hann fevnir um matrikuleraða økið 1160f, Tórshavn, ið er til víddar 4.551 m² og eitt øki at nýta til beiti harumframt, ið er til víddar umleið 13.000 m², og at áseta leiguna til 75.000 kr. um árið, ið svarar til nakað omanfyri 4 kr./m².

Eisini verður mælt til at halda fast um ásetingina, at kommunan ikki hevur skyldu at rinda endurgjald fyri tað, ið leigarin hevur lagt í økið, tá ið leigumálið gongur út.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina at taka støðu til, um kommunan sjálv skal brúka lendið innan eitt ávíst áramál. Skal kommunan ikki sjálv brúka økið, verður mælt til at gera sáttmála fram til 27/11 – 2036 og at áseta leigukostnaðin til kr. 75.000 um árið.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti.**

Skotið verður upp at býta leigumálið upp í tvey:

Eitt leigumál, sum umfatar matr.nr. 1160f, vídd 4.551m² við ástandandi bygningi, og eitt leigumál, sum umfatar atknýtt øki til beiti v.m., sum er til víddar uml. 13.000 fermetrar og sum er partur av matr.nr. 1160a.

**Viðvíkjandi matr.nr. 1160f, vídd 4.551 m². við ástandandi bygningi:**
Leigan verður ásett til vinnuliga leigu 5 % rentu. Útrokning: 4.551 m² x 89.kr./m², sambært talvu hjá Búnaðarstovuni x 5 % = árlig leiga 20.300 kr. pr. ár. Svarandi til 4,5 kr. fyri fermeturin um árið.

Tann parturin av sáttmálanum, sum umfatar matr. nr. 1160f, verður longdur til 27/11 2036, ið eru 10 ár longri enn galdandi sáttmáli frá 2006 ásetur. Tá verður samlaða leigutíðarskeiðið 37 ár fyri hendan partin av leigumálinum.

**Viðvíkjandi beitinum, uml. 13.000 m²:**
Brúksavtala verður gjørd við Sp/f Berghestar um eitt øki uml. 13.000 m² at brúka til beiti og líknandi. Leigarin hevur ikki heimild til at byggja á hesum partinum av lendinum, tó so at leigarin eftir serstøkum loyvi kann seta upp hegn, møguligt lívdarhegn, og avseta part av økinum til virksemi til hestar. Brúksavtalan verður gjørd fyri 5 ár og kann leingjast eftir umsókn. Um so er at kommunan skal brúka økið til egið endamál, kann kommunan uppsiga brúksavtaluna við hálvt ára freist til ein 1. januar. Við uppsøgn kann kommunan krevja, at brúkarin letur økið aftur í sama standi sum hann tók við tí.

Verandi leigusáttmáli, sum er galdandi fyri henda partin av leigumálinum til 27.11.2026, fellur burtur. Samstundis verður nýggj brúksavtala um sama lendi.

Vísandi til nevndu treytir, verður brúksgjaldið fyri henda partin av lendinum ásett til 1.000 kr. um árið.

Nevndu broytingar verða gjørdar í einum ískoyti til verandi leigusáttmála umframt í einari brúksavtalu fyri uttanumøkið.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til ískoyti til verandi sáttmála og brúksavtalu og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teimum broytingum, at leigumálið undir verandi bygningum verður longt við 20 árum til at fara úr gildi 27/11 - 2046, og at leigukostnaðurin verður ásettur til 20.300 kr. um árið.

Viðv. lendinum til beiti, verða hesi viðurskifti tikin upp aftur og brúksavtala gjørd, tá ið viðurskiftini kring innkomuvegin og tunnilsgerð v.m. í økinum eru avgreidd.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

# 35/23 Nevndarlimur Visit Tórshavn 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 35/23 | 23/00811-2 |

**Upprunin til málið**

Í viðtøkunum stendur millum annað um nevndina: " Nevndin telur 5 limir, sum sita fyri 2 ár í senn.

Annaðhvørt ár standa 2 nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa 3 limir fyri vali.

2 nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og 3 verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi.

Teir 2 nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og 2 av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi.

3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdur millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.

Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.

Í 2022 samtykti Býráðið, at Sóleyð Heradóttir Hammer, stjóri í Hugskotinum og Eirik Suni Danielsen, leiðari í Tilhaldinum) skuldu umboðað Tórshavnar kommunu í nevndini.

Hesir persónar sita í nevndini í dag:

Henny á Líknargøtu/vegna ferðavinnu
Sóley Heradóttir Hammer/vegna TK
Theresa T. Kreutzmann/vegna TK
Herleif Hammer/ vegna søvn
John Mikkelsen/vegna matstovuvinnu

**Tiltakslimir eru:**

Junie Hansen/vegna ferðavinnu
Eirik Suni Danielsen/vegna TK
Rúna Erlandsdóttir/vegna TK
Helgi Michelsen/ vegna søvn
Petrine N. Larsen/vegna matstovuvinnu

Í ár standa Teresa Turiðardóttir Kreutzmann, Commit og Rúna Erlandsdóttir, Atlantic Airways fyri vali.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 105<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at Býráðið velir lim og varalim í nevndina fyri Visit Tórshavn.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Í nevndina varð Eirik Suni Danielsen sum fastur limur og Teresa Turiðardóttir Kreutzmann sum varalimur. Anita á Fríðriksmørk varð vald sum varalimur hjá Sóley Hammer.

# 36/23 Fyrispurningur frá Kvívíkar kommunu um samstarv um framhaldsdeild

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.01.2022 | 1/22 | 21/05162-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 10.02.2022 | 8/22 | 21/05162-2 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 20/22 | 21/05162-2 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 34/22 | 21/05162-2 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 15.11.2022 | 74/22 | 21/05162-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 276/22 | 21/05162-2 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 8/23 | 21/05162-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 30/23 | 21/05162-2 |
| 9 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 36/23 | 21/05162-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá Kvívíkar kommunu um, at næmingar búsitandi í Kvívík kunnu ganga í 8.-10. flokk í skúla í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Trivnaðarnevndin í Kvívíkar kommunu hevur viðgjørt spurningin um skúlatilboð til næmingar í 8., 9. og 10. flokki. Næmingarnir í Kvívík ganga í framhaldsdeild í Vestmanna skúla.

Kvívíkar kommunu hevur biðið um fund við Tórshavnar kommunu, tí ynski er at kanna møguleikan at flyta næmingarnar til Havnar at ganga í framhaldsdeild. Kvívíkar kommuna metir, at tilboðið av lærugreinum í Vestmanna skúla er ikki so stórt sum í einum størri skúla í Havn.

Skúlaárið 2021/22 eru 54 næmingar í Kvívíkar skúla, sostatt eru uml. 7 næmingar í hvørjum árgangi.

Nakrir  næmingar úr Kvívík hava valt at fara í Eysturskúlan í Nám X, og í teimum førum, hevur Kvívíkar kommuna rinda skúlagjald fyri næmingarnar.

Kvívíkar kommuna hevur samstarv við Vestmanna kommunu um framhaldsdeildina, og um allir næmingarnir í Kvívík fara í framhaldsdeild í Havn, fær tað avleiðingar fyri Vestmanna skúla viðvíkjandi tímajáttan, og tað kann avmarka tilboðini í skúlanum enn meira. Tað er so ein spurningur hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum at meta um.

Um næmingatalið í hvørjum árgangi í Kvívík er 7 næmingar, er pláss fyri teimum í hádeildini í Eysturskúlanum. Um skúlabygnaðurin verður broyttur, soleiðis at næmingar í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, verður við verandi næmingatali eisini pláss fyri næmingunum úr Kvívík. Ein árgangur verður tó ov stórur, men uttan iva fer onkur at velja ítróttarrás í Skúlanum á Fløtum, so tað eigur ikki at verða nakar trupulleiki

Lítliskúli hevur havt fyrispurning um at fáa pláss fyri øllum næmingunum í Eysturskúkanum, tá teir fara í 7. flokk, men skúlin ynskir, at hvør flokkur heldur fram sum ein samlaður flokkur í Eysturskúlanum, og tað ber ikki til.

Sambært fólkaskúlalógini § 27 stk. 1 og 2 kann eftir sáttmála millum kommunur verða víst næmingum á undirvísing í skúla hjá aðrari kommunu ella í privatar skúlar. Landsstýrismaðurin skal góðkenna tílíkar sáttmálar

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki at viðmerkja

**Skjøl**
Eingi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal fara undir samskifti við Kvívíkar kommunu um málið.

**Trivnaðarnevndin 13. januar 2022:** Nevndin samtykti at fara undir samskifti við Kvívíkar kommunu um málið.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið á fundi við Kvívíkar kommunu. Niðurstøðan hjá teimum er eitt greitt ynski um at fáa samstarvsavtalu við Tórshavnar kommunu um skúlasamstarv um næmingarnar í 8.-10. flokki og hava Eysturskúlan sum fyrsta val. Talan er um eina einmælta støðu hjá kommunustýrinum. Tey vísa m.a. á, at nógv foreldur arbeiða í Havn, umframt at nógv og fjølbroytt frítíðarvirksemi er í Havn, umframt skúlar við

fleiri møguleikum. Ynskið hjá Kvívíkar kommunu er at byrja samstarvið frá skúlaárinum 2022/23.

Vísandi til áleikandi málið um broytingar í skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu verður mett, at neyðugt er at fáa henda greiðan eisini fyri tey næstu árini, harundir eisini plásskapasitetinum sum heild vísandi til fólkavøksturin, áðrenn nøkur samstarvsavtala verður gjørd við Kvívíkar kommunu um framhaldsdeild.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til ikki at taka upp samráðingar við Kvívíkar kommunu um framhaldsdeild fyrr enn tað er greitt, hvussu skúlabygnaðurin í Tórshavnar kommunu verður fyri tey komandi árini, harundir eisini við støði í plásstørvinum hjá kommununi.

**Trivnaðarnevndin 10. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur býráðið 24. feb. samtykt at gera broytingar í skúlabygnaðinum m.a. viðv. tali av flokkum í Skúlanum á Fløtum skúlaárið 2022/23 (sí mál 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu). Hesar broytingar eru nú latnar UMMR at góðkenna.

Broytingin inniber, at Eysturskúlin hevur eitt næmingagrundarlag, ið tolir og hevur fyrimun av at fáa nakrar næmingar í hádeild árliga frá Kvívíkar kommunu, hetta serliga nú skúlin roynir at skipa nøkur nýskapandi tilboð til næmingar í 8. og 9. fl.

Skúlastjórn í Eysturskúlanum metir hetta vera ynskiligt og ráðiligt.

Spurningur í hesum sambandi er tó, hvussu næmingagrundarlagið í høvuðsstaðarøkinum fer á hátta seg komandi árini. Við nýggju framhaldsdeildini í Sankta Frans skúla verður rúmligari í elstu flokkunum, men fólkavøksturin, heldur hann fram fyri somu ferð sum undanfarnu árini, fer serligan at merkjast í yngru flokkunum, sum við árunum flytur seg til teir eldru flokkarnar.

Í hesum føri er heldur ikki lagt upp fyri, um næmingarnir í Kollafjarðar skúla fara í 8. flokk í Havn eins og hinir bygdaskúlarnir. Hetta er ikki aktuelt, men hevur verið umrøtt.

Metast má, at ein møgulig avtala við Kvívíkar kommunu vil í fyrsta umfari vera tíðaravmarkað til nøkur ár. Slík avtala skal góðkennast av landsstýrismaninum í skúlamálum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal fara í samráðingar við Kvíkvíkar kommunu um ein samstarvssáttmála at leggja aftur fyri nevndina.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022**: Nevndin samtykti ikki at gera samstarvssáttmála við Kvívíkar kommunu.

**Ískoyti:**
Forkvinnan hevur ynskt málið á skrá aftur.

Næmingatalið í komandi 8. flokki í Eysturskúlanum er í løtuni 48, so tað verða bara tveir 8. flokkar skúlaárið 2022/23. Serliga næsta skúlaár, nú skúlin fer undir nýggja rás, sum er Science- og innovatiónsrásin, er umráðandi at fáa eina góða byrjan, og við eini tímajáttan sum ger, at skúlin veruliga fær bjóðað rásir og onnur tilboð. Skúlin skuldi av røttum havt tríggjar flokkar.

Tað eru 10 næmingar í 7. flokki í Kvívíkar skúla, og um teir allir koma í 8. flokk í Tórshavnar kommunu, tvs. í Eysturskúlan, verður næmingatalið í Eysturskúlanum so mikið høgt, at tað er grundarlag fyri trimum 8. flokkum. Um ikki allir ella næstan allir næmingarnir úr Kvívík koma í Eysturskúlan, er skúlin ikki sinnaður

at taka ímóti teimum, tí so kann skúlin koma í ta støðu, at hann hevur nógvar næmingar (26) í hvørjum flokki, men ikki nóg nógvar til, at skúlin fær tímajáttan til eitt spor aftrat.

Um nevndin samtykkir, at næmingarnir í Kvívík fáa pláss í 8. flokki í Eysturskúlanum næsta skúlaár, so eigur málið at verða tikið upp aftur í heyst til støðutakan um talan skal verða um eina varandi skipan ella ikki.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til, at næmingarnar úr Kvívík fáa pláss í 8. flokki í Eysturskúlanum skúlaárið 2022/23, og at árgangurin heldur fram í 9. flokki skúlaárið eftir, tó treytað av, at nóg nógvir næmingar verða til tríggjar flokkar.

Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Hetta skúlaárið ganga sjey næmingar úr Kvívíkar kommunum í 8. flokki í Eysturskúlanum, og hesir næmingar halda fram í 9. flokki næsta skúlaár. Tað er pláss í Eysturskúlanum fyri at taka fleiri næmingar inn í 8. flokk, og tað gevur eisini skúlanum størri møguleika fyri at skipa tilboð til næmingar í 8. og 9. flokki.

Næmingatalið í hvørjum árgangi í Kvívíkar skúla er millum 6 og 15 næmingar, og skúlaárið 2022/23 er næmingatalið 59.

Sambært skúlabygnaðinum fara næmingar í Kaldbaks skúla í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk, og næmingarnir í Nólsoyar skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk. Bygnaðurin í Lítlaskúla er forskúli til og við 6. flokki. Lítliskúli og Eysturskúlin eru í sama grannalagi, og í ár er meginparturin av næmingunum í Lítlaskúla farin í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk.

Um meginparturin av næmingunum í Lítlaskúla framhaldandi fer í Eysturskúlan í hádeild, og næmingar úr Kvívík fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, verður næmingagrundarlagið í Eysturskúlanum so mikið høgt, at flestu árini verða trý spor í 8. og 9. flokki.

Trý spor heldur enn tvey spor er ein fyrimunur, tá talan er um at skipa ymisk tilboð og rásir. Eysturskúlin hevur skipað eina nýggja rás, tað er Science- og innovatiónsrásin, haraftrat er so Almenna rásin, sum er siðbundna hádeildartilboðið. Næmingarnir kunnu velja aðra av hesum rásunum, tá teir fara í 8. flokk.

Um tað skal vera ein føst skipan, at næmingar úr Kvívíkar kommunu fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, evt. eisini 7. flokk, eigur ein samstarvssáttmáli at verða gjørdur millum Tórshavnar kommunu og Kvívíkar kommunu. Sambært fólkaskúlalógini § 27 stk. 2 skal landsstýrismaðurin góðkenna tílíkar sáttmálar.

Um farið verður undir at gera uppskot til samstarvssáttmála við Kvívíkar kommunu um næmingar í 8. 9. og 10. fl., verður mett, at sáttmálin í fyrsta umfari eigur at vera tíðaravmarkaður til nøkur ár, hetta kundi verið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka undir við, at farið verður undir at gera uppskot til tíðaravmarkaða samstarvsavtalu við Kvívíkar kommunu um, at næmingar úr Kvívíkar kommunu ganga í Eysturskúlanum í 8., 9. og í 10. fl.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2022:** Ein meiriluti, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen, Bjørg Dam og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at grundgevingin at fáa trý spor í Eysturskúlanum ikki er haldbær (virðilig).

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við merilutanum í trivnaðarnevndini.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við Kvívíkar kommunu um samstarvsavtalu um, at næmingar í Kvívíkar kommunu í 8., 9. og 10. árgangi ganga í skúla Eysturskúlanum.

Hetta skúlaárið ganga næmingar úr Kvívíkar kommunu í 8. flokki í Eyturskúlanum. Kvívíkar kommuna ynskir, at skipanin heldur fram, og Eysturskúlin tekur eisini undir við skipanini.

Við núverandi næmingatali sum grundarlagi, verður næmingatalið næstu sjey árini í 8. árgangi í Eysturskúlanum millum 43 og 68. Tá eru umframt næmingar í Eysturskúlanum allir næmingar í Nólsoyar skúla, Kaldbaks skúla, Kvívíkar skúla og í Lítliskúla taldir við. Sostatt er pláss fyri næmingum úr Kvívíkar kommunu í Eysturskúlanum, sjálvt um fólkavøkstur er, og roknast kann við, at fleiri næmingar verða í hvørjum ágangi, enn núverandi næmingatal vísir.

Á fundinum millum Kvívíkar kommunu og Tórshavnar kommunu var semja um at taka 8. árgang inn í Eysturskúlan næsta skúlaár eisini, og at uppskot til tíðaravmarkaðan sáttmála verður lagt fyri til politiska viðgerð í báðum kommunum.

Hjálagt er uppskot til sáttmála um skúlasamstarv millum Tórshavnar kommunu og Kvívíkar kommunu.

Um samtykt verður at taka undir við uppskotinum til sáttmála, verður sáttmálin sendur Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, sum sambært fólkaskúlalógini § 27 stk. 2 skal góðkenna slíkar sáttmálar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja hjálagda uppskot til sáttmála og at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 111<br><br>Formansins merki: |

# 37/23 Føroya Sjósavn : Umsókn um eykajattan 2017 í sambandi við verkætlanina "Nýtt Sjósavn"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 97/17 | 17/00792-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2017 | 121/17 | 17/00792-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 7/18 | 17/00792-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 55/18 | 17/00792-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 164/18 | 17/00792-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 335/18 | 17/00792-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 313/19 | 17/00792-2 |
| 8 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 92/21 | 17/00792-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 56/22 | 17/00792-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 08.02.2023 | 26/23 | 17/00792-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 35/23 | 17/00792-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 13.02.2023 | 44/23 | 17/00792-2 |
| 13 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 37/23 | 17/00792-2 |

**Málslýsing:**
Føroya Sjósavn hevur 27. februar 2017 latið Tórshavnar kommunu umsókn (sí hjálagt) um stuðul til at framleiða projekttilfar við atliti til

a). at søkja grunnar v.m. um stuðul til verkætlanina.
b). At framleiða tilfar til at søkja um neyðugu loyvini
c). At gera neyvari akvariutekniskar kanningar.

Talan er um útbygging á verandi øki á Argjum t.e. Rættargøta 8.

Søkt verður um tkr. 400. í 2017 til endamálið.

Í fall farast skal víðari við hesi verkætlan metir umsitingin at tað er hóskandi at fáa gjørt eina avtalu við Sjósavnið, ið nágreinar innihaldið í tí sum tey ynskja at fara undir.

Í øðrum lagi er hóskandi fyrst at fáa tikið prinsipiella støðu til, um tað skal byggjast út í økinum. Talan er um øki D1, ið er frílendisøki. Hartil eru atlit til skúlabygningin hjá Eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum, ið er beint sunnanfyri. Býráðið hevur á fundi 27. apríl 2017 játtað tkr. 400 sum eykajáttan á konto 5366 – Stuðul annars markað til Sjósavnið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at umrøða umbønina við atliti til at umsitingin síðani vendir aftur til nevndina við einum tilmæli.

b). at samtykkja at beina spurningin um útbygging á økinum til viðgerðar í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum b og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin metir, at staðsetingin av verandi Sjósavni er vælegnað til endamálið.

Økið liggur við fjøruna og Sandagerð við læ ttari atkomu bæði við bussi, bili og til gongu. Harumframt liggur savnið í tøttum sambandi við náttúruvakra økið, sum gongur allan vegin frá Sandagerði niðan í Havnardal, og harvið kann Sjósavnið gerast partur av gøturinginum, sum ætlandi er at gera kring alla Havnina.

Økið liggur í D1 økið sambært almennu byggisamtyktini. Ásetingarnar fyri D1 økið í almennu byggisamtyktini fyri Tòrshavnar kommunu eru:

*Stk. 1 Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari bygisamtykt fyri økið.*

*Stk. 2 Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Umsitingin metur ikki, at ein útbygging av verandi Sjósavni verður í stríð við ásetingarnar, tó kann væntast, at ein ætlað útbygging krevur eina nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið, og skal útbyggingin sostatt gerast í tøttum samstarvi við kommununa.

Harumframt er ynski at kommunan er í tøttum samstarvi við Føroya Sjósavn í sambandi við planleggingina av útbyggingini, hetta fyri at tryggja at endaliga úrslitið virðir og í síðsta enda tekur seg væl út í náttúru vakra umráðnum.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at staðseta eina framtíðar útbygging av Føroya Sjósavni í verandi øki, har Føroya Sjósavn í dag er staðsett, og at útbyggingin verður ráðløgd í tøttum samstarvið við kommununa og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Sjósavnið um samstarvsavtalu um menning av byggiverkætlan fyri nýtt sjósavn. Uppskot til avtalu er hjálagt. Á fundinum verður uppskotið framlagt og viðgjørt við atliti til at umsitingin fer í endaligar samráðingar við Sjósavnið um samstarvsavtalu. Nakrir av høvuðsspurningunum er byggiøkið og hvørt farast skal víðari við verandi ráðgeva hjá Sjósavninum. Málið um byggiøkið er málsøkið hjá Byggi- og býarskipanarnevndini og verður uppskotið gjørt saman við Býarskipanardeildini og ætlandi lagt fyri nevndina í feb.

Verandi ráðgevi hevur longu lagt orku í málið og er ynski frá Sjósavninum at halda fram við tí.

Lagt er upp til at samstarvsavtalan eisini fevnir um árliga rakstrarstuðulin fyri 2018 og 19 og er partur av viðgerðini í mál 17/03780.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingin at fara undir endaligar samráðingar við Sjósavnið um samstarvsavtalu um menning av byggiverkætlan fyri nýtt sjósavn.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Sjósavnið saman við Arkitektar 99. Gjørdar eru nakrar tillagingar í samstarvsavtaluni, umframt fyriliggur uppskot til ráðgevaraavtalu millum Sjósavnið og Arkitektar 99, umframt fíggjarætlan fyri brúk av møguliga stuðlinum frá Tórshavnar kommunu. Uppskotið javnvigar við 450 tkr. og er tí ikki nóg rúmsátt í mun til mvg og ókent.

Málið hevur áður verið til viðgerðar í byggi- og býarskipanarnevndini. Av tí at tað nú fyriliggja rímiliga ítøkiligar tekningar og av tí at talan er um D1 øki verður mett hóskandi at málið aftur fekk eina ávegis viðgerð í byggi- og býarskipanarnevndini.

Samstundis er neyðugt at viðgera, hvørt kommunan skal hækka sín stuðul ella krevja, at Sjósavnið skaffar restupphæddina frá øðrum stuðlum. Eisini er viðkomandi at Sjósavnið fær avklárað týdningarmikla leiklutin hjá  Mentamálaráðnum í mun til verkætlanina. Ráðið er saman við Tórshavnar kommunu høvuðsveitari av rakstrarstuðli.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentmálaleiðarin mæla mentamálanevndini til
a). at beina málið um yvirskipað snið og skap í mun til økið og lendið í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar
b). at viðgera uppskot til avtalu við Sjósavnið og hjáløgdu fíggjarætlan við atliti til at umsitingin kemur við endaligari tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2018 samtykti Tórshavnar býráð at loyva staðseting av nýggjum Sjósavni á sama stað sum verandi Sjósavn við Sandagerð og at umsøkjarin kann arbeiða víðari við málinum. (mál 18/00048).

Sjósavnið hevur gjøgnum hækkaða stuðulin frá landinum til 2018 útvega umleið 150 tkr. eyka til verkætlanina, fyrsta stig. Sostatt er saman við ætlaða stuðulinum frá kommununi á 450 tkr. nøktandi fígging til at fara undir fyrsta stig í verkætlanini.

Fundur verður við nevndina fyri Sjósavnið 9. mai, ið ætlandi endaliga staðfestir uppskotið til avtalu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu stuðulsavtalu á 450 tkr. við Sjósavnið.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Sjósavnið saman við ráðgeva sínum Arkitektar 99 hava samskift við umsitingina um fyritreytirnar í verkætlanina, herundir fígging. Felagið hevur latið eina ætlan og frágreiðing um ætlanina og herundir

fíggingin á 450 tkr. frá TK inngongur, umframt eginfígging hjá Sjósavninum. Felagið hevur nú eisini fingið knýttan at skikkaðan persón, ið skal standa á odda fyri tilgongdini at samskifta við grunnar v.m. og útvega pening. Nú er nakað fráligið og vil tíðarætlanin tí vera forskotin nakað. Sí hjálagt dagførda avtalu um stuðul.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu avtalu við Sjósavnið.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Seinastu mánaðirnar hevur Sjósavnið saman við ráðgeva arbeitt við uppskoti til byggiskrá fyri verkætlanina, herundir arbeitt við at fáa lýst teknisku viðurskiftini í verkætlanini, ið eru av berandi týdningi.

Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri Sjósavnið og givið afturboðan um uppskot.

Nú fyriliggur eina dagførd byggiskrá og er ætlanin at ráðgevin nú fer undir at gera eitt dagført skitsuuppskot. Tá tað ætlandi er liðugt fyrst í 2020 er ætlanin at fara undir tilgongdina at seta seg í samband við grunnar og onnur við atliti til stuðul til verkætlanina. Henda tilgongd tekur væntandi alt 2020 alt eftir hvussu tað gongur.

Alt eftir hvussu tað gongur at fáa stuðul kann gerast viðkomandi hjá TK í 2020 ella 2021 at taka støðu til framtíðar leiklut í einum vónandi komandi samtaki av stuðlum. Nevndin fær kunning um málið so hvørt nýtt er at frætta.

Á fundinum verður stutt greitt frá byggiskránni og ætlanunum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

**Ískoyti**:
Verkætlanartilgongdin hjá Sjósavninum er nú komin hartil at eitt skipanaruppskot er tøkt. Av ymiskum orsøkum hevur tilgongdin tikið longri tíð er væntað. Ætlanin er nú hjá grunninum at fara undir at seta seg í sambandi við møguligar grunnar v.m. við atliti til at fáa stuðul til verkætlanina.

Ætlaði bygningurin er umleið 2000 m². Nakað størri enn áður umrøtt.

Leikluturin hjá TK í hesi fasuni er at vera tøk at vegleiða í møguligum spurningum viðv. menning av verkætlanini. Alt eftir hvussu tað gongur hjá felagnum at fáa tilsøgnir skal roknast við, at felagið kemur at heita á Tórshavnar kommunu um eina stuðulstilsøgn til verkætlanina fyrr ella seinni. Helst gongur nakað av tíð.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Tikið til eftirtektar.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umboð fyri Sjósavnið vóru fyrr í ár og løgdu fram dagført uppskot til ætlan og tilfar, ið grunnurin ætlar at brúka í sambandi við umsóknir til fígging.

Sí hjálagt tilfar. Á fundinum verður greitt frá kostnaðarmeting.

Ætlanin er eisini í næstum at hava ein kunningarfund á Argjum um verkætlanina.

Sjósavnið metir at møgulig luttøka hjá Tórshavnar kommunu er avgerandi fyri víðari tilgongdina í mun til at søkja um stuðul fá grunnum v.m. innanlands og uttanlands.

Sjósavnið ynskir at fáa eina tilsøgn um stuðul og vísir á fyrimynd í framferðarháttinum í mun til Stórhøllina.

Umsitingin metir at tað er hóskandi at kommunan tekur støðu um og í hvønn mun kommunan skal lata stuðul – vísandi til leiðreglur frá 3. september 2015 um stuðul til íløgur.

Kommunan hevur frá byrjan verið ein týðandi partur av at menna verandi sjósavn, bæði við lendi, bygningi og rakstrarstuðli, tí er eisini upplagt at kommunan hevur onkran leiklut í mun til at veita part av fíggingini í eini komandi bygging.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til møguliga tilsøgn um stuðul, treytað av at samlaða fíggingin kemur uppá pláss. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umboð fyri Sjósavnið vóru á fundi við Tk tann 30. juni 2022. Her bleiv greitt frá, at fyrireikingararbeiðið gongur væl, og at Sjósavnið hevur gjørt ein snøggan faldara, sum lýsir verkætlanina og møguleikarnar væl, eisini hvussu bygningurin tekur seg út á økinum. Faldarin verður eisini brúktur, nú Sjósavnið er farið at søkja stuðul úr grunnum o.l. til at byggja Sjósavnið.

Sannlíkindi fyri at fáa munandi uttanhýsis stuðulsfígging til byggingina er í stóran mun tengt at, um lokali myndugleikin eisini stuðlar verkætlanini fíggjarliga á einum hóskandi stigi, sum lutvíst er at meta sum politiskur stuðul til sjálva verkætlanarendamálið og ein munandi stuðul til byggingina av Sjósavninum.

Formaðurin skjýtur upp, at kommunan játtar kr. 15 mió til ætlanina fíggjað fíggjarætlanirnar yvir tey komandi árini, og at útgjald er treytað av, at øll loyvi verða fingin til byggingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Føroya Sjósavni kr. 15 mió til at byggja nýtt Sjósavn fíggjað at kontu 5370 Stuðul til íløgur soleiðis: kr. 2 mió í 2024, kr. 3 mió í 2025, kr. 5 mió í 2026 og kr. 5 mió í 2027, og at stuðulin er treytaður av, at øll loyvi til byggingina verða fingin til vega. Mælt verður harumframt til at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. februar 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Skotið verður upp at játta Sjósavninum tilsøgn uppá kr. 15 mió til byggingina í fíggjarætlanini 2024, og at tilsøgnin er galdandi til 31. desember 2024 soleiðis, at Sjósavnið hevur neyðuga tíðarkarmin at fáa til vega samlaðu fíggingina til verkætlanina. Treyt fyri útgjaldi er, at øll loyvi til byggingina eru fingin til vega.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta tilsøgn kr. 15 mió til at byggja nýtt Sjósavn á Argjum av kontu 5370 Stuðul til íløgur í fíggjarætlanini 2024. Tilsøgnin er galdandi til 31. desember 2024, og útgjald er treytað av, at øll loyvi til byggingina eru fingin til vega.

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býáðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

## 38/23 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 365/18 | 18/04076-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 247/19 | 18/04076-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 238/19 | 18/04076-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 203/19 | 18/04076-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 244/19 | 18/04076-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 58/20 | 18/04076-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 95/20 | 18/04076-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 74/20 | 18/04076-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 125/20 | 18/04076-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 123/20 | 18/04076-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 96/20 | 18/04076-1 |
| 12 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 119/20 | 18/04076-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 27/21 | 18/04076-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 31/21 | 18/04076-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 116/21 | 18/04076-1 |
| 16 Mentamálanevndin | | | 18/04076-1 |
| 17 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 239/21 | 18/04076-1 |
| 18 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 251/22 | 18/04076-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 36/23 | 18/04076-1 |
| 20 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 38/23 | 18/04076-1 |

**Upprunin til málið:**
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ynski er at heiðra minni um Andreu Árting og hennara virki innan fakfelagsrørsluna, kappróður v.m. við at gera eina standmynd ella minnismerki/-varða.

Andrea Árting var komin væl upp í árini, tá hon í ringastu tíðunum í 30´unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Kreppan hevði við sær, at fakfeløgini vóru undir trýsti. Hetta nervaði tó ikki Andreu. Hon var órørd, og hon segði altíð tingini beint fram sama, hvar ið hon var. Við sínum eyðsýnda sosiala tilviti gjørdist hon ein ímynd fyri fakfelagsstríði í Føroyum í 20. øld. Alt sítt vaksna lív setti hon rættindini hjá kvinnum í brennidepilin. Hóast hon ongantíð sat á tingi, so virkaði hon í roynd og veru sum ein sosialpolitikkari. Lønin hjá arbeiðskvinnunum var største partin av 20. øld væl lægri enn hjá monnunum. Hetta setti Andrea sær fyri at broyta. Í 1977 rakk hon loksins úrslitinum, at kvinnur og menn skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tá hon seinni sama árið legði frá sær sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, var hon 85 ára gomul. Soleiðis verður sagt um Andreu Árting í sambandi við filmin, sum er gjørdur um hana og vístur í KVF í 2017.

Røddir hava av og á verið frammi um at gera eina standmynd av kendu havnarkonuni Andreu Árting.

Tórshavnar kommuna kundi tikið stig til samstarv við Havnar Arbeiðskvinnufelag og aðrar áhugapartar um at seta eina standmynd upp av Andreu Árting í býnum.

Ein staðseting kundi t.d. verði uttanfyri Steinatún, sum liggur mitt í býnum, har nógv fólk ferðast aftur og fram. Tað hevði klætt Tórshavnar kommunu væl at reist eina standmynd av hesi serstøku kvinnu, sum stríddist so íðuliga fyri rættindunum hjá kvinnum.

Møgulig staðseting av standmynd ella minnismerki/-varða er málsøkið hjá Býarskipanarnevndini og verður tikið upp í nevndini, um verkætlanin gerst aktuell.

Tá greitt er, hvørjir partar hava áhuga at vera við í verkætlanini, verður fíggjarætlan gjørd og leistur fyri, hvussu verkætlanin verður útint.

Eisini kann nevnast, at bók um søguna hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir ætlan kemur út í 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum og at fáa samstarv í lag við Havnar Arbeiðskvinnufelag og onnur um møguliga verkætlan.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nøkur fakfeløg um at vera við í hesi verkætlan, og ábendingar eru um, at tað helst ber til. Eisini hevur TK søkt Betri Stuðul um stuðul, men fekk noktandi svar. Fyri at skapa betri grundarlag fyri at koma á mál við verkætlanini verður mett hóskandi, at TK nú tekur stig til at útvega hóskandi eginfígging til verkætlanina, sum so kann vera grundarlag undir endaligu tilgongdini at fáa onnur at koma við í samlaðu fíggingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
1. Flyta 100 tkr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting
2. Flyta 100 tkr. av projektkontu L57029 (sak: Gøtuítrótt) til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina at flyta 100 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av konto 4140, kr. 100.000 av L57029 og kr. 100.000 av konto 5310 á konto 5311 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til tess at gera verkætlanina ítøkiliga, verður mett neyðugt at fáa nærri viðgerð av møguligum staðsetingum og krøvum til sjálvt listaverkið Andreu Árting til heiðurs, hetta eisini sum liður at útvega samlaðu fíggingina. Á løgukontu 6275 Fríðkan av býnum, L62038 eru kr. 300.000 tøkar. Aftrat eru nakrar tilsagnir um fíggjarligan stuðul frá uttanhýsis pørtum komnar til verkætlanina.

Tørvur er á at fáa neyvari staðfest, hvørji krøv skulu setast til staðseting og listaverk. Tørvur er harumframt á uppskoti um tilgongd at útvega sjálvt verkið. Liður í hesum er eisini at meta um hóskandi vavi av samlaðu verkætlanini, harundir kostnað.

Tað eigur at verða heitt á Listaráðið um skjótast til ber at geva tilmæli til nevndarviðgerð hesum viðvíkjandi, so at tilgongd at útvega listaverk og aðrar fyrireikingar í sambandi við staðsetingina annars kunnu byrja.

Um tilgongdin at útvega listaverk v.m. krevur fígging, verður hetta at leggja aftur fyri nevnd at taka støðu til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Listaráðið um uppskot til staðseting av listaverkinum og krøv annars bæði til staðseting og listaverk. Mælt verður eisini til at heita á Listaráðið um uppskot til tilgongd at útvega listaverkið.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti**:
Tórshavnar listaráð hevur viðgjørt málið um staðseting av listaverkinum, umfram krøv til listaverkið og

útveganartilgongd og hevur fylgjandi tilmæli.
---
*Viðv. staðseting*
*Listaráðið mælir til at verkið verður staðsett í Steintúni, treytað av at tað kann fáa hóskandi rúmd og pláss og ikki avmarkað til sjálvt torgið. Listafólkið skal kann arbeiða við staðseting í økinum.*

*Viðv. krøvum til listaverkið*
*Listaráðið mælir til at taka støði í nøkrum fáum krøvum, herundir boðskapinum um AÁ (kvinnujavnrættindi, sosialt rættvísti, áræði, áhaldni og sterk kvinnufyrimynd) og at verkið skal kennast fólksligt (ikki elitert), forvitnisligt og sjónligt í býarmyndini.*

*Viðv. útvegnar-/útboðstilgongd*
*Listaráðið mælir til at fara undir eina tilgongd har útvald yrkislistafólk fáa møguleika at luttaka í eini tilgongd, ið helst er í stigum. Einum undanumfari og so evt. eini millumstigi (tá móti ávísum gjaldi) og so endaligari tilgerð.*
---

Víðari tilgongd
Um samtykt verður at halda fram við verkætlanini fer Listabólkurin í kommununi, ið hevur ábyrgd av praktisku útveganini sbrt. galdandi reglugerð, undir útboðstilgongd at útvega listaverk. Hugsanin er at talan verður um innbodna tilgongd við einum undanumfari, og um valt verður at fara víðari til eitt annað umfar við fleiri luttakarum, at hesir tá fáa eina ávísa samsýning fyri kappingarluttøkuna.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við útboðstilgongdini við støði í tilmælinum frá Tórshavnar listaráði.
Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanarnevndini mæla til at taka undir við tilmælinum og at játta 100.000,- kr. av kt. 6275, fríðkan av býnum, L00001 løgukarmur fyri árið, til L62038 standmynd/minnismerki um Andreu Árting og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í framflytingunum frá fíggjarárinum 2019, ið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini og býráðnum í næstum, verða ætlandi framflytingar frá m.a. kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli, á umleið 950 tkr.

Mett verður at partur av hesum kann vera flutt til at betra um fíggjarliga grundarlagið fyri verkætlanini. Henda upphæddin er helst ikki nokk, men vil nú vera nøktandi grundarlag fyri at fara víðari við verkætlanini og byrja útveganartilgongdina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 250 tkr. av kontu 5210 Tórshavnar kvøldskúli til projektkontu L62038 – standmynd/minnismerki - Andrea Árting.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Listabólkurin hevur verið í tilgongd saman við Edvardi Fuglø, listamanni um skitsuuppskot til standmynd, og hevur eisini fingið gjørt uppskot, ið sýnir staðseting av standmyndini í sunnara parti av torginum í Steinatúni.

Á fundinum verður greitt nærri frá uppskotinum til standmynd og ætlaðu staðsetingini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við at finna eina endaliga staðseting av standmyndini í Steinatúni.

Mett verður, at standmyndin hevði tikið seg væl út í plantukummuni móti vestur, har hon í størstan mun verður staðsett, soleiðis at hon fær rúm og ikki verður kroyst upp ímóti natúrligu trøunum.

Sí viðheftu tekningar av ítøkiligu staðsetingini, j.nr. 18/04076-45, Staðseting_Standmynd av Andreu Árting.

Sigast skal, at hendan staðsetingin skal fínpussast, soleiðis at standmyndin fær nøktandi rúmd, og soleiðis at hon ikki verður fløkt inn í verandi planting og eitt nú lyktapelarnar í plantukummuni. Møguliga verður neyðugt at flyta onkra planting, og tað verður í framhaldandi tilgongdini neyðugt at taka støðu til hvussu standmyndin verður sett í plantukummuna, um gróður skal verða kring standmyndina ella um økið møguliga skal flísaáleggjast ella at eitthvørt annað skal gerast kring standmyndina. Øll hesi viðurskiftini eiga at verða tikin upp í komandi tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at standmyndin av Andreu Árting verður staðsett í Steinatúni í vestastu plantukummuni, og at málið verður beint í mentamálanevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtyktin hjá byggi- og býarskipanarnevndini tikin til eftirtektar.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Listabólkurin og Býarskipanardeildin hevur verið í samskifti við listamannin Edvard Fuglø um verkið og eru komin ásamt um nakrar tillagingar so verkið stendur seg enn betri í mun til umhvørvið í Steintúni.

Eisini er nú nærri greitt viðv. mettum kostnaði, og kemur umsitingin á greiða frá tí á fundinum. Neyðugt verður við eyka fígging afturat um verkætlanin skal fremjast.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 122<br>Formansins merki: |

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Leingi hevur verið arbeitt við at reisa eina standmynd av Andreu Árting, uml 1 mió kr er fingin til vega og byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt at standmyndin skal staðsetast í Steinatúni. Listafólkið er funnið og listaverkið er teknað og klárt er at fara til verka.

**Tilmæli:**
Gunvør Balle, Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang mæla til at fara undir arbeiðið at reisa standmyndina av Andreu Árting í Steinatúni og brúka tað uml. 1 mió kr ið hoyra til verkætlanina. Mælt verður samstundis til at seta 1 mió kr av á fíggjarætlanina fyri 2022 soleiðis at listaverkið er liðugt fíggjað.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við at játta kr. 1 mió. til verkætlanina av løgukarmi 6275 LK 62999 á projektkonto L62038. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við at játta peningin av LK62999, men mælir til, at peningurin verður funnin á konto, ið hoyrir mentanarøkinum til.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Borgarstjórin mælir til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og harumframt at játta kr. 1 mió í fíggjarætlanini 2023 løgukonta 6275 Fríðkan av býnum LK 62038 Standmynd Andrea Árting á projektkonto L62038 Standmynd Andrea Árting og at fremja ætlanina, ið varð einmælt samtykt.

# 39/23 Røktarheim - uttanumøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 07.02.2023 | 4/23 | 23/00631-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 39/23 | 23/00631-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 39/23 | 23/00631-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Á íløguætlanini fyri 2023 eru settar av 1 mio. kr. til uttanumøki á røktarheimum.

Talan er um, at asfaltera gøturnar sum eru í urtagørðunum millum deildirnar á Lágargarði. Eisini skal gøtan sum gongur frá høvuðsinngongini og norður um Lágargarð og framvið húsinum umvælast og asfalterast.

Gøtan frá norðasta horninum á Boðanesheiminum niðan til vakstrarhúsið skal somuleiðis asfalterast, umframt aðrar smærri gøtur aftanfyri Boðanesheimið. Garðurin uttanfyri Boðalon, sum í dag er hegn, skal gerast av nýggjum og leingjast so hann gongur heilt inn til útbygningin í sunnara enda á Boðalon.

Í hjáløgdu tekning sæst hvørji øki talan er um.

Tekniska deild hevur ábyrgdina av málinum, og eftir ætlan er tað rakstrarstøðin hjá kommununi sum skal standa fyri arbeiðinum.

Tá hesi viðurskifti eru fingið uppá pláss, verður lættari hjá húsfólkum á Lágargarði og á Boðanesheiminum, at fara útum at spáka ein túr og eisini lættari hjá starvsfólkum at fara útum við húsfólkinum, antin tey eru til gongu ella sita i koyristóli. Serliga er tað trupult í dag, at fara við koyristóli eftir gøtuni frá Boðanesheiminum niðan til vakstrarhúsið í Tórsbyrgi, tí gøtan er løgd við grúsi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, heilsu- og umsorganarstjórin og fyrisitingarstjórin mæla heilsu- og eldranevndini til, at taka undir við, at 1 mio. kr. sum eru á íløgujáttanin til uttanumøki á røktarheimum verður játta til omanfyristandandi umvælingar, og leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 07. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 125<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 40/23 Hoyvíksvøllur - Nýtt graslíki v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 18/23 | 23/00097-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 5/23 | 23/00097-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.02.2023 | 28/23 | 23/00097-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 37/23 | 23/00097-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 40/23 | 23/00097-1 |

**Upprunin til málið**
Graslíkið á Hoyvíksvølli er illa farið.

**Lýsing av málinum**
Stórar avbjóðingar hava verið við graslíkinum á Hoyvíksvølli. Í 2020 bleiv staðfest, at vøllurin losar sera illa og hevur hetta serliga tvær fylgir. Tann eina er, at tað flýtur við leysum kunstgrasi kring allan vøllin, og hevur hetta umhvørvisligar fylgir. Fyri tað næsta hevur vøllurin losað somikið illa, at tað eru fleiri støð, har onki graslíki er, og gongur hetta út yvir kvalitetin og trygdina hjá teimum, ið brúka vøllin. Í løtuni koyrir sostatt ein reklamatións-sak millum TK og veitaran av graslíkinum.

Sbrt. mál 22/06615 (Eykajáttan av meirinntøkum 2022) samtykti býráðið tann 24. november 2022 at seta kr. 5 mió. av til vøllin í Hoyvík.

Í 2022 skifti kommunan graslíkið inni í Vika. Í hesum førinum er talan um ein umhvørvisvinarligan vøll við kork-infill, ið er góðkendur av FSF til Betri-deildina. Royndirnar higartil hava verið góðar, leikararnir dáma væl vøllin, og sjálvt korkið hevur hátta sær væl, bæði tá tað kemur til vind, regn og frost. Hetta er sama slag av graslíki sum er í Norðragøtu og har hava tey havt góðar royndir við vøllinum síðani 2021.

Sostatt kunnu vit út frá 1-2 ára royndum staðfesta, at hesin graslíkisvøllurin við kork-infill higartil er ein góð loysn.

Velur kommunan eina loysn við korki til Hoyvíksvøll, so má gerast nakað ið tað stóra hallið, sum er á vøllinum (hægstur á miðjuni). Hallið á vøllinum er somikið høgt, at stórur vandi er fyri, at korkið fer at renna oman ímóti bak- og síðulinju, tá tað regnar illa. Hetta fer eisini at gera røktina av vøllinum truplari.

Við støði í, at eisini Hoyvíksvøllur skal hava umhvørvisvinarligt infill, er neyðugt at fáa hallið burtur, og ikki er greitt, hvørjum standi undirlagið er frammanundan. Her er sostatt ein óvissa í mun til kostnaðarmetingina, sum má kannast nærri.

Umframt at skifta graslíkið v.m., er ætlanin at fáa gjørd onnur arbeiði við Hoyvíksvøll til tess at betra um umstøðurnar. Partur av hesum er at gera fyrireikandi uppskot um nýggj felagshøli og áskoðaraskýli við vøllin samsvarandi krøvunum til kappinrgarfótbólt í bestu deildini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
FSF vallarreglugerðin fyri 2023.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tilboð og kostnaðarmeting liggur í málinum.

## Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57036 | Vøllur í Hoyvík | 5775 | L570xx | Vøllur í Hoyvík | Ja | 5.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 5.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at heimila umsitingini at fáa til vega tilboð uppá graslíksvøll við kork-infill frá í minsta lagi tveimum veitarum at leggja aftur fyri nevnd, og at kannað verður nærri, hvussu verandi undirlag (hallið og ójavnar) kann rættast upp.

Harumframt verður mælt til, at partur av játtanini verður brúktur til at betra um aðrar umstøður við Hoyvíksvøll, herundir at fáa uppskot til nýggj felagshøli og áskoðaraskýli v.m. Mælt verður somuleiðis til at játta kr. 5.000.000 av løgukarmi 5775 LK57036 Vøllur í Hoyvík til nýggja løgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælunum við tí broyting, at heimilað verður umsitingini at fáa til vega tilboð uppá graslíkisvøll við kork-infill sum tann á Argjum at leggja fyri nevnd.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**

Tk hevur fingið tilboð frá P/F Føroya Møblasølu uppá graslíkisveiting av
merkinum DOMO (Niðurlendskt merki), sí hjálagt. Talan er um júst sama slag av graslíki, ið er lagt inni í Vika í 2022 og í Norðragøtu í 2021.

Báðir vøllirnir eru brúktir til landskappingardystir í Betri-deildini. Tó metir umsitingin, at samskifti við FSF skal takast upp, fyri at FSF kann góðkenna verkætlanina, áðrenn hon fer endaliga í gongd.

Í mun til tilboðið til graslíkisvøllin inni í Vika í fjør, so er ein ávís príshækking. T.d. er prísurin pr. fermetur hækkaður 12%, og svarar tað til óvanliga høgu príshækkingina, sum hevur verið í 2022. Samstundis er vøllurin í Hoyvík 8.556 $m^2$, meðan vøllurin inni í Vika er 7.208$m^2$.

Ein fyribils kostnaðarmeting liggur í málinum, við útgangsstøði í tilboðnum frá DOMO. Tá loysn við kork-infill verður vald, so eru krøv til hallið á vøllinum. Er hallið ov stórt, kann korkið renna av vøllinum saman við regninum. Staðfest er, at hallið er ov stórt á Hoyvíksvølli, og tí skal ein vídd á 8.556$m^2$ javnast betur út. Í hesum liggur størsta avbjóðingin og óvissan við kostnaðarmetingini, tí neyvar kanningar av lendinum eru ikki gjørdar enn.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til innkomna tilboðið ella um fleiri tilboð skulu fáast til vega. Um samtykt at taka av tilboðnum um graslíkið v.m., so eisini at játta kr. 5 mió av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg L57036 Vøllur í Hoyvík til nýggja løgukontu L57036 Vøllur í Hoyvík, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. februar 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur undir við, at graslíkið verður skift, men at tað eigur at verða bjóðað út.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meirluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við tilmælinum frá minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og meirilutanum í fíggjarnevndini um at taka av tilboðnum uppá graslíkið og at játta kr. 5 mió av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg LK57036 til L57036 Vøllur í Hoyvík

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

## 41/23 Nýggj ljósskipan á Tórsvølli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 20/23 | 22/05163-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 7/23 | 22/05163-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.01.2023 | 24/23 | 22/05163-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.01.2023 | 26/23 | 22/05163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 24/23 | 22/05163-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 41/23 | 22/05163-1 |

**Upprunin til málið**
Ljósskipanin á Tórsvølli er við at ganga fyri og lýkur ikki longur krøv.

**Lýsing av málinum**
Verandi mastrar og ljósskipan á Tórsvølli vórðu bygd í 2011. Tey fyrstu árini riggaði ljósskipanin væl, men seinastu árini eru avbjóðingarnar við ljósskipanini vorðnar størri og størri, har hon m.a. sløknaði heilt undir landskappingardysti í heyst.

Rakstrar- og viðlíkahaldsavtalur eru gjørdar við tvær fyritøkur hesi árini, umframt at Ítróttaranlegg eisini hevur tikið sær av onkrum viðlíkahaldi.

Fyritøkan, ið tekur sær av viðlíkahaldinum av streyminum og projektørunum, gjørdi vart við, at øll ljósskipanin er í ringum standi og tað er ringt at fylgja við øllum avbjóðingunum. T.d. eru projektørarnir sera illa farnir, fuktur er í øllum dósum, og tilfarið dettur sundur og vandi er fyri, at tilfar kann detta niður.

FSF og kommunala umsitingin eru samd um, at neyðugt er at skifta ljósskipanina út, og fóru í heyst undir ávísar fyrireikingar. Tíðarætlanin er, at nýggja ljósskipanin er liðug til landsdystirnar í juni 2023. Vandamál í hesum sambandi er drúgv tíð í mun til framleiðslu og flutning.

Uppsetingin skal í gongd í apríl og arbeiðið skal verða liðugt ikki seinni enn seinnu hálvu av mai 2023.

Í hesum sambandi hevur UEFA viðmælt at brúka ensku fyritøkuna ISS sum ráðgeva. Fyritøkan er hin fremsta innan ráðgeving av stadionljósum í Evropa og verður millum annað nýtt av UEFA, FIFA og Premier League. Ráðgevin hevur eftirfylgjandi verið í Føroyum og hevur m.a. staðið fyri forkanning, kravfesting, projektering og útboði, og aðrir partar av uppgávuni er sáttmálar og eftirlit.

Veitingin byrjar frá talvuhúsinum. Talan er um LED-projektørar í mastrunum og stadiontakinum.

Ráðgevin (ISS) viðmælti at bjóða arbeiðið út millum tveir stórar ljósskipanarveitarar – Musco og Signify/Philips, sum báðir kunnu geva nøktandi góðskugarantiir uppá ljósskipanina bæði viðvíkjandi tepru tíðarætlanini og haldførinum yvir ár. Í hesum sambandi fingu veitararnir upplýst tríggjar el-fyritøkur í Føroyum, sum kundu viðmælast sum møguligar undirveitarar teirra.

Arbeiðið varð boðið út í november og tilboðini komu inn 13. desember 2022.

Bæði Musco Lighting Europe og Signify hava latið inn tilboð at gera nýggju stadionljósini á Tórsvølli. Musco hevur latið tvey tilboð inn, meðan Signify saman við Install hevur latið inn eitt tilboð. Tilboðini eru hesi:

| **Veitari** | **Ljósskipan íroknað 10 ára garanti- og tænastuavtalu -** |
|---|---|
| Musco, tilboð 1 | €1.120.000 (uml. kr. 8,3 mió) |
| Musco, tilboð 2 | €1.020.000 (uml. kr. 7,6 mió) |
| Signify/Install | €1.529.847 (uml. kr. 11,4) |

Musco Lighting eigur sostatt tvey tey lægsta tilboðini. Frá ráðgevanum verður mælt til at taka av tilboði 1 frá Musco kr. 8,3 mió. Grundgevingin fyri hesum er, at tað í hesum tilboðnum verða nýttir LED projektørar av betri góðsku enn í tilboði 2. Sambært ráðgevanum tryggjar Tórsvøllur sær við hesi loysn best møguligu ljósviðurskifti komandi 10 árini.

Umsitingin saman við FSF mælir til at taka av tilboði 1 frá Musco.

Umframt útreiðslur til sjálva ljósskipanina, eru í verkætlanini eisini aðrar útreiðslur til annað el-arbeiði við eitt nú talvum, ráðgeving frá IIS og LBF, tryggingar og mvg. Við støði í tilboði 1 verður samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina kr. 11 mió.

<u>Samstarvsavtala</u>
Verkætlanin verður skipað á sama hátt sum onnur byggistig av Tórsvølli, har Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunan hava gjørt samstarvsavtalur. Henda samstarvsavtalan fevnir um at dagføra og endurnýggja ljósskipanina á Tórsvølli innanfyri ein karm uppá kr. 11 mió, har hvør parturin rindar helmingin av kostnaðinum. Sí uppskot til samstarvsavtalu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | | Játtast á: | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | | **Upphædd** |
| | | | | 5775 | Ítrótta-anlegg | Nýggj ljósskipan á Tórsvølli | L570xx | | 5.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Des 2022-juni 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamáleiðarin mæla til:

- at samtykkja uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um at dagføra og endurnýggja ljósskipanina á Tórsvølli,
- at heimila umsitingini saman við Fótbótssambandi Føroya at gera sáttmála um veiting og uppseting av ljósskipan sambært tilboði 1 frá Musco,
- at játta kr. 5,5 mió av løgukontu 5775 L57015 Langhylur til nýggja løgukontu 5775 Tórsvøllur ljóskipan at játta aftur seinni í inniverandi fíggjarári, og
- at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Vìst verður tilmælið omanfyri um at játta kr. 5,5 mió av langhylsverkætlanina tó so, at upphæddin verður at játta langhylgsverkætlanina aftur. Niðanfyri er uppskot til kr. 5,5 mió av rakstrarkontum, sum hava staðfest minninýtslu í 2022.

| | |
|---|---|
| 1110 Býráðið | 200.000 kr. |
| 1310 Býráðsskrivstova | 300.000 kr. |
| 1312 Trivnaðarfyrisitingin | 200.000 kr. |
| 1317 Heilsu- og umsorganartænastan | 300.000 kr. |
| 1560 Tænastumannaeftirlønir | 500.000 kr. |
| 2721 Røktartænastur | 900.000 kr. |
| 2731 Gjøld fyri røktartænastur | 500.000 kr. |
| 2750 Ansingarsamsýning | 500.000 kr. |
| 6111 Leiga traðir og økir | 225.000 kr. |
| 7317 Talgilding til borgaran | 300.000 kr. |
| 7710 Ferðavinnan | 300.000 kr. |
| 20190 Aðrar útreiðslur | 1.275.000 kr. |

**Tilmæli**:

Stjórnin mælir til at samtykkja tilmælini til fundin í mentamálanevndini 17. januar 2023.

Stjórnin mælir harumframt til at flyta tilsamans kr. 5,5 mió av omanfyri nevndu rakstrarkontum til løgukontu 5775 L57015 Langhylur.

**Mentamálanevndin 25. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

# 42/23 Fríksúlin í Havn: Umsókn at stovna forskúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.09.2022 | 56/22 | 22/03166-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 249/22 | 22/03166-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 236/22 | 22/03166-5 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 15/23 | 22/03166-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 34/23 | 22/03166-5 |
| 6 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 42/23 | 22/03166-5 |

**Upprunin til málið**
Stýrisformaðurin í stýrinum fyri Fírskúlan í Havn søkir í teldubrævið dagfest 20. juni 2022 um forskúla í fírskúlanum.

**Lýsing av málinum**
Frá skúlaárinum 2023/24 er ynski at stovna forskúla í Fírskúlanum í Havn.

Í umsókníni stendur m.a.:" Forskúlin skal tryggja børnunum eina blíða byrjan á skúlalívið, og skal virka sum ein millumliður millum barnagarð/dagstovn og skúla. Barnið skal koma at kenna umstøðurnar og merkja at tey eru partur av einari skipaðari læritilgongd. Á henda hátt verður brúgv bygd frá dagstovni til skúla."

Námsætlanin skal fylgja kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla, og ætlanin er at skipa dagin soleiðis, at børnini kunnu møta frá kl. 07.40, kl. 08 byrjar skúladagurin so við morgunfundi, undirvísing/fakligt innihald, matarsteðgi, stillaløtu, framhald av fakliga arbeiðinum og morgunsangi. Síðani er útispæl og at enda matarsteðgur. Kl. 12.30-17.00 er frítíðarskúli.

Fírskúlin í Havn er skipaður sum eitt heildagstilboð við undirvísing og, fríløtum og frítíðaransing.

Í Tórshavnar kommunu eru í løtuni fimm forskúlar, fýra í kommunalum skúlum og ein í fírskúla. Forskúlar eru í Sankta Frans skúla, í Skúlanum á Argjahamri, í Skúlanum á Fløtum, í Kaldbaks skúla og í Lítlaskúla. Haraftrat er samtykt, at forskúli verður í Eysturskúlanum, og hann byrjar í august 2023.

Tímajáttanin til forskúlarnar í Tórshavnar kommunu eru 4 tímar um dagin. Forskúlin í Skúlanum á Fløtum hevur tó 5 tímar um dagin.

Forskúlalíknandi tilboð er skipað tilboð millum skúla og dagstovn, har tey 6 ára gomlu børnini eru í skúla tveir tímar um dagin. Forskúlalíknandi tilboð byrjaði í Nólsoy í august 2017, og søkt er um, at forskúlalíknandi tilboð verður í Velbastaðar skúla frá skúlaárinum 2023/24.

Forskúli byrjaði í Kaldbaks skúla hetta skúlaárið, og góðkenningin frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum er fyribils galdandi í tvey ár. Tað er serliga tí, at næmingatalið er so lágt, at játtanin frá Uttanríkis- og

mentamálaráðnum er at skipa forskúlaflokk í Kaldbaks skúla sum eina royndarskipan næstu tvey skúlaárini.

Á býráðsfundi 24. februar 2022 varð samtykt, at forskúlar verða skipaðir í øllum kommunalu skúlunum. Í hesum føri er ikki talan um ein kommunalan skúla, men ein frískúla.

Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla, kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013, kann forskúlaflokkur verða stovnaður, tá 12 børn eru í flokkinum, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.

Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur. Í § 30 stk. 3 stendur, at undirvísingin í ávikavist forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári ella 1., 2. og 3. skúlaári kann lutvís verða samskipað. Á hesum somu flokksstigum kann øll undirvísingin í teimum smáu skúlunum verða samskipað.

Sambært lógini um frískúlar § 2 stk. 2 kann landsstýrismaðurin geva loyvi til, at forskúlaflokkar eisini koma undir lógina. Sambært § 18 stk. 6 er kommununnar stuðul til forskúlaflokkar, sum verða góðkendir sbrt. § 2, stk. 2, er 85% av rakstrarútreiðslunum, íroknað útreiðslur til skrivstovuhald og 85% av útreiðslunum til læraralønir og námsfrøðingalønir.

Forskúli við tilhoyrandi frítíðarskúla er í frískúlanum Lítlaskúla, tað tilboðið kom áðrenn ásetingina í lógini um, at forskúlaflokkar kunnu stovnast í frískúlum. Tá var niðurstøðan, at kommunan rindar hesi tilboð 100% við støði í eindarkostnaðinum, ið kommunan hevur á ávikavist forskúlatilboðnum og frítíðarskúlatilboðnum til forskúla. Foreldragjaldið, sum kommunan tekur inn, er tað sama, sum í kommunalu forskúlunum og frítíðarskúlunum til forskúla, tilsamans er tað sama sum foreldragjald fyri barnagarðspláss.

Stýrið fyri frískúlan í Havn metir, at 8 børn verða skrivað inn í forskúlan skúlaárið 2023/24 og metir, at árið eftir verða 12 skrivað inn í forskúlan.

Skúlin leggur dent á, at hann er ein lítil skúli, og at tað er viðkomandi at meta og viðgera fríslúlan  sum ein lítlan skúla.

Skúlaárið 2022/23 er næmingatalið í Fríslúlanum í Havn 16. Millum eitt og fimm børn eru í hvørjum árgangi.

Útreiðslurnar fyri hvørt barn í forskúla eru uml. 46 tkr. Um forskúli verður játtaður Fríslúlanum í Havn, skal støða eisini takast til, um játtanin skal vera 85% av rakstrarútreiðslunum ella 100% av rakstrarútreiðslunum**.**

Um Tórshavnar kommuna samtykkir at játta fígging til forskúla í Fríslúlanum í Havn, so er tað stýrið fyri skúlan, sum søkir Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúla í Fríslúlanum í Havn, tí talan er um ein fríslúla

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. Juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022

Løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um fríslúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 4. mai 2022

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til:

a) at játta umsóknini treytað av, at næmingatalið fyrsta árið verður í minsta lagi 8 og eftirfylgjandi árini í minsta lagi 12, og at tímatalið verður 20 undirvísingartímar um vikuna
b) at stuðulin verður sum til forskúla í Lítlaskúla 100% av rakstarútreiðslunum
c) at frítíðarskúlin verður víðkaður til forskúlabørnini

**Trivnaðarnevndin 20. september 2022: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Býráðsfundur 27. oktober 2022: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Stýrið fyri F# Frískúlan í Havn er í skrivi dagfest 1. november 2022 kunnað um býráðssamtyktina tann 27. oktober at játta umsóknini um forskúla treytað av, at næmingatalið fyrsta árið í minsta lagi er 8 og eftirfylgjandi árini í minsta lagi 12.

Stýrið sendi síðani landsstýrismanninum umsókn um loyvi at skipa forskúla í Fráskúlanum í Havn og hevur fingið svar, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið góðkennir sambært § 2, stk. 2 í løgtingslóg um fráskúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 4. mai 2022, har ásett er, at landsstýrismaðurin kann geva loyvi til, at forskúlaflokkar eisini koma undir lógina, at forskúli verður skipaður í Fráskúlanum í Havn.

Í teldupostsamskifti við stýrisformannin er nú kunnað um, at 5 børn eru skrivað inn í Fráskúlan í Havn í forskúla, og eitt teirra býr í aðrari kommunu, sostatt er talan bert um 4 børn.

Í teldupostsamskiftinum stendur eisini: "Í fyrsta lagi ynskja vit at fáa forstáilsi og játtan frá Tórshavnar Kommunu um at vit søkja Barna- og útbúgvingarmálaráðið um loyvi at byrja forskúlan ella tað, ið verður nevnt eitt forskúlalíknandi tilboð við 5 børnum frá skúlaárinum 2023/2024. Harnæst meta vit at eitt hóskandi minsta mark at áseta til okkara forskúlalíknandi tilboð er 5-6 børn. Vit taka sum meginreglu í mesta lagi 8 børn inn í forskúlan um árið, og hetta handlar um at vit skulu hava eina hóskandi javnvág millum okkara ymsu árgangir og teir fysisku karmarnar vit hava at ráða yvir."

Umsitingin metir, at ein forskúli við 5-6 børnum er ov lítil, og tí verður mælt frá at játta stýrinum fyri Fríkskúlan í Havn forskúla til so fá børn.

Forskúlalíknandi tilboð er í Nólsoyar skúla og verður í Velbastaðar skúla frá næsta skúlaárið. Hvør skúli fær játtan til tveir undirvísingartímar um dagin. Børnini møta í skúlanum um morgunin og eru har í tveir tímar, síðani fara tey í dagstovnin. Tey ganga øll í sama dagstovn.

Tað ber illa til at skipa eitt forskúlalíknandi tilboð í einum fráskúla eftir hesum leisti, tí børnini ganga í ymsar barnagarðar, og tað ber ikki til at møta í einum forskúlalíknandi tilboði í tveir tímar um morgunin, og at børnini so fara á dagstovn, sum ikki er nærhendis, men haraftrat í hesum føri í ymsar dagstovnar.

**Tilmæli:**

a) Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at halda fast við býráðssamtyktina at játta Frískúlanum í Havn fígging til forskúla til í minsta lagi 8 børn fyrsta árið og í minsta lagi 12 børn eftirfylgjandi árini.

b) Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini frá at játta Frískúlanum í Havn fígging til forskúlalíknadi tilboð.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at játta umsóknini hjá Frískúlanum í Havn um at stovna forskúla í frískúlanum hóast ov lágt næmingatal sum royndarskipan skúlaárini 2023/24 og 2024/25 sum liður í tilgongd frískúlans at økja samlaða næmingatalið samsvarandi frískúlalógini. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

# 43/23 Forskúli í Kollafjarðar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 13/23 | 23/00597-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 31/23 | 23/00597-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 43/23 | 23/00597-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Kollafjarðar skúla at stovna forskúla

**Lýsing av málinum**
Á býráðsðfundi 24. februar 2022 varð samtykt, at forskúlar verða skipaðir í øllum kommunalu fólkaskúlunum.

Fimm forskúlar eru í Tórshavnar kommunu. Teir eru í Sankta Frans skúla, í Skúlanum á Argjahamri, í Skúlanum á Fløtum, í Kaldbaks skúla og í Lítlaskúla, sum er ein frískúli. Heimild er at skipa forskúla í Eysturskúlanum, heimild er esini at skipa forskúla í Fríksúlanum í Havn. Haraftat er forskúlalíknandi tilboð í Nólsoyar skúla, og forskúlalíknandi tilboð verður eftir ætlan skipað í Velbastaðar skúla í august 2023.

Kollafjarðar skúli hevur sent kommununi umsókn um loyvi at seta á stovn forskúla í Kollafjarðar skúla frá skúlaárinum 2023/24.

Í umsókníni stendur m.a.:"Endamálið við at seta á stovn forskúla í Kollafjarðar skúla er at skipa eitt mennandi og samanhangandi tilboð til børn í aldrinum 6 ár, til tey eru liðug við 1. flokk. Ætlanin er at skipa eitt tilboð, har samstarv millum forskúla, grunddeildina og frítíðarskúlan er í hásæti. Serligur dentur verður lagdur á samstarv millum forskúla og 1. flokk."

**Lógargrundarlag**
Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verð loyvt kommunum at seta á stovn forskúla.

Í § 10 í folkaskúlalógini stendur:
§ 10. [1)] Í forskúlaflokki skulu børnini verða kunnað um dagliga lívið í skúlanum, læra at vera í skúla og at vera trygg við undirvísingarstøðuna, har tað fer fram eitt samspæl millum læring og leik.
*Stk. 2.* [1)] Børnini skulu læra grundstøðið undir lesing, skriving og rokning, læra at nýta bókasøvn, handaligt virksemi, tónleik, rørslu, at lurta og verða aktivur luttakari í undirvísingarstøðuni og í tí sosiala samverupartinum.
*Stk. 3.* [1)] Skipað samstarv skal verða millum lærarar og pedagogar í forskúla, byrjanarundirvísing og frítíðarskúla.

Sambært kunngerðini um skipan og hæring í forskúla skal forskúlaflokkur hava tilknýti til ein fólkaskúla og skal húsast undir somu lon sum kommunali skúlin ella eftir serligari skipan við tilknýti til kommunala skúlan, og tað er skúlaleiðarin, sum hevur dagligu ábyrgdina av forskúlanum við tilvísing til kommununa, tá ið talan er um fíggjar- og hølisviðurskifti.

**Innihald og skipan**
Gerandisdagurin í forskúlanum verður skipaður í samstarvi millum námsfrøðingar og lærarar. Virksemið í forskúlanum skal stuðla fjølbroyttu menningini og støðugu lærutilgongdini hjá einstaka barninum. Leikur og læra eru ein týðandi partur í forskúlanum, og samspæl skal vera millum læring og leik.

Í umsókníni frá skúlanum stendur m.a., at í Kollafirði liggur væl fyri at knýta náttúruna og nærumhvørvið upp í forskúlatilboðið. Tað er ikki langt oman í fjøruna, og stutt er í viðarlundina og hagan. Fleiri søgulig støð eru eisini nærhendis bygdini. Ætlanin er at hava ein fastan útidag um vikuna – umframt at farið verður út hvønn dag í vikuni.

Leikur og læra eru grundin undir forskúlanum, og í forskúlanum í Kollafirði fer í nógv størri mun dentur at verða lagdur á spæl, rørslu og tað handaliga enn á tann bókliga partin.

Sambært § 3 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla skal innihaldið í undirvísingini í minsta lagi fata um grundstøði í samveru og samstarvi, mál og málmenning, rørslu og motorikki, sosialum førleikum, undran, forvitni og skapanargleði, handaverki og list,  støddfrøði og náttúru og at nýta náttúruna í læringini.

Í skúlapartinum í forskúlanum í Kollafirði fer at verða arbeitt við talfatan, har til dømis dentur verður lagdur á við undran, forvitni og skapanargleði at skilja, hvat vit brúka støddfrøði til. Ljóð og bókstavir verða eisini á skránni, endamálið er at gera børnini tilvitað um málið, har m.a. dentur verður lagdur á at læra at lurta, ríma, arbeiða við og gera setningar og orð. Í útiskúlanum verður dentur lagdur á náttúruna og nærumhvørvið, og sosial samvera samstarv, upplivingar rørsla og motorikkur verða í hásæti. Í ítrótti verður forskúlin saman við innskúlingini.

**Næmingatal**
Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla kann forskúlaflokkur verða skipaður, tá ið 12 børn eru í flokkinum, og eiga í mesta lagi at vera 24 børn við skúlaársbyrjan, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.

Árgangirnir í Kollafjarðar skúla hetta skúlaárið eru millum 10 og 19. Okkurt árið verður næmingatalið undir 12, men fyri at forskúlatilboðið kann lata seg gera, má tað vera eitt støðugt tilboð við 20 tímum um vikuna og einum námsfrøðingi og einum lærara hóast næmingatalið onkuntíð fer niðurum 12. Normeringin í Tórshavnar kommunu er eitt starvsfólk til 9 børn, starvsfólkini eru lærarar og námsfrøðingar.

**Hølisviðurskifti**
Høli eru ikki tøk í skúlanum til endamálið, men í námsfrøðiliga tænastudeplinum ber til at innrætta tvey rúm við at seta skilavegg upp, seta úthurðar í beinleiðis út í skúlagarðin og hurð millum bæði rúmini. Hetta økið kann so antin verða brúkt til forskúla og serøkið ella til annað virksemi, so kann forskúlin verða aðrastaðni í skúlanum, best um hann er saman við ella tætt við grunddeildina.

**Fígging**
Kostnaðarmeting at innrætta hølini í námsfrøðiliga tænastudeplinum og til innbúgv til forskúla er 500 tkr. Játtan er ikki sett av til hetta.

Í fíggjarætlanini 2023 er játtan sett av til rakstur av forskúla frá august 2023 á 4115 Kollafjarðar skúli.

**Frítíðarskúlin**
Børnini í Kollafjarðar skúla ganga í Frítíðarskúlan við Botnánna, og har er ikki so nógv pláss, tí  verður væntandi neyðugt at finna hølisloysn, so pláss verður fyri forskúlabørnum í frítíðarskúlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022
Kunngerð nr. 108 frá 8. August 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at iðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
ongar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta umsóknini og at senda Barna- og útbúgvingarmálaráðnum umsókn um loyvi at seta á stovn forskúla í Kollafjarðar skúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

# 44/23 Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 26/22 | 22/00894-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 29/22 | 22/00894-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 37/22 | 22/00894-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 248/22 | 22/00894-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 25.10.2022 | 70/22 | 22/00894-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 273/22 | 22/00894-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 235/22 | 22/00894-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 9/23 | 22/00894-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 32/23 | 22/00894-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 23.02.2023 | 67/23 | 22/00894-1 |
| 11 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 44/23 | 22/00894-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 22.02.2023 | 20/23 | 22/00894-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt hjá býráðnum 24. feb. 2022 í máli 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu um at stovnseta hádeild (8.fl og 9.fl) í Sankta Frans skúla – at byrja frá skúlaárinum 2023/24.

**Lýsing av málinum**
Samtyktin inniber at pr. skúlaársbyrjan 2023/24 skal skúlin rúma tveimum 8. fl. og frá 2024/24 tveimum 8. fl. og tveimum 9.fl. Í sambandi við eina hádeild er eisini tørvur á ymiskum hjáhølum eitt nú til bólkaarbeiði, goymsluhøli, betri fakstovuhentleikar, tænastuhentleikar v.m. Umframt – alt eftir staðseting v.m. – hentleikar til starvsfólk. Um talan er um eina varandi hølisloysn og alt eftir, hvussu og hvar bygningurin verður bygdur kann roknast við einum fermetratalið á minst 800 m2 (við fyrivarni!).

Í kommunuætlanin frá 2020 stendur viðv. Sankta Frans skúla:
*"Innan nøkur ár verður væntandi farið undir høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Tørvur er á betri parkeringsviðurskiftum."*
og
*"Fleiri dagføringar og neyðugar umvælingar standa eisini fyri framman. Fremstir í røðini eru Hoyvíkar skúli og Sankta Frans skúli."*

Sostatt er greitt, at tað er skilagott at hava framtíðar høvuðsumvælingar í huga nú farið verður undir at útvega hølisloysn til hádeildina. Hetta serliga tí at verandi høvuðsbygningur er frá 1931 og 1956 og tískil í nógvum førum ikki uppfyllir nútíðar krøv til bygningar sbrt. BK17. Forskúla/frítíðarskúlabygningurin er frá 2013. Hóast høgan aldur á høvuðsbygninginum so er hann í lutfalsliga góðum standi.

Gerast skal eisini vart við, at ætlan um dagføring v.m. av Hoyvíkar skúla er útsett fleiri ferð og raðfest fremri enn dagføring av høvuðsbygninginum hjá Sankta Frans skúla.

**Øki**
Skúlabygningarnir liggja í einum D3 øki. Har er galdandi at byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5. Skúlabygningarnir liggja á einum øki, ið er 6.985 m2 og byggistigið er á umleið 0,30 og nýtslustigið á umleið 0,59. Sostatt er greitt at byggisamtyktin ikki sum útgangsstøði loyvir meiri bygging á økinum. Harumframt er øki beint upp at D1 øki, ið er skógfriðað. Sostatt er sum útgangsstøði neyðugt at útvega annað lendi til tørvin. Í økinum er í høvuðsheitum tveir møguleikar – annar er at byggja út ella um á verandi øki og í øðrum lagi at byggja á økinum dagstovnurin Stella Maris heldur til. Hartil kemur spurningurin um møguliga eyka parkeringpláss. Hesir møguleikarnir kunnu innibera broytingum í byggisamtykt.

**Tíðarperspektiv**
Sum heild má tað ganga skjótt og væl um tað skal eydnast at hava eina varandi hølisloysn klára til skúlaársbyrjan 2022/23 og eigur tí eisini at vera umhugsað onkur fyribils loysn, ið verður brúkt inntil tann varandi loysnin fyriliggur. Helst eru onkrir møguleikar tí viðv. bæði viðv. fyribilshølum og evt. í nærøkinum.

Umsitingin kann – alt eftir samtykt í hesum máli – fara undir her í mars 2022 at gera eina kravseting til ein komandi og varandi hølisloysn og koma við boðum uppá staðsetingar.  Á fundinum kemur umsitingin at geva metingar viðv. kostnaði av fyribils hølisloysn og varandi hølisloysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um farast skal:
a). fyrst undir fyrireikingar av eini varandi hølisloysn ella
b). eini fyribilsloysn, meðan ein verandi verður fyrireikað.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við punkt a) í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina seinast er umsitingin farin undir fyrireikingar av eini kravfesting og virksemislýsing til eina komandi hølisloysn og hevur viðgjørt møguligar staðsetingar.

Eitt verkætlanartoymið er skipað við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting, og er verkætlanarleiðari settur. Tveir fundir hava verið við skúlaleiðslu og umboð fyri starvsfólk í skúlanum, og í vikuni verður fundur við frítíðarskúlan.

**Staðsetingar**
Umsitingin metir, at mest upplagda staðseting til eina útbygging av Sankta Frans skúla er á stykkinum har dagstovnurin Stella Maris liggur – t.e. matr. 807b. Fremsti fyrimunurin er at har ber til at byggja at kalla ótarnað hvat viðv. verandi skúla- og frítíðarskúlavirksemi. Umframt at bygging har sum útgangsstøði ikki viðførir tørv á broyting ella fráviki frá byggisamtyktini. Um stykkið hjá TK á matr. 807g verður tikið við ber til at byggja eina bygning á 700-900 m2. í t.d 2 hæddum. Matr. 807g liggur tó, í mun til matr. 807b, í sethúsaøkið sbrt. almennu byggisamtyktini. Fyribils metingin er at hetta fermetratalið er nøktandi uttan 807g.

Alternativt skal byggjast í verandi øki har skúlin er. Har kunnu ymsar loysnir hugsast t.d. byggja omaná verandi forskúla- og frítíðarskúlabygningi ella taka burtur verandi fimleikahøll og byggja nýggja fimleikahøll/felagshøli og 2 hæddir omaná. Báðar hesar loysnirnar krevja broytta byggisamtykt vegna, at bæði byggi- og nýtslustigini eru rokkin, umframt tilgongd í mun til skógfriðingina við Viðarlundina, ið er næsti granni. Eisini eru arkitektonisk/estetisk atlit til verandi serstaka og søguliga skúlabygningin, og serstøku Mariukirkjuna og Kerit vestanfyri.

Tískil vil tað innibera eina longri tilgongd uppá umleið 6 mánaðir, og tí ikki vist um tað letur seg gera. Vansin í hesum báðum førum er, at talan er um bygging inn í einum virknum skúlaøki, og kemur tað at viðføra týðandi ampa og helst, at forskúla- og frítíðarskúlavirksemi má flytast úr hølunum, meðan tað mesta av byggingini fer fram.

Eitt heilt annað alternativ, ið eisini er umrøtt, er at keypa Sankta Jósefs barnagarðin og lata nýggjan dagstovn byggja á økinum hjá Stella Maris og so innrætta Sankta Jósefs barnagarð til skúla.

Hetta krevur í fyrsta lagi samráðingar við katólsku kirkjuna í Belgia, ið varðar av stovninum, og vil so aftur krevja aðra bygging, áðrenn farast kann undir tillaging av bygninginum til skúla. Tískil má roknast við at tilgongdin tekur longri tíð.

Í sambandi við útbygging má roknast við kravi frá byggivaldinum sbrt. BK17 um fleiri parkeringspláss. Skúlin fær við eini hádeild – umleið 12 nýggj starvsfólk (lærarar og onnur innan tænastuøkið). TK er í samskifti við KFUK um møguleikan fyri at gera 22 parkeringspláss niðast á trøðni hjá KFUK. Serskilt mál verður lagt fyri nevnd um tað.

**Slag av virksemi**
Umrøtt hevur verið hvørt tað hevði verið ein fyrimunur heldur at bygt nýggj høli til grunddeildina (forskúla – 3 fl.) ella partar av henni og møguliga frítíðarskúlan ístaðin fyri at byggja nýtt til hádeildina (8-9 fl. og evt. 7 fl.). Mett verður at tað avgjørt er nakað, ið skal greinast nærri komandi tíðina. Mett verður at fyrimunurin við at byggja nýtt til grunddeildina hinmegin Varðagøtu er, at grunddeildin ikki í ein stóran mun hevur tørv á fakhølum v.m. í høvuðsbygninginum eins og hádeildin hevur. Tá ein endalig niðurstøða fyriliggur um staðseting vil umsitingin koma við endaligum tilmæli um tann spurningin. Um nýggju hølini verða bygd til grunddeildina, skal smábarnaskúlin dagførast til 8-9 fl. ella annað, sum í dag er í høvuðsbygninginum. 7 fl. er vanliga partur av hádeildini, og tí er tað fyrimunur, men ikki treyt, at 7 fl. eisini hevur flokshøli har hádeildin er.

**Innihald/funktiónir v.m.**
Komið er væl áleiðis við at greina neyðugar funktiónir til ymisk hølir og virksemi í eini hádeild og ymiskar avleiddar tillagingar, ið eru neyðugar í verandi bygningum sambandi við fakhøli (t.d. alis- og evnafrøði), felagshøli, hjáhøli, útiøki v.m. Hetta alt í sambandi við nú- og framtíðartørv innan skúlavirksemi.

Um tað hinvegin verður avgjørt at byggja til nýggja grunddeild er lutfalsliga skjótt at broyta uppá tilgongdina, men vil tað framvegis innibera ymiskar tillagingar í sambandi við fakhøli v.m., umframt umstøður til fleiri starvsfólk. Harumframt er innleiðandi farið undir greiningar í mun til hentleikar í skúlagarðinum.

**Ávegis kostnaðarmeting**
Á fundinum verður greitt frá ávegis kostnaðarmeting fyri nýbygging.

Havast skal eisini í huga, at Sankta Frans skúli, óansæð omanfyristandandi, yvir komandi árini hevur tørv á játtanum til vanligt viðlíkahald og dagføringar, umframt at skúlin eigur at fáa atkomuviðurskiftini, eisini fyri rørslutarnað, upp til nútíðarkrøvini. Hetta skal neyturviligvís ikki verða partur av verkætlanin við hølum til hádeild, men at tann byggiskráin sum verður gjørd til ítøkiligu verkætlanina tekur hædd fyri omanfyristandandi.

**Tíðarætlan**
Sbrt. býarsamtyktini frá 24. februar 2022 ynskir býráðið, at "... Sankta Frans skúli verður tvísporaður skúli frá forskúla til 9. flokk frá skúla árinum 2023/2024, ...".

Verkætlanartoymið metir, at tað óansæð val av omanfyri lýstu møguleikum, verður sera torført at fáa úvega eitt liðugt byggjarí/hølisloysn til skúlabyrjan eftir summarsteðgin 2023. Skal málið røkkast eigur tað í tilgongdini beinanvegin at kannast at útvega fyribilshølir, í eitt fyribilstíðarskeið, sum verður fram til minst jólini 2023 ella allarhelst summarfrítíðina 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til:

a). at samtykkja at útbygging av Sankta Frans skúla skal vera á matr. 807b.
b). at umrøða hvørt grunddeild ella hádeild skal byggjast á matr. 807b, við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli um tað til komandi fund.

Málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina.
**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) um at útbyggingin av Sankta Frans skúla verður á matr. nr. 807b treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tilmælið b) varð umrøtt.

**Ískoyti:**
UMMR hevur hin 8. apríl 2022 góðkent, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9 frá skúlaárinum 2023/24. Somuleiðis er góðkent, at Skúlin á Fløtum verður trýsporaður frá forskúla til og við 6. flokk og fýra sporaður frá 7. til 9. Flokk frá skúlaárinum 2023/24.

Trivnaðarnevndin samtykti 7. apríl 2022 at staðseta nýggju skúlaloysina til Sankta Frans á matr.nr. 807b, sum í dag er Stella Maris Vøggustova. Í málslýsingini framgongur, at krøv verða sett til at útvega fleiri parkeringspláss í tí sambandi.

Samskifti hevur verið við KFUK um nýtt parkeringspláss á teirra øki framvið Varðagøtu. Samskifti hevur eisini fevnt um ynski frá KFUK um betran av almennu atgongdini til KFUK-húsið og brúkinum av KFUK-bønum.

KFUK ynskir at varðveita og menna KFUK-bøin sum virksemisøki hjá KFUK og samstundis gera hann lutvíst atkomuligan fyri gjøgnumgongd hjá almenninginum, umframt gera ovara partin vælegnaðan til kavaskreiðing. Eisini ynskir KFUK at fáa skipaði og nøktandi parkeringsviðurskifti til egið virksemi og í økinum í sambandi við kommunala stovns- og skúlavirksemi, umframt almenna parkering.

Út frá tørvinum hjá bæði KFUK og kommununi er gjørt uppskot til avtalu um atgongd og brúksrætt til partar av økinum, meðan kommunan átekur sær uppgávuna at fremja og rinda fyri ávís verkløg, sí uppskot til avtalu. Endalig tilsøgn fyriliggur ikki frá KFUK.

KFUK hevur áhuga í at gera avtalu við kommunuan nú í sambandi við, at felagsskapurin fyllir 100 ár í juni. Avtalan hevur fíggjarligan kostnað við sær fyri kommununa, eingin ítøkilig kostnaðarmeting fyriliggur. Játtan er ikki tøk til útinnan av avtaluni, men eigur at verða tikið sum liður í ætlaða skúlabyggingini.

**Skjal**

- Uppskot til brúks- og samstarvavtalu millum KFUK og Tórshavnar kommunu

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at gera brúks- og samstarvsavtalu við KFUK og at heimilia umsitingini at fáa til vega kostnaðarmeting sum grundarlag fyri seinni viðgerð av játtan og verkætlan.
**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykkir at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku við einum fíggjarkarmi á í mesta lagi 30 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum tí málið ikki er nóg væl lýst.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**

Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**
Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, "...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...". Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
b) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
c) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
d) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
e) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við pkt. a) og e), og at bjóða út í heildararbeiðstøku byggingina av skúlabygningi uml. 1.100 m2 umframt útiøki v.m., innanfyri ein karm uppá kr. 30 mió, harímillum at gera byggiskrá við kravspesifikatión, og at taka niður og burturbeina verandi bygning á matr.nr. 807b, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggja skúlabygning v.m. til hádeild varð bjóðað út til tveir arbeiðstakarar – Articon og HVT. Eitt tilboð kom inn, tað er frá HVT, og sum lýsir uppskot teirra til bygning, innrætting og funktiónir, byggitilfar v.m.

Í løtuni eru samráðingar um sáttmála við HVT, og ætlanin er, at býráðið kann samtykkja sáttmála og játta fíggingina til byggingina á næsta fundi.

Á fundinum verður kunnað um innkomna uppskotið til skúlabygning.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka kunningina til eftirtektar.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Við støði í uppskotinum og tilboðnum frá HVT Sp/f til nýggja hádeild til Sankta Frans skúla er samráðst um heildararbeiðstakarasáttmála. Sáttmálaupphæddin er kr. 28,125 mió u/mvg.

Skúlin hevði bert eina viðmerking til bygningsuppskotið, og tað var at fáa gjørt eitt reingerðarrúm eitt sindur størri. Hædd verður tikið fyri tí í prosjekteringini. Í samráðingunum er lendisarbeiðið eisini útgreinað.

Kloakkarbeiðið og parkeringsøkið fer í stóran mun at ganga fyri seg uttan fyri arbeiðstøkumarkið hjá HVT. Tað sæst aftur í kostnaðarmetingini sum byggiharraveiting, tvs. kostnaður aftrat sáttmálaupphæddini. Verandi rottangi verður tømdur og burturbeindur. Verandi høvuðskloakk, ið gongur í gjøgnum matr 807b, skal umleggjast, áðrenn jørð og kloakkarbeiði byrjar. Nýggja kloakleiðingin frá bygninginum verður bundin í nýtt reinsiverk. Parkeringsplássi verður avhendað til byggiharran planerað við 0-75 við regnavatnsleiðingum og vegristum.

Haraftrat eru vanligar byggiharraútreiðslur í sambandi við bygging, t.e. óvæntað, prís- og lønarvøkstur, byggiharraleiðsla og prosjektumsiting, listprýði 1,5%, lásaskipan, høvuðsreingerð, innbúgv, útbúnaður, útgerð til úiøkið og mvg.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri alt omanfyri nevnda er kr. 40.808.000, sí hjáløgdu kostnaðarmeting.

Sambært tíðarætlanini verður byggiplássið fyrireikað frá 6. mars 2023, og byrjað verður at taka niður Stella Maris-bygningin frá 22. mars 2023. Øll byggingin av hádeildini skal verða liðug og handað byggiharranum í seinasta lagi 8. juli 2024.

Í løgujátattanini til byggingina av hádeildini fyri 2023 eru játtaðar kr. 20 mió. Skal verkætlanin, sum hon nú fyriliggur eftir samráðingarnar, og har øll neyðug viðurskifti eru tikin við, skulu játtast kr. 20,8 mió aftrat. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024.

Skjøl:
-Heildararbeiðstakarasáttmáli

-Dagførd tilboðsmappa
-Kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til heildararbeiðsstøðusáttmála við HVT Sp/f uppá kr. 28,125 mió u/mvg, og at samlaða verkætlanin heldur seg innanfyri ein kostnaðarkarm uppá kr. 40.808.000 v/mvg.

Mælt verður í hesum sambandi til at játta kr. 19.425.000 av kontu 4176 Nýbygging skúlar, løgukarmi LK41018 til løgukontu L41018 Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla, og at írestandi játtan kr. 20.808.000 verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 22. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2023:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekksteina tekur undir við Trivnaðarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 38 mió. til verkætlanina og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at tikið verður undir við uppruna tilmælinum um at játta kr 40 mió umframt at játta kr. 500.000 til sólorku í 2024, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg. Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 45/23 Dagstovnurin Hans Andrias Djurhuus - úbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 22/23 | 23/00259-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 10/23 | 23/00259-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.02.2023 | 46/23 | 23/00259-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 42/23 | 23/00259-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.02.2023 | 66/23 | 23/00259-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 45/23 | 23/00259-1 |

**Upprunin til málið**
Í Tórshavnar kommunu er tørvur á fleiri barnagarðs- og vøggustovuplássum. Innleiðandi kanning vísir, at ein skynsamur vøkstur av virkseminum á Dagstovninum Hans Andrias Djurhuus er, at pláss verður gjørt til 18 barnagarðspláss og 12 vøggustovupláss fleiri á stovninum.

**Lýsing av málinum**
Uppskot er gjørt, at byggja afturat verandi Dagstovni Hans Andrias Djurhuus, hereftir kalla DHAD. Byggjast skal, so pláss verður fyri 30 børnum afturat í einari barnagarðsstovu og einari vøggustovu. Harumframt skal byggingin taka hædd fyri at neyðug hjárúm eisini verða fingin til vega, og at virkisføri á stovninum kann økjast. Havast skal í huga, at økt barnatal eisini hevur økt starvsfólkatal við sær

## Verandi stovnur
Verandi stovnur er 763 m². Á stovninum eru 2 barnagarðsstovur, 2 vøggustova og ein serstova. Harumframt eru vanligu hjárúmini, so sum vesi, skiftirúm, skrivstova osv.
Á stovninum er pláss fyri 60 børnum, umframt serstovuni. Parkeringsøkið, við 14 parkeringsbásum og einum parkeringsbási til rørslutarna, er tætt við stovnin.
Serstovan verður verandi á stovninum, har hon frammanundan er staðsett.

## Uppskot til útbygging av Dagstovninum Hans Andrias Djurhuus
Í nýggja uppskotinum til útbygging av DHAD er stremba eftir, at virkisføri á stovninum verður hildið, umframt at tali av barnagarðs- og vøggustovuplássum økist. Harafturat leggur uppskotið upp til, at parkeringsviðurskiftini verða í trá við galdandi krøv. Afturat verandi barngarðs- og vøggustovum og serstovu kemur ein barnagarðsstova og ein vøggustova.

**Barnagarðsstovur**
Verandi barnagarðstovur fevna í dag um 213 m² á báðum hæddum. Sambært fyriliggjandi uppskotið koma barnagarðsstovurnar at fevna um 330 m². Allar barnagarðstovurnar verða samlaðar í landsynnings-endanum av bygninginum.

**Vøggustovur**
Verandi vøggustova fevnir í dag um 232 m². Sambært fyriliggjandi uppskotið, koma vøggustovurnar at fevna um 328 m², umframt hjárúm, so sum vognrúm vesi/skiftingarrúm v.m. Vøggustovurnar koma sambært fyriliggjandi uppskotið at liggja samlaðar í úynyrðingsendanum av stovninum.

**Køkur**
Fyri at betra um trygdina og tað yvirlit starvsfólk hava í al-rúminum, har børn tíðum uppihalda seg, skal veggurin rundan um køkin lækkast, so starvsfólk kunnu síggja børnini í al-rúminum, meðan starvsfólk erui køkinum. Køkurin skal somuleiðis skiftast og dagførast.

**Sansarúm**

Sansarúm, á knappar 16 $m^2$, skal gerast í verandi bygningi.

**Onnur rúm**

Onnur rúm, ið verða í verandi og nýggja partinum á stovninum eru al-rúm, uppihaldsrúm, goymslurúm, vaskirúm, starvsfólkarúm, starvsfólkavesi, samtalurúm og skrivstova til leiðaran á stovninum. Harumframt verða vesi og umklæðingarrúm gjørd.

**Uttanduraøki og spæliøki**

Í fyriliggjandi uppskotið eru ikki stórvegis dagføringar gjørdar á økið rundan um stovnin. Í samband við eitt møguligt útboð, skal Heildararbeiðstakarin koma við einum uppskoti til hvussu øki uttandura og spæliøki kann skipast. Tó skal uppskoti, í minsta lagi vísa á trý nýggj vognskýli til 36 vognar.

**Parkeringsviðurskiftir**

Parkeringsøkið skal vaksast við 7 parkeringsbásum, so endaliga talið verður 24 parkeringsbásar.

## Samanumtøka av fyriliggjandi uppskoti, Sí fylgiskjal 23/00259-2; DHAD – tekningar – dagfest 12.01.2023

Matrikkul 918b er 6.851m2
Bygningurin er 763 fermetrar
Bygt verður aftrat 357 fermetrar
Samanlagt verður bygningurin 1.120 fermetrar, 1.120 fermetrar krevur 23 parkeringspláss

**Verandi støðu**

2 vøggustovur, 2 barnagarðar umframt serstova - Pláss er fyri
60 børnum umframt serstovuni.

**Uppskot**

Uppskot er at vaksa bygningin við 1 vøggustovu og 1 barnagarði so pláss verður fyri 90 børnum umframt serstovuni.

**Víðari gongdin**

Lagt er upp til at fyriliggjandi uppskot verður bjóða út í heildararbeiðstøku. Kappast verður fyrst og fremst um kostnaðin, tó verða eisini onnur metingarstøði, so sum góðska og tíðarætlan, við í dømingini.

Uppskotið verður sent í útboð, beinanvegin ið Býráðið samtykkir málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Dagstovnurin liggur í umráðisparti C3, ið er loyvir miðstaðarendamálum, skúlum, almennum stovnum og íbúðum.

Byggistig má ikki fara uppum 0,4
Nýtslustig má ikki fara uppum 0,8.

Í fyriliggjandi uppskotið verða byggi- og nýtslustig 0,16
Útbyggingin skal útinnast sambært BK17 og galdandi byggisamtyktum hjá Tórshavnar Kommunu. Gev gætur, at serstøk byggisamstykt er galdandi í økinum.

Bygningurin skal brunadeilast.

**Upplýsingar frá umsitingini**

-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Saman við rakstrarharranum á Bygningsdeildini, hava eisini eindarleiðarin og stovnsleiðarin verði við í tilgongdini higartil, at lýsa tørvin í mun til útbygging og tillaging til verandi stovn. Tað hevur týdning at brúkarin og aðrir áhugabólkar verða drigin við í allari tilgongdini.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Byggikostnaðurin er enn ikki neyvt kannaður, og roknast kann við stórum sveiggjum í metingum, inntil tilboðini eru komin inn.

Sjálv útboðstilgongdin verður mett at kostað umleið kr. 0,5 mió. Tað er fyrireikingararbeiði til útboð og samsýning til teir bjóðandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Barna- og ungdómsdeildin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til, at nevndin gevur umsitingini heimild at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti og at bjóða arbeiðð út í heildararbeiðstøku. Mælt verður til at játta kr. 0,5 mió av kontu 3175 LK31015 Tillagingar á dagstovanøkinum og stovna nýggja løgukontu til endamálið.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at bjóða út sum undirhondsboð verkætlan um at gera 1 barnagarðsstovu og 1 vøggustovu, sum skulu takast í brúk 1. september 2023 at leggja aftur fyri nevndina til støðutakan.

Birgir Nielsen tók ikki lut í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at heimila umsitingini at útvega uppskot til heildarloysn at leggja fyri nevnd aftur.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Tilboð er komið uppá, at byggja teir 357 fermetrarnar, sum eru lýstir í fylgiskjali 23/00259-2.

Tilboðið er frá ARTICON. Sí fylgiskjal 23/00259-x í tilboðnum er; 1) “Veitingaryvirlit”, 2) “Høvuðstíðarætlan”, 3) “Arbeiðsgongdin” og 4) “Tilboðsskjal”

Afturat tí, sum er við í veitingaryvirlitinum, koma aðrar útreiðslur sum td. íbindingargjøld, trygging og MVG.

Einki uppskot er til skipan av uttanumøki og ger av spæliplássi. Vognaskýlir í túninum, og innbúgv er heldur ikki við. Sostatt er tørvslýsingin, sum var partur av málslýsingini til fundin hin 17.01.2023, einans partsvís uppfylt. Sp/f Fjalir, sum framleiddi tekningarnar og tørvslýsingina, eru ikki partur av tilboðnum frá Articon.

Av tí at tekningarnar frá Sp/f Fjalir, liggja við í tilboðnum, er umráðandi at námgreina hvørjar partar av prosjektinum, Articon tekur ábyrgdina av. Víst verður til ásetingar í ABT § 1, stk 1, 2 og 3.
Í skjalinum “Arbeiðsgongdin” er viðmerkt í klombrum at (AC-BH) taka sær av gravi- og byggiloyvi. Tað er umráðandi at nágreina, at tað er Articon, sum syrgir fyri neyðugum myndugleikaloyvum. Víst verður til ásetingar í ABT § 13.

Av tí at veitingaryvirlitið ikki er útgreinað, ber ikki til, neyvt at meta um tilboðið. Tó verður í útgangsstøðinum mett, at prísurin er í hægra lagi, sammett við erfaringstøl fyri líknandi bygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til, at nevndin gevur umsitingini heimild til at samráðast við Articon um tilboðið, og samstundis at biðja um annað frammíhjáboð, fyri at vita um kostnaðurin kann fáast nakað niður. Samanbering av tilboðum, og tilmæli um ger av sáttmála, verður lagt fyri nevndina til støðutakan.

**Mentamálanevndin 13. februar 2023:** Ein meiriluti Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkja at heimila umsitingini at taka av tilboðnum 8. februar 2023 og at gera heildararbeiðstøkusáttmála við Articon, og at hetta verður fíggjað av løgukontu L3175 L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen og Súsanna Olsen, taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Articon hevur tillagað verkætlanina, har vognskúrar eru komnir aftrat eins og p-pláss tillagað. Útbyggingin fevnir um 357 fermetrar. Umsitingin hevur ikki fingið endaligu bygningstekningarnar.

Gjørt er uppskot til heildararbeiðstakarasáttmála, dagf. 22. februar 2023. Dagførd tilboðsupphædd uppá handverkaraútreiðslur (HVÚ) er kr. 14.928.862 u/mvg. Samlað kostnaðarmeting við byggiharraútreiðslum og við mvg er kr. 18.614.145.

Sambært tíðarætlanini verður bygningurin handaður 15. september 2023. Betongfundamentir eru ætlandi liðug 26. apríl, tá elementuppsetanin byrjar.

Arbeiðstakarin hevur í samráðingini um sáttmála viljað havt loft á møguligum dagbótum, um so er, at arbeiðið verður seinkað. Umsitingin tekur fyrivarni fyri hesum.

Umsitingin vísir annars til tilmælið til mentamálanevndina 13. februar 2023. Á sama fundi hevur mentamálanevndin víst á fígging til byggingina.

**Skjøl:**
-Heildararbeiðstakarasáttmáli
-Tilboð
-Fylgiskjøl, tekningar og veitingaryvirlit
-Tíðarætlan
-Nýtt fylgiskjal við stødd byggistig og funktión
-Kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til málið.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2023:** Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at gera sáttmála við Articon áljóðandi kr. 14.928.862 kr. uttan mvg og játtað tilsamans kr. 17.000.000 til verkætlanina av løgukonto L3175 L31011.

Annika Olsen og Elsa Berg mæla býráðnum til at halda fast við tilmælið til Mentamálanevndina 13. februar 2023.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Fyrst varð atkvøtt fyri broytingaruppskotinum frá Anniku Olsen, ið mælir til at bjóða arbeiðið út, ið fall við 8 atkvøðum ímóti og 5 atkvøðum fyri.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutauppskotið hjá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Karl Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam og Annika Olsen.

# 46/23 Umvæling og útbygging av kapellinum á matr. nr. 995, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 18/23 | 22/07254-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 48/23 | 22/07254-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 46/23 | 22/07254-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

Útbygging:
Tørvur er á at víðka verandi kapell í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, so fleiri sitipláss verða tøk til jarðarferðir. Í hesum sambandi eru hugskotsskitsur og modell fingin til vega. Hugskotið snýr seg um at byggja uppí miðskeiðis á eystursíðuni av bygninginum. Flatmyndin fær tá eitt "krossskap" við altarinum í miðjuni. Pláss verður fyri uml. 250 fólkum, móti uml. 150 í dag.

Verandi hugskot má greinast og búnast meiri við atliti at m.a. tilfari og kostnaði, og í hesum sambandi er ætlanin at menna eitt skipanaruppskot, ið aftur verður lagt fyri nevnd, og sum skal liggja til grund fyri einari lidnari ætlan.

Umvæling:
Umframt ætlanina at byggja verandi kapell út er eisini tørvur á at umvæla verandi kapellbygning. Stóra umvælingin av kapellinum í 2005/2006 eydnaðist í stóran mun væl, men nakrir sjónligir trupulleikar vísa seg at koma aftur. Eitt nú síggjast rivur í útveggunum, og virksemið í kapellinum er eisini darvað av, at puss og máling innandura áhaldandi skallar av við innveggir.

Viðvíkjandi umvæling skulu ymisk átøk gerast. Umframt at umvæla innveggir verður mett, at tíðin eisini er komin at skifta verandi vindeygu út við nýggj vindeygu í sama sniði, men gjørd nakað øðrvísi soleiðis, at vindeyguni bjálva betri. Eisini at tett verður væl um vindeygu í sambandi við útskifting. Verandi vindeygu vórðu ikki útskift í 2005/2006.

Mett verður, at frægasta tíðin at gera umvælingar av slíkum slag er um várið/summarið.

Annað, ið kann bøta um standin á innveggjum, er, at reinsa, tetta og bjálva sokklar og kjallaraveggin og harvið fora vætu at treingja upp í veggirnar. Umsitingin hevur áður arbeitt við at fyrireika at bøta um hesar trupulleikar og í 2021 varð gjørt prosjekt og útbjóðingartilfar, sum snúði seg um at bjálva undir lendi og gera kloakkarbeiði við umfangsdreni at binda í brunnar.

Arbeiðið at bjálva og drenað um verandi bygning er umfatandi og kann fyrireikast og bjóðast út, samstundis sum ein møgulig útbygginging verður framd.

At bøta um rivur og innveggir og skifta vindeygu kann byrja áðrenn.

Væntast kann, at alt arbeiðið við umvæling og útbygging kann strekkja seg yvir tvey fíggjarár 2023-2024.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**

Kapellið varð tikið í nýtslu í 1951. Arkitektur var H.C W. Tórgarð. Kapellið bleiv víðkað fyrst í 1970´unum. Bygningurin hevur høgt varðveitingarvirði.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/07254-2_03_Kapellið_Uppskot eitt kross skap
22/07254-2_04_Kapellið_Modelmyndir

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, deildarleiðarin á bygningsdeildini og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til:

- at samtykkja at heimila umsitingini at bjóða út arbeiðið at skifta út verandi vindeygu og gera sáttmála um hetta.
- at fara undir fyrireikingararbeiði og útinnan av betong- og pussumvælingum á verandi veggir.
- at heimila umsitingini at útvega eitt skipanaruppskot og kostnaðarmeting til útbygging av verandi bygningi og venda aftur í nevnd við hesum, og

at flyta kr. 5 mió. til endamálið av LK2023 á nýggja løgukonto, og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023**: Samtykt at taka undir við Tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

## 47/23 Tannlæknastovan : Umbøn ella tilmæli um setan av arbeiðsbólki til útgreinan av framtíðarkarmunum fyri barnatannrøktina (2007-2871)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 05.10.2015 | 32/15 | 15/03750-9 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 14.02.2019 | 5/19 | 15/03750-9 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 15.04.2021 | 29/21 | 15/03750-9 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 77/21 | 15/03750-9 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 305/21 | 15/03750-9 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 294/21 | 15/03750-9 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 15.11.2022 | 71/22 | 15/03750-9 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 19/23 | 15/03750-9 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 16/23 | 15/03750-9 |
| 10 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 43/23 | 15/03750-9 |
| 11 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 47/23 | 15/03750-9 |

**Málslýsing:**
Gott 5.000 børn millum 0-16 ár í Tórshavnar kommnunu, skulu sambært løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt, hava tilboð um fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt.

Kommunan skal tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt.

Við heimild í løgtingslógini hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum við kunngerð nr. 53 frá 24. apríl 1998 m.a. ásett, at tann kommunala barna- og ungdómstannrøktin skal umfata:

1. Vanlig fyribyrgjandi tiltøk, herundir upplýsningsvirksemi v.m.
2. Regluligar kanningar viðvíkjandi menning og heilsustøðuni í tann-, munn- og kjálkaøkinum.
3. Einstøk fyribyrgjandi tiltøk, herundir upplýsing av tí einkulta og foreldrum, og leiðbeining í tannrøkt fyri tann einkulta.
4. Viðgerð av sjúkum í tann-, munn-, og kjálkaøkinum og tannjavning í samsvar við danskar reglur fyri ortodontivisitatión og ortodontiindikatión.

**Karmarnir í dag:**
Kommunala barna- og ungdómstannrøktin heldur til í Tórsgøtu 23, har karmarnir eru tambaðir so nógv, sum yvirhøvur til ber. Umframt er í skúlanum í Kollafirði ein tannrøktareind. Ætlanin er eisini at gera eina tannlæknastovu á nýggja skúlanum, sum bygdur verður í Hoyvíkshaganum.

Tórshavnar kommuna hevur sáttmála við Bergtóru Hanusardóttir, sertannlækna, har børn við tannrættingartørvi fáa viðgerð. Hesin sáttmáli er galdandi fram til skúlaársenda í 2008. Um sáttmálin tá verður longdur, verður tað væntandi bert við einum ári í senn. Tí er neyðugt nú at umhugsa, hvussu kommunan framhaldandi kann tryggja, at børn við tannrættingartørvi fáa neyðuga viðgerð.

Sigrid Arge, tannlæknastjóri mælir til, at settur verður arbeiðsbólkur at gera tilmæli um, hvussu kommunan eisini í framtíðini kann tryggja øllum børnum og ungum ta lógarásettu fyribyrgjandi og viðgerðandi

tannrøktina. Her verður serliga hugsað um tær trongu hølisumstøðurnar og óvissuna í sambandi við viðgerðina av børnum við tannrættingartørvi.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at heimila trivnaðarstjóranum at seta arbeiðsbólk at gera tilmæli um, hvussu kommunan eisini í framtíðina kann tryggja øllum børnum og ungum ta lógarásettu fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøktini. Bólkurin skal eisini útgreina hølistørvin serliga við atliti til viðgerðina av børnum við tannrættingartørvi, og koma við tilmæli um, hvussu kommunan í framtíðini kann nøkta tørvin.

**Sosiala nevnd 23. oktober 2007:** Samtykt at taka undir tilmælinum.

Trivnaðarstjórin setti í januar 2008 arbeiðsbólk at gera tilmæli um, hvussu kommunan eisini í framtíðina kann tryggja øllum børnum og ungum ta fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøktina, sum lógin ásetir. Arbeiðsbólkurin skuldi eisini útgreina hølistørvin og koma við tilmæli um, hvussu kommunla tannrøktin karmaliga eigur at verða skipað í framtíðini.

Arbeiðsbólkurin, Sigrid Arge, leiðari á tannlæknastovuni, Unn Jacobsen, barnatannlækni, Bergtóra Hanussardóttir, sertannlækni og Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðari hava handað trivnaðarstjóranum álit og tilmæli.

**Sosiala nevnd 9. juni 2009:** Vitjað varð á Tannlæknastovuni, har Sigrid Arge, vegna arbeiðsbólkin, legði fram álitið fyri nevndina.

Samtykt at viðgera málið aftur á einum komandi fundi.

**Sosiala nevnd 1. desember 2009:** Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, sum mælir til at barnatannrøktin framyvir verður skipað sum ein sentralklinikk, har ortodontiin er partur av hesum bygnaði í hølum, sum eru gjørd og hóska til endamálið.

Samtykt at heita á byggi- og býarskipanardeildina um at staðseta øki til endamálið.

**Nýtt:** Áheitan um at fáa staðsett øki varð 17. desember 2009 send bygggi- og býarskipanardeildini.

Vísandi til, at hølistørvurin er mettur at vera umleið 1.000 fermetrar, verður víst til Karlamagnusarbreyt sum staðseting.

**Sosiala nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin kundi hugsað sær fleiri valmøguleikar at taka støðu til. Um økið við Karlamagnussarbreyt er einasti valmøguleiki, tekur sosiala nevnd undir við hesum og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari viðgerð.

Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Trivnaðarnevndin 5. oktober 2015:** Vísandi til, at barnatannrøktin nú eisini hevur lógarskyldu at veita ókeypis tannrøkt til øll undir 18 ár, og at miðnámsskúladepil og stórur fólkaskúli verða bygdir í Marknagili, verður mett skilagott, at sentralklinikk, sum veitir alla barnatannrøkt, herundir sertannlæknaviðgerð, verður staðsett har. Samtykt at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera staðseting av sentralklinikkini út frá hesum.

**Ískoyti:**

Víst verður til málsgongdina, ið gongur meira enn 10 ár aftur í tíðina, og síðstu samtykt um at fáa staðsett nýggja tannlæknastovu til kommunalu barnatannrøktina.

Í samráð við teknisku fyrisiting verður mett skilabest, at gjørd verður fyrst ein yvirskipað tørvs- og virksemislýsing, harundir meting um samlaðan hølistørv-/stødd og krøv annars, og hetta kann veita eitt betri grundarlag fyri avgerð um staðseting.

Mett verður, at slík yvirskipað lýsing kann gerast liðug fram móti sumrinum.

Vísandi til, at stórur tørvur er á nýggjari tannlæknastovu, er endamál við arbeiðinum eisini at fáa sett hesa bygging á skrá og raðfest í langtíðaríløguætlanini, og at kommunan í hesum sambandi kann seta neyðugt fyrireikingararbeiðið í gongd, eitt nú at útvega byggiskrá.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla til at fyrisitingin ger yvirskipaða tørvs- og virksemislýsing, harundir meting um samlaðan hølistørv og stødd at leggja aftur fyri nevndina.

**Trivnaðarnevndin 14. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis ynskir nevndin vegleiðandi kostnað, soleiðis at tannlæknastovan kemur inn í langtíðar íløgukarmin.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir mál um nýggja tannlæknastovu á skrá.

Viðmerkingar:
Sum omanfyri lýst og sum nevndin eisini er kunnað um í sambandi við vitjan í tannlæknastovuni í Tórsgøtu, so er gamalt ynski um at byggja nýggja tannlæknastovu.

Ásannast má, at trupult hevur verið at fingið málið kjølfest, tó at ávís bygging av tannlæknahølum hevur verið farnu árini í sambandi við skúlabyggingar. Eisini er sertannlæknastova innrættað í hølum í Skúlanum við Løgmannabreyt. Høvuðstannlæknastovan í Tórsgøta lýkur hinvegin bart út ikki krøvini til virksemið. Barnatannrøktin fevnir um 6.300 børn og ung.

Átrokandi er at fáa nýggj høli til vega, og best var, um bygt varð nýtt til endamálið íroknað sertannlæknastovan, tvs. eina miðsavnaða tannlæknastovu (sentralklinikk).

Eingin avgerð um staðseting fyriliggur, men tannlæknastjórin mælir til at byggja á økinum millum Musikkskúlan og Skúlan á Fløtum. Har eru fleiri túsund av børnunum og teimum ungu í grannalagnum (Glasir, Skúlin á Fløtum, Musikkskúlin og fleiri dagstovnar). Harumframt vísir hon á, at hetta er beint við nýggju ringvegirnar við góðum busssambandi.

Á grein 2 er íløgujáttan kr. 1 mió sett av til nýggja lækna-/tannlæknastovu, játtanin er skrásett undir tannrøkt. Heilsu- og eldranevndin viðgerð í løtuni mál um nýggjar kommunulæknaviðtalur (21/00922).

Mett verður, at við parti av hesi játtan ber til at fáa til vega neyðugt tilfar, t.e. neyv tørvs- og virksemislýsing og byggiskrá, sum grundarlag fyri avgerð um staðseting og víðari støðutakan um byggiverkætlan og íløgutørv at raðfesta í íløguætlanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at umrøða málið.

**Trivnaðarnevndin 15. apríl 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**

Víst verður til ískoytið omanfyri. Víst verður eisini til fíggjarætlanaruppskotið 2022, har kr. 1 mió er sett av til nýggja tannlæknastovu til Barnatannrøktina. Um samtykt eru kr. 2 mió tøkar til endamálið.

Harumframt verður víst til mál um ymiskan hølistørv innan skúlaøkið, har høli í skúlum, sum Barnatannrøktin í dag brúkar, kundu verið loysn hjá skúlunum í tí sambandi.

Skotið verður upp at skipa fyrireikingararbeiði, har fingin verður til vega byggiskrá, sum m.a. skal lýsa hølis- og funktiónstørv og krøv annars til virksemið og henda ítøkiliga bygning, umframt íblástur frá øðrum barnatannlæknastovum. Býarskipanardeildin kann standa fyri hesum saman við umboðum fyri tannlæknastovuna o.ø.
Byggiskráin verður grundarlag fyri víðari tilgongd og útboð, har fleiri møguleikar eru at velja. Í bygging sum hesari, ið kommunan ikki hevur so nógvar royndir við, kundi verið skilagott at sett bygginevnd, sum leggur leist fyri fyrireikingararbeiðinum og tilgongdini viðvíkjandi útvegan av projektuppskotum, kostnaði og annars stendur fyri samlaðu verkætlanini.

Mælt verður til at seta kr. 1.000.000 av til endamálið.

Sum eisini framgongur av málinum, skal støða takast til staðseting av nýggjari tannlæknastovu til Barnatannrøktina. Hetta verður at beina til byggi- og býarskipanar-nevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla trivnaðarnevndini til:

- At fáa til vega byggiskrá viðvíkjandi nýggjari tannlæknastovu til Barnatannrøktina, sum savnar alt virksemið á einum stað.
- At stovna løgukontu til endamálið og at játta av galdandi fíggjarætlan kr. 1.000.000 av løgukarmi 2375 Tannrøkt til fyrireikingararbeiðið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
- At heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðseta nýggju tannlæknastovuna til Barnatannrøktina. At heita á býráðið um at velja limir í bygginevnd fyri nýggjari tannlæknastovu til Barnatannrøktina.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti tilmælinum frá trivnaðarnvndini og samtykkir soljóðandi broytingaruppskot:

- Fyrisitingin fær til vega eina kravspesifikatión viðvíkjandi nýggjari tannlæknastovu, ið skal bjóðast út í umvendari lisitatión, og settar verða av kr. 1.000.000 til endamálið av løgukarmi 2375 Tannrøkt.

Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Barnatannrøktin fevnir um 6.100 børn og ung, sum vitja tannlæknastovuna úr øllum pørtum í kommununi, umframt úr Sandoynni. Talið fer helst at vaksa upp í 7.300 børn og und, tá skipanin eftir ætlan verður víðkað til eisini at fevna um ung upp til 21 ára aldur.

Í verandi støðu er tannrøktarvirksemið og sertannlæknavirksemið spjatt út á fleiri smærri klinikkir í býnum. Í verandi støðu verða hesi høli nýtt til Barnatannrøktina:
Tannlækanstovan í Tórsgøtu
Tannlæknastovan í skúlanum í Kollafirði
Tannlæknastovan á skúlanum á Argjahamri

Sertannlæknastovan á Løgmannabreyt
og Tannlæknastovan á Sandi, ið eisini er partur
av tannrøktini eftir seravtalu.

Høvuðstannlæknastovan í Tórsgøta lýkur ikki krøvini til virksemið, og átrokandi er tískil at fáa nýggj høli til vega. Barnatannrøktin ynskir í tí sambandi at savna sítt virksemi á einum stað sum eina sentralklinikk, og metir at rúmligi tørvurin á einum nýggjum bygningi á 1.063m². (Her rundað upp til 1.100 m²)

Ein sentralklinikk til barnatannrøktina fær nógv vitjandi dagliga og av tí at barnatannrøkt kann bólkast sum miðsavnandi útvent virksemi, umframt at virksemið er almennari barnaheilsu at frama. Grundað á hetta verður mett býarskipanarliga, at besta staðsetingin fyri tílíkt virksemið er í miðbýnum, har tað er lætt atkomuligt frá øllum pørtum í kommununi, bæði umvegis býarbuss, súkklu og til gongu. Býarskipanarliga leggur kommunuætlanin somuleiðis upp til, at sertænastur í størstan mun verða staðsettar í miðbýnum, soleiðis at hesar savna so nógv fólk sum møguligt í miðbýnum.

Býarskipanardeildin hevur í hesum sambandi kannað møguleikarnar við eitt nú nýgerð av verðandi staðsetingum og við møguligum nýggjum staðsetingum.

Í viðheftu framløgu, j. nr. 15/03750-18, Staðsetingarmøguleikar til tannlæknamiðstøð 20okt2022.pdf er ein meting, ið samanber ymiskar staðsetingarmøguleikar í mun til eitt nú:
- nýtslumøguleikar
- atkomuviðurskifti
- býarskipanarlig fyrilit

Tikið verður hareftir samanum yvirskipaðar fyrimunir og vansar við lýsta staðsetingarmøguleikanum, ið soleiðis kann geva eina greiðari ábending um hvussu ein hóskandi staðseting kann finnast.

Fylgjandi staðsetingar eru í uppskoti:
1. Nýgerð og víðkan av hølunum í Tórsgøtu (Matr. nr. 338)
2. Við Skúlan á Fløtum (Matr. 917)
3. Á Frúutrøð (Matr. 645a)
4. Í Steinatúni (Matr. 357a)
5. Í J.H. Schrøtersgøtu (Matr. 537b + 538b + 538a)
6. Á Eystaru bryggju (Matr. 600a)

Framløgan verður løgd fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða uppskotini, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina at avgera staðseting.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2022:** Umrøtt og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina at avgera staðseting.

**Ískoyti:**
Í eini tørvslýsing hjá einum arbeiðsbólki í barna- og ungdómstannrøktini hjá Tórshavnar kommunu, varð gjørt vart við, at tørvur var á nýggjum dagførdum hølum og betri umstøðum til barna- og ungdómstannrøktina í kommununi.

Í verandi støðu er tannrøktarvirksemið og sertannlæknavirksemið spjatt út á fleiri smærri klinikkir í býnum. Hesar eru:

Tannlækanstovan í Tórsgøtu
Tannlæknastovan í skúlanum í Kollafirði

Tannlæknastovan í skúlanum á Argjahamri
Sertannlæknastovan á Løgmannabreyt, og
Tannlæknastovan á Sandi, ið eisini er partur av tannrøktini eftir seravtalu

Leiðarin fyri barna- og ungdómstannrøktina dagførdi hesa tørvslýsing í juni 2022, (sí viðheft skjal: *Dagførd tørvslýsing frá leiðara á barna og ungdómstannrøktini 25juni2022)*
Lýst verður í skrivinum, at tørvur er eini miðsavnaðari tannlæknamiðstøð, ið hevur rúmligar og framtíðartryggjaðar umstøður í mun til bæði nýggj heilsu- og trygdarkrøv, og í mun til ein væntaðan viðskiftafólkavøkstur. Sambært tørvslýsingini vóru í juni 2022 6100 børn og ung í skipanini, og væntast kann, at talið kann vaksa til 7300 børn og ung í framtíðini, í og við at aldursmarkið á teimum, sum eru umfataði av skipanini, kann væntast at hækka úr 18 ár upp í 21 ár.
Sambært tørvsmetingini er rúmligi tørvurin á eini tannlæknamiðstøð slakar 1063m² (rundað upp til 1100m²)

Í skrivi frá starvsfólkunum í tannrøktini í kommununi frá starvsfólkunum skjóta tey sjálvi upp, at ein hóskandi staðseting til endamálið hevði verið á matr.nr. 917 á Fløtum, tætt við Skúlan á Fløtum. Hetta er m.a. tí at her eru góð parkeringsviðurskiftir, gott busssamband við Marknagilsvegin og Landavegin, og at hetta liggur lutfalsliga tætt við fleiri barnagarðar og fleiri stórar skúlar í kommununi, eitt nú Skúlan á Fløtum, Glasir og Musikkskúlan.
Hetta ger tað smidligari hjá nógvum næmingum at fáa viðgerð, uttan at tað tekur ov nógva tíð frá undirvísingini.

Umframt hetta, verður skotið upp, at smáu tannlæknastovurnar í kommununi framvegis eiga at verða nýttar til fyribyrgjandi tannrøkt.

Býarskipanardeildin í Tórshavar kommunu hevur í hesum sambandi kannað møguleikarnar við eitt nú nýgerð av verðandi staðsetingum og við møguligum nýggjum staðsetingum. Sí viðheft skjal: *Staðsetingarmøguleikar til tannlæknamiðstøð 20 okt2022.*

Uppskotini eru serliga mett í mun til:
*nýtslumøguleikar*
*atkomuviðkurskifti*
*býarskipanarlig fyrilit*

Býarskipanardeildin er ikki samd við tilmælunum hjá Barna- og Ungdómstannrøktini um at tannlæknamiðstøðin átti at verið staðsett úti á Fløtum á matr. 917.
Hetta kemst m.a. av at hetta er í andsøgn við samtyktu kommunuætlanina frá 2020, sum rør uppundir, at miðsavnandi tænastuvirksemi eigur at vera staðsett niðri í miðbýnum, og at ein staðseting úti á Fløtum, hóast hon er praktisk fyri teir næmingar, sum eitt nú hava sína skúlagongd í nærumhvørvinum her, kann tykjast ógvuliga langt burturi hjá øðrum skúlanæmingum í býnunum. Eitt nú úr Eysturskúlanum, Skúlanum við Løgmannabreyt og í Hoyvíkar skúla, og sjálvandi eisini í mun til stovnarnar í bygdunum í kommununi.
Tískil verður staðsetingin á Fløtum hvørki mett at vera ein býarskipanarliga skynsom staðseting, og ei heldur er hetta ein javnsett staðseting, tá hugsað verður um atkomumøguleikarnar hjá flest øllum børnum og ungum í kommununi.

Býarskipanardeildin metir harafturímóti, at ein staðseting til hetta endamálið fyrst og fremst eigur at veljast við langskygdum býarskipanarligum fyriliti, bæði í mun til hugsjónina um at skapa ein betri skipaðan bý, og at tryggja skilagóð viðurskifti fyri ein almennan tænastumiðdepil hjá fleiri atknýttum bygdum og oyggjum, sum eru knýtt at kommunalu barna og ungdómstannrøktini.
Harnæst eiga atlit eisini at verða tikin til, hvussu skjótt ein væntandi kundi farið undir at fyrireika verkætlanina. Tvs. í mun til neyðugar broytingar, sum fyrst skulu gerast í ognarviðurskiftum, byggisamtyktum, ella atkomu- og parkeringsviðurskiftum.

Niðurstøðan hjá Býarskipanardeildini er tískil, at ein skilagóð staðseting til endamálið er í Tórsgøtu 23 (Matr.nr. 338), við eini umbygging og víðkan av verandi tannlæknahølunum á staðnum.

Hugsast kann, at bygingurin kann útbyggjast út í mark norðanfyri, og leingjast nakað suðureftir. Í verandi støðu er bygningurin í fýra hæddum, íroknað laðaga kjallaran og loftið, ið hevur vaðing vestureftir. Í útbygdum skapi verður viðmælt, at bygningurin varðveitir hesar somu fýra hæddirnar, men at tær tó verða gagnnýttar øðrvísið. Eitt nú við lækkaðum kjallaragólvi, og útbygdum kvistum á ovastu hædd. Málið er, at hvør hæddin í einum longdum skapi er umleið 275m² til víddar, ið tilsamans gevur 1100m².
Bygningurin varðveitir sostatt sítt snið og sín dám í so stóran mun sum gjørligt, men verður meira atkomuligur og útvendur oman í grøna, barnavinarliga almenna økið í Grasagarði.

Høvuðsbindiliðið fyri býarbussarnar í býnum er í Steinatúni beint við, sum knýtir allar skúlarnar í kommununi saman, ið ger hesa staðseting lætta at koma til og frá úr øllum herðashornum í kommununi.
Møguleikanir fyri at parkera í arbeiðstíðini mitt í viku eru heldur avmarkaðir í dag, og tískil eigur at verða hugt eftir, hvussu ein umskipan av parkeringsviðurskiftunum í nærumhvørvinum kann stuðla undir hesa staðseting. T.d. kann hugsast, at tíðaravmarkingin á parkeringsplássinum fram við garðinum hjá Frk. Cohr á Tróndargøtu lutvíst verður broytt til stutttíðarparkering til teirra, ið koyra børn síni til tannlækna. Og kundi man møguliga harumframt eisini lutvíst oyramerkt 2-3 básar til vitjandi á tannlæknamiðstøðini.

Ítøkiligu fyrireikingarnar til eina slíka verkætlan kundu byrjað so skjótt hetta verður raðfest.

Havast skal í huga, at verandi tannlæknavirksemi í Tórsgøtu 23, sum er mest vitjaða tannlæknastað hjá barnatannrøktini í løtuni, má húsast á øðrum stað ímeðan umbygt verður, og sostatt skal loysn finnast á eini fyribils tannlæknastovu.
Harumframt skal nevnast, at útlitini eru ókend fyri júst hvørjar ítøkiligar avbjóðingar og hvørjir møguleikar eru í eini umbygging av júst hesum bygninginum, tá hetta krevur eina støðumeting av bygninginum, sum upprunaliga varð bygdur í 1906.
Viðmælt verður, at hetta verður nágreinað í eini forkanning.

**Onnur møgulig staðseting**
Í niðurstøðuni í skjalinum um møguligar staðsetingar til eina tannlæknamiðstøð hjá Býarskipanardeildini var ein onnur gagngóð staðseting mett at vera serliga áhugaverd í hesum samanhangi.
Hetta var í Steinatúni (Matr. 357a + 357b), sum, eins og omanfyri nevnda staðseting, verður lýst í viðhefta skjalinum.
Matr.nr. 357b er privat ogn, og um tað er ynskiligt at arbeiða víðari við hesi staðsetingini, so verður neyðugt at keypa matr.nr. 357b. Mett verður ráðiligt at kanna møguleikarnar fyri at keypa hendan matrikkulin.

**Skjøl í málinum:**
*Dagførd tørvslýsing frá leiðara á barna og ungdómstannrøktini 25juni2022),* J. nr. 15/03750-23
*Staðsetingarmøguleikar til tannlæknamiðstøð 9 des2022*, J. nr. 15/03750-24

**Lógarásetingar:**
Matr. 338 umframt matr.nr. 357a eru fevndir av 2. Grundumráðið í Almennu byggisamtyktini, har matr.nr. 357b er fevndur av 1. Grundumráðið í Almennu byggisamtyktini.
Sostatt skal farast undir eina tilgongd, har hugt verður eftir hvussu ein bygging á 1100 $m^2$ kann nøktast á hesum staðsetingum. Hetta kann bæði gerast við markaðumskipan og/ella ger av serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at nýggj tannlæknamiðstøð til barna og ungdómstannrøktina hjá Tórshavnar kommunu verður staðsett, har verandi tannlæknamiðstøð er staðsett við útbygging oman móti Tilhaldinum.
- at kanna møguleikarnar at umbyggja og gagnnýta verandi tannlæknabygning á matr.nr. 338 til endamálið við teimum avbjóðingum, sum hendan staðsetingin hevur.
  at málið verður beint í býráðið umvegis trivnaðarnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina um staðseting og tørvin at kanna møguleikar at út- og umbyggja verandi tannlæknastovu til nútíðar krøv, harundir meting um, hvussu hetta skal gerast í verki samstundis sum tannlæknavirksemið ikki skal verða ávirkað í byggitíðini antin í bygninginum ella í fyribils tannlæknahølum.

Mett verður, at hetta fyrireikandi arbeiðið eigur at verða sett í gongd beinanvegin, har ráðgevi ger verkætlanaruppskot til samlaða loysn viðvíkjandi útbygging og dagføring av bygninginum umframt funktiónum og formligum krøvum tengt at tannlæknavirksemi ítøkiliga, herundir at fáa uppskot til, hvussu tannrøktin kann virka samstundis í bygninginum ella í eini fyribils tannlæknastovu, umframt kostnaðarmetingum fyri hesum.

Á løguætlanini fyri 2022 konta 2375 L23002 Tannlæknamiðstøð er kr. 1 mió tøk, og í íløgujáttanini fyri 2023 er eisini kr. 1 mió tøk á løgukarmi LK23002, tvs. tilsamans kr. 2 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla til:
- at játta kr. 1 mió av kontu 2375 LK23002 til L23002 Tannlæknamiðstøð,
- at arbeiðið at gera fyrireikandi kanningararbeiðið og verkætlanaruppskot sum omanfyri lýst verður sett í gongd,
- og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt

## 48/23 Heildarætlan Eystara havnarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 57/17 | 17/03628-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 253/18 | 17/03628-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 63/21 | 17/03628-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 26/21 | 17/03628-1 |
| 5 Havnanevndin | 13.04.2021 | 18/21 | 17/03628-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 74/21 | 17/03628-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 108/21 | 17/03628-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 258/21 | 17/03628-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 22/22 | 17/03628-1 |
| 10 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 14/22 | 17/03628-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 12/22 | 17/03628-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 48/22 | 17/03628-1 |
| 13 Havnanevndin | 14.02.2022 | 9/22 | 17/03628-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 50/22 | 17/03628-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 41/22 | 17/03628-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 210/22 | 17/03628-1 |
| 17 Havnanevndin | 05.12.2022 | 32/22 | 17/03628-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 22/23 | 17/03628-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 44/23 | 17/03628-1 |
| 20 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 48/23 | 17/03628-1 |

**Upprunin til málið:**
Eystara havnarøkið verður víðkað, og tí er tørvur á gera eina ætlan fyri hvussu økið skal skipast.
Av tí at útbyggingin ikki verður liðug fyrr enn í 2019, er tørvur á at gera tillagingar á verandi øki beinanvegin. Serliga er tørvur á at gera tillagingar í verandi farstøð.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppskot er gjørt til heildarætlan av Eystara havnarøki.
Uppskotið er ein lýsing av framtíðarætlanum fyri Eystara havnarøki, og lýsir verandi viðurskiftir, avbjóðingar og møguleikar.

Uppskotið lýsir verandi viðurskiftir, har undir ymiskleikan í ferðsluni, har stór skip, smábátar, størstu bilarnir og fólk til gongu eru á økinum. Hetta verður framhaldandi veruleiki, og kanska í enn størri mun enn í dag, nú havnarlagið verður víðkað.

Víðari lýsir uppskotið framtíðar menningarmøguleikar, støddir, volumenkanningar, nýggj ferðslumynstur og søgulig sambond, sum kunnu styrkjast millum Skansan, Tinganes og økið inn móti Kongabrúnni.
Til seinast lýsir uppskotið hvussu ferðsla, parkering og avgreiðsla av ferðafólki verður skipað tá útbyggingin av havnarlagnum verður liðug, soleiðis at tann vaksandi ferðingin og flutningurin, kann virka undir tryggum karmum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er avlagt sum B1 havnarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
j.nr. 17/01436 Víðkan av Farstøðini

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Heildarætlan fyri Eystara havnarøki j.nr. 17/03628-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við heildarætlanini fyri Eystara havnarøki.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og koyra heildarætlanina til almenna kunning og viðmerking.

**Ískoyti – kunna verður um málið.**
Uppskot til heildarætlan fyri Eystara havnarøki sampakkar bæði við Miðbýarætlanina fyri Tórshavnar kommunu og við verandi ætlanir um at útbyggja Tórshavnar havn.

Í miðbýarætlanini eins og í heildarætlanini verður dentur m.a. lagdur á, at eitt øki við Eystaru bryggju verður lagt av til býartætting við eitt nú bústøðum, vinnu og virksemi tengt at býarlívinum.

Tankin aftanfyri útbyggingina av Tórshavnar havn er at fáa eitt væl skipað kaiøki, har bleyta vinnan er staðsett næst býnum og tunga og mest larmandi vinnan longst burtur frá býnum í tí nýggju útbyggingini. Hesum tanka fylgir heildarætlanin fyri Eystara Havnarøki eisini.

Uppskotna heildarætlanin fevnir um trý øki, ið eru skipað í vinnulív, havnar- og ferðavinnuvirksemi og annað blandað virksemi.

Øki A er økið innast í Eystaru Vág og næst miðbýnum. Í heildarætlanini er hetta økið ætlað bleytum handils- og vinnuvirksemi. Her verður bleyta ferðslan leidd fram við bryggjukantinum, og søguligar frágreiðingar og

rekreativt og býarkent virksemi verður borið fram, sum ein forlongdur armur frá økinum fram við Kongabrúnni, bátahylinum, Áarstovu og Essabar. Hetta sampakkar sera væl við uppskotið í miðbýarætlanini, har Kongabrúgvin skal vera framtíðar miðdepil fyri eitt nú sjóvarítrótt og rekreatión. Harafturat verður lagt upp til, at Kongabrúgvin er eitt øki, har góðir møguleikar eru fyri býartætting, eitt nú við at byggja vinnubygningar og bústaðir og hetta sampakkar eisini væl við miðbýarætlanina.

Øki B er økið millum miðbýarvirksemi og havnarvirksemi. Uppskot til hetta øki er at skapa eitt náttúruligt skifti millum bý og bryggju, har ein seyrigøta kann leiða bleytu ferðsluna út úr býnum eftir bryggjukantinum, og eitt parkeringsøki kann skapa íbinding og avgreiðslu til havnina.

Øki C er økið tættast móti havnini og nýggju útbyggingini. Hetta økið skal tola tunga ferðslu, og kunna virka sum granni hjá stóra havnarrúminum og samferðsluplássinum.

Við havnarútbyggingini, ið fer fram í løtuni, er týdningarmikið, at verandi og nýtt virksemi, knýtt at sjóvinnuni og bryggjukantinum, er væl skipað, og somuleiðis hugsað inn í eina langskygda heildarætlan. Tórshavnar kommuna skal vera við í arbeiðinum at skipa Føroyar sum tilfeingisdepil í Norðurhøvum, og útbyggingin av Tórshavnar Havn eigur tí at vera hugsað saman við restini av økinum inn í eina heildarætlan, soleiðis at havnin kann gerast ein sameindur partur av restini av býnum.

Henda heildarætlan er ein menningarætlan, ið sameinar allar tættir í einum býarparti og stuðlar undir at ávegis avgerðir styðja uppundir langskygdar ætlanir. Hetta eru ætlanir, ið kommunan eigur at hava, bæði fyri at vera tilvitað, tá nýggjar ætlanir koma á tekniborðið og fyri at langtíðarætlanirnar verða havdar í huga, tá planlagt verður.

Heildarætlanin hevur í fyrstu atløgu ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, men kemur heildarætlanin at liggja til grund, tá býurin skal mennast víðari út eftir Havnargøtu/Kongabrúnni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini, undir hesum at kanna ferðsluviðurskiftini nærri og gera rúmkanningar av økinum, soleiðis at heildarætlanin verður greina út, fyri síðani at leggja málið fyri aftur nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk fóru í fjør undir eina tilgongd um nýtt tjóðleikhús í Tórshavn. Fyrsta stigið í verkætlanartilgondini er at vísa á best egnaðu staðseting fyri tjóðleikhúsið.
Mánadagin 8. mars 2021 var kunngjørt av Uttanríkis og mentamálaráðnum, at kappingin av staðsetingini av nýggja Tjóðleikhúsinum var avgreidd, og at dómsnevndin var komin fram til, at Tjóðleikhúsið skuldi staðsetast á Bursatanga, har leikhúsið kemur at standa á markamótinum millum bý og havn.

Tórshavnar kommuna fekk handa avgerðina frá Dómsnevndini og skal nú taka støðu til valdu staðseting. Í sambandi við at taka endaliga støðu til staðsetingina, so verður neyðugt at viðgera økið út frá teimum staðbundnu avbjóðingunum, sum økið hevur við sær, og verður neyðugt at tryggja sær, at endaliga staðsetingin hóskar inn til býarskipanarligu-, havna- og ferðsluatlitini, sum kommunan beinleiðis hevur til staðið.

Sostatt verður mett, at neyðugt verður at seta gongd á arbeiðið at skipa eystara havnaøkið í eina heildarætlan fyri økið, har staðsetingin av Tjóðleikhúsinum samstundis verður nágreinað.

Av tí at 5 ráðgevara-toymir eru knýtt at kappingini um Tjóðleikhúsið, og mugu hesi, samstundis sum tey tekna upp á eitt nýtt tjóðleikhús, taka støði til nærumhvørvið, so verður mett, at besta loysnin til at fáa eina

nøktandi loysn fyri bæði skipan av økinum og skipan av tjóðleikhúsinum er, at báðar kappingarnar verða samskipaðar.

Upplýst er fyri umsitingini, at hetta er sama tilgongd, sum Reykjavíkar kommuna framdi, tá Hørpan í Reykjavík og økið kring Hørpuna varð skipað.

Til at fara undir hesa tilgongd verður neyðugt, at býarskipanarligi, tekniski og havna myndugleikin nágreina ítøkiligu krøvini til eystara havnaøki nú og í framtíðini, soleiðis at ráðgevaratoymini hava nakað ítøkiligt at fyrihalda seg til, tá økið og bygningurin skal teknast.

Metta samlaða upphæddin at fíggja toymini er áljóðandi 500.000 kr., har hvørt toymið verður samsýnt við 100.000 kr.

Við at fara undir hesa tilgongd, so fær kommunan 5 ymisk uppskot til skipan av økinum, og kann hugsast, at elementir eru í øllum uppskotunum, sum kunnu gagna endaligu skipanini av økinum. Hetta er ein heldur óroynd tilgongd, og hevur kommunan ikki áður samskipa verkætlanir við landi á henda hátt, men mett verður, at týdningurin av at Tjóðleikhúsið verður staðsett í Tórshavn og týdningurin av at hendan staðseting er heldur serlig í mun til kringumstøðurnar, so er tað bara jaligt at fáa fleiri uppskot inn til skipan av økinum, soleiðis at kommunan í síðsta enda hevur eina skipan av økinum, sum tekur hædd fyri teimum staðbundnu viðurskiftum, sum kommunan metur vera av týdningi fyri økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at farið verður undir at skipa eystara havnaøki sambært omanfyri standandi leisti,
- at umsitingin fer undir at nágreina ítøkiligu krøvini, sum ráðgevin skal fyrihalda seg til,
- at 500.000 kr. verða játtaðar av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið á nýggja íløgu 'Skipan av eystara havnaøki' undir konto 6275,
  og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 13. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot í málinum. Atkvøtt verður um soljóðandi uppskot: Samtykt við tí broyting, at fleiri arkitektar kunnu bjóða seg fram at gera heildarætlan. Málð um fígging verður at leggja fyri aftur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at tørvur er á eini heildarætlan fyri Eystara havnaøki, frá Kongabrúnni og út undir Skansan, stóð tað 5 ráðgevarasamtøkum í boði at luttaka í eini "Hugskotsinnsavning", sum Býarskipanardeildin skipaði fyri frá 20 okt. – 8.nov 2021.

Arbeiðið varð skipað so, at 5 ráðgevaratoymir skuldu arbeiða við hvør sínum uppskoti til eina heildarætlan hesar 7 vikurnar fyri eina samsýning á kr. 100.000 í part.
Tað vórðu 500.000 kr. settar av til hetta av konto 6275, fríðkan av Kommununi, og hetta varð samtykt á býráðsfundi longu 29. apríl 2021.

Býraðið samtykti tá eisini, broytingaruppskotið hjá Heðini Mortensen, at loyva fleiri ráðgevum at luttaka í hugskotsinnsavningini. Hetta var við støði í at tvær ráðgevarafyritøkur:

- EYA arkitektar og design
- Arkitektar 99

høvdu sýnt áhuga at vera við í verkætlanini saman við teimum upprunaligu 5 innbodnu ráðgevarasamtøkunum.
Hetta skuldi eisini samsýnast eftir sama leisti og við somu treytum. T.v.s. við 100.000 krónum í part fyri at gera uppskot til heildarætlan.
Báðar fyritøkurnar vórðu mettar at kunna innlata nøktandi talgilt tilfar.
Grundað á hesa samtykt vórðu tískil tilsamans 7 samtøk innkallað at luttaka í hugskotsinnsavningini, har tey fingu somu kravfesting og sama grundtilfar at arbeiða útfrá.

Tískil eru 2 fyritøkur afturat, sum hava rætt til at samsýnast við 100.000 í part fyri uppskotini, ið tey lótu inn. 8 nov. 2021.

Atlit skal harumframt takast til, at samsýningin fyri øll 7 innkomnu uppskotini má útgjaldast sum *samsýning fyri innkeypt ráðgevaraarbeiði*, og her má tískil íroknast meirvirðisgjald.

Afturat teimum framanundan játtaðu kr. 500.000, mugu tískil játtast kr. 243.750 afturat.
Tað er 100.000 í part til teir báðar innbodnu ráðgevarnar, umframt kommunala meirvirðisgjaldið (6,25%) av teirri samlaðu upphæddini at útgjalda til allar 7 ráðgevarnar.
Umframt tað er eisini nakað av fundarútreiðslum, sum fór til at skipa og leiga høli til verkstovu við viðgerðararbeiðinum. (Kr. 7.960 v.mvg)

Eina góða viku undan innlatingarfreistini kom fyrispurningur frá einum ráðgevi afturat (Albert Isfeldt og Jóannes Petersen) um at vera við í hugskotsinnsavningi. Ráðgevanum varð greitt frá, teir vóru vælkomnir at koma við einum sjálvbodnum ítkasti til eina heildarætlan, men at teir ikki kundu vænta samsýning fyri hetta arbeiði, tá teir ikki kundu lúka somu arbeiðstreytir sum hinum 7 ráðgevarnir arbeiddu undir, sum longu tá høvdu sitið við uppgávuni í 6 vikur. Hetta varð játtað, og ráðgevin lat eisini eitt uppskot inn, ið eisini varð tikið við í viðgerðartilgongdina.

Eftir at hugskotsinnsavningin varð lokað 8. nov. 2021 hevur býarskipanardeildin verið í eini tilgongd, har arbeitt verður við innkomna tilfarinum fyri at fáa eina ítøkiliga og framtíðartryggjaða heildarætlan samansetta.
Umsitingin kemur at kunna um verkætlanina á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 255.000 av Løgukarminum LK62035 “Vetrarfriðing” á L62046, «Heildarætlan Eystara havnaøki», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Tørvurin á eini heildarætlan**
Í tráð við at havnavirksemið á gomlu Eystaru bryggju so líðandi verður flutt út á nýggju ídnaðarkeiina, hevur stórur tørvur verið á eini nýggjari menningarætlan fyri Eystara Havnaøki til tess at tryggja at økið ikki kemur at standa lutfalsliga oyðið í framtíðini.

**Eystara Bryggja tømist**

Eitt nú kann nevnast, at stóra pakkhúsið undir Skansanum hjá Smyril Line Cargo, og skrivstovubygningurin hjá TAKS á ávikavist Eystaru bryggju 20 og 30 ætlandi verða niðurtikin, tá hetta virksemið heldur verður samlað úti á nýggju ídnaðarkeiini. Smyril Line fyrireikar í hesum viðfangi eisini byggingina av nýggjum altjóða ferðafólkaterminali úti á ídnaðarkeiini, har Norrøna fer at hava sítt fasta atløgupláss.

Væntast kann harumframt, at hildið verður fast um ætlanina við at bora undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Suðuroynna um eitt stutt áramál, sambært raðfestingini á fíggjarlógini fyri 2022. Natúrligu avleiðingarnar av hesum eru, at Strandfaraskip Landsins fyrireikar, at suðuroyarsiglingin verður niðurløgd, at Smyril verður seldur, og at ferjulegan og stóra asfaltsfløtan við bíðstøðuplássunum umborð tískil kemur at standa tóm, um Tórshavnar kommuna onga aðra ætlan hevur fyri økið.

Eftir á Eystaru bryggju stendur sostatt bert farstøðin hjá SSL við atknýttu bussplássunum, ferjulegan hjá Ternuni, og Havnarskrivstovan uttast undir Skansanum, umframt víðu asfaltsfløturnar og bíðistøðuplássini.

Um hugt verður at samlaða økinum í verandi støðu, kann Eystara Havnaøki í dag býtast upp í tríggjar partar. (sí journalnummar 17/03628-18, Økispartar_Eystara havnaøki.pdf) hesir partar eru:

- Økispartur 1 er innasti og søguliga ríkasti partur av samlaða økinum, við Kongabrúnni, bátahylinum, Bursatanga og havnalagnum yvir av Tinganesi út til Farstøðina. Hesin parturin er á leið 15.000 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 2 er samferðslu og farmaøkið frá Farstøðini og út til nýggju ídnaðarkeiina. Hesin partur er á leið 18.900 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 3 er útbygda ídnaðarøkið og nýggju molarnir. Hetta økið er á leið 187.600 $m^2$

**Tilgongdin við Heildarætlanini**
Býarskipanardeildin hevur saman við teknisku deild, verið í eini tilgongd at gera eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki hvussu teir báðir innastu økispartarnir (1 & 2) best kunnu gagnnýtast og framtíðartryggjast býarskipanarliga í mun til komandi virksemi og menning í økinum tey næstu mongu árini.

Skipað varð í hesum sambandi fyri eini hugskotskapping, har 8 arkitektasamtøk gjørdu hvør sítt uppskot uppá eina heildarætlan fyri økið. Sum grundarlag undir kappingini varð ein kravfesting gjørd við støði í teimum bindingum, sum eru í økinum, og við atliti til tey ynski, sum áhugabólkar og brúkarar í økinum hava. Harumframt varð tilfarið eisini evnað við tí í hyggju, at nágreina hvar eitt Tjóðleikhús kundi verið staðsett í økinum.

Uppskotini vórðu innlatin 8. nov 2021, og vórðu tey eftirfylgjandi viðgjørd í einum fakligum arbeiðsbólki, ið tók støðu til hvussu ein endalig heildarætlan fyri Eystara Havnaøki skuldi skipast úr teimum best eydnaðu lutunum úr kappingini.

**Heildarætlanin**
Við støði í innkomnu ráðgevarauppskotunum, hevur Býarskipanardeildin gjørt eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki, har stóru strokini vóru, at økispartur 1, ið er innasta og mest søguligi parturin, verður best gagnnýttur og virðiligast handfarin, um hann verður inntikin til fólksligt miðbýarvirksemi, sett av til mentan, ferðavinnu og smávinnuligt virksemi, bryggjutorg og útbygdari smábátahavn við nýggjari atløgubryggju til størri stuttleikafør við Bursatanga.

Hetta verður sostatt eitt livandi mentanarumhvørvi, ið knýtir bæði Skansan og Tinganes upp í miðbýin, samstundis, sum tað leggur lunnar undir, at her verður bygt til alment mentanarvirksemi, ið tænir tignarliga økinum heiður, og samstundis hevur virðing fyri tí søguliga smáneystaumhvørvinum, sum einaferð setti sín dám á Eystaru vág, áðrenn økið varð umlagt til ídnað og samferðslu.

Økispartur 2, millum Farstøðina og Havnarskrivstovuna varðveitir sína funktión sum samferðsludepil, men verður mentur munandi og endurskipaður í mun til ferðslurensl og virksemi.

(Sí nærri útgreining í bóklingi um heildarætlanina)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfari, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðin.
- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini "Uppskot um kappingarøki" áljóðandi 10.000 m$^2$ verður avsett til kappingarøkið hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Útsett

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Útsett.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Útsett.

## Ískoyti:

## Skipan av Eystara havnaøki:
Í fyrireikingini til útbygging av Eystara havnaøki, tá ætlanin var at tilkoyringin til havnarlagið lá uttan fyri Skansan, skuldi havnarlagið víðkast við 163.000 m$^2$.

Av tí at tað tók so langa tíð at fáa tað endaliga friðingarloyvið, bleiv avgjørt at minka útbyggingina til 95.000 m$^2$.
Avleiðingin av minkingini er, at havnaøkið ikki er so stórt, sum upprunaliga ætlað, og at tilkoyringin til havnarlagið hevði verið betur, um ætlanin ikki varð minkað.

Avgjørt er, at byggja nýggj pakkhús og farstøð á økinum uttan fyri havnarskrivstovuna. Hjarnuvirksemið hjá havnini og skipafeløgunum er, at hava pláss til at avgreiða ferðafólk og frakt.

Samfelagið er í støðugum vøkstri, tí er umráðandi at skipafeløgini, hava arbeiðsumstøður og pláss at fylgja við hesum vøkstrinum.

Av tí at tað tekur fleiri ár at víðka havnarlagið, er neyðugt at økið millum havnarskrivstovuna og farstøðina framhaldandi verður ein partur av virkseminum hjá skipafeløgunum.

Økið millum havnarskrivstovuna og Bursatanga er umleið 23.000 m$^2$

Í tekning j.nr 17/03628-14, heildarætlan Eystara havnaøki skitsa 061221, sæst, at ætlanin er at venda Smyrli, soleiðis at koyrast skal í land undir havnarskrivstovuni.

Hendan ætlanin viðførir:

1. At tað verður truplari hjá Smyrli at koma til og frá, serliga á útsyðningi
2. At einasta flytiliga rampan í Havnini verður gjørd óvirkin
3. At økið beint innan fyri havnarskrivstovuna, sum eigur at vera partur av virkseminum hjá skipafeløgunum í uttanlandssigling, verður brúkt til bíðirøðir og farm, sum skal við Smyrli.
4. At íløgur skulu gerast í:
    a. Nýggja rampu undir havnarskrivstovuni
    b. Nýggja rampu út eftir molanum
    c. Styrking av bryggjukantinum innan fyri havnarskrivstovuna
    d. Nýggjar sterkar fendarar innan fyri havnarskrivstovuna
    e. Nýggjar stormpullartar til Smyril

f. Nýggja farstøð ella landgongd við gongubrúgv til verandi terminal

**Tilmæli frá havnameistaranum:** At økið millum havnarskrivstovuna, og verðandi ferðafólkaterminal, framhaldandi verður partur av uttanlandssiglingini.
At økið frá verðandi farstøð ikki verður lagt av til miðbýarvirksemi, fyrr enn Smyril verður tikin úr sigling.

**Havnanevndin 14. februar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen samtykti at eitt økið upp á uml. 4.000 fermetrar frá Farstøðini og heim ímóti býnum verður lagt av til miðbýarvirksemi og Mentunarhús.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Fortreytirnar fyri nýskipan av Eystaru bryggju:**

Komandi árini verða fortreytirnar fyri virkseminum á Eystara Havnaøki somikið broyttar, at neyðugt er at nýskipa økið, so tað kann gagnnýtast á ein skynsaman og framtíðartryggjaðan hátt. Tørvur hevur verið á eini heildarætlan fyri økið millum Kongabrúnna og út til ídnaðarmolan á Eystara havnaøki. Umtalaða økið er umleið 32.800 $m^2$ til støddar.

Økið verður í verandi støðu nýtt til:

- Samferðsluøki við farstøð hjá Strandfaraskipum Landsins og Smyril Line, bæði við atløgubryggjum til uttanlandaferðaflutning, sum karmur um ferjusambandið til Nólsoyar og Suðuroyar, og sum bussmiðstøð hjá bygdaleiðum.
- Taxamiðstøð
- Pakkhús
- Havnaskrivstova hjá Tórshavnar Havn
- Skrivstovuvirsksemi.
- Smábátahavn
- Alment parkeringsøki
- Og til matstovu og handilsvirksemi.

Broytingarnar í økinum verða m.a.

- At Suðuroyarsiglingin væntandi verður niðurløgd og Smyril verður tikin úr sigling.
- At pakkhúsið og skrivstovuvirksemið á ávikavist Eystaru bryggu 20 og 30, millum Havnaskrivstovuna og verandi Farstøð, verður flutt úr økinum.
- At bussleiðirnar hjá SSL verða fleiri í tali.
- At Smyril Line flytur alt sítt uttanlanda siglingarvirksemi av økinum og út á molan við nýggjum altjóða terminali.
- At ferðslan um rundkoyringarnar og út á ídnaðarmolan fer at vaksa.

Ein nýggj skipan av økinum leggur upp til, at verandi funktiónir fáa neyðugt rásarúm til at virka og røkja sítt virksemi á ein tryggan hátt, og at leysgivnu fermetrarnir í økinum verða gagnnýttir á skilabesta hátt, hvat býarskipan og miðbýarmenning viðvíkur. Her verður serstakliga hugsað um søguliga virðið í økinum, har býareyðkenni sum Tinganes, Skansin og Kongabrúgvin er ein partur av nærumhvørvinum.

Býarskipanardeildin hevur verið í eini tilgongd at skipa eina heildarætlan fyri økið, har samskift hevur verið við uttanveltaðar ráðgevar og áhugabólkar i økinum.

**Økispartar í heildarætlan**

Heildarætlanin deilir umtalaða økið í fýra økispartar.

- Økispartur 1, ið er økið við ósan á Havnará og nakað út á Kongabrúgv (umleið 1300 $m^2$).
- Økispartur 2 er Innara bryggjuøkið frá Kongabrúnni og út til verandi farstøð. (umleið 17.000 $m^2$)
- Økispartur 3 er Miðøkið við verandi farstøð og atknýttum bussstøðubásum, tolli og parkering. (umleið 7600 $m^2$)
- Økispartur 4 er Ytra bryggjuøkið frá verandi farstøð og út til ídnaðarmolan. (umleið 7000 $m^2$).
- Uttan fyri økispart 4 er Schengen- og ídnaðarøki (umleið 157.000 $m^2$)

**Skipan av økinum**

Heildarætlanin er skipað so, at:

Økispartur 1 og 2 verður umskipaður til miðbýarkent virksemi við smáhandlum, kafé/matstovum, og ymiskt til ferðavinnuligt endamál. Her verður bryggjutorg við bátadrátti og broyttum bryggjukanti, ið er ætlaður fólki til gongu, umframt at smærri skip kunnu liggja her. Smábátahavnin verður eisini útbygd til at taka fleiri bátapláss.
Nólsoyarferjan kemur framhaldandi at hava atløgu í økinum, og her verður nýggj ferðamiðstøð bygd, við nýggjum bussstøðuplássum til bæði bygdaleiðir og býarbuss.

Her verður lutfalsliga lág bygging í 1-3 hæddum.

Økispartur 3 verður avsett til alment mentanarligt endamál, so sum leikhús og almenna parkering. Her verður ein nýggj og størri rundkoyring gjørd, við einum eyka ferðsluarmi, ið verður leiddur beint oman á bryggjuna.

Her verður hægri bygging loyvd í upp til 5 hæddum, og undantak kann í serligum føri verða givið upp til 20 m til eitt nú leikhústorn.

Økispartur 4 verður skipaður, lutvíst sum sokallað buffara-øki til uttanlandasiglingina og atløgubryggjuni hjá Norrønu/SmyrilLine. Og lutvíst sum almenn parkering á Eystaru bryggju annars.
Vegurin frá rundkoyringini og út á ídnaðarøkið verður eisini breiðkaður við eini eyka frákoyringarbreyt til tunga ferðslu niðan um Skansan.

Her kann byggjast í upp til 5 hæddum, treytað av at ikki verður bygt upp um hæddina á hamaranum á Skansanum, ið er 16 m høgur í lutfalli til bryggjukantin.

Í øki 3 og 4 eru líkindini góð fyri at ymsar funktiónir umskara, ella yvirlappa hvørja aðra. Til dømis er hugsandi at buffarastøðubásar til ferjulegurnar partvís kunnu nýtast sum almenn parkering um kvøldarnar, tá tiltøk eru á skránni í økinum.

Eisini er hugsandi at parkeringsdekk kann byggjast, um tørvurin og trýstið á hetta økið fer at vaksa.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfarið, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðini

- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Uppskot um byggiøki” áljóðandi 4.000 $m^2$ verður avsett til byggiøki hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.

- At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Landsverk, umboðandi Uttanríkis- og mentamálaráðið, stóð í heyst fyri arkitektakapping at gera uppskot til Tjóðleikhús. Býráðið samtykti í vár at avseta økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Yvirlitskort heildarætlan_1til1000_A2_190222”, j. nr. 17/03628-27, til byggiøki til nýggja Tjóðleikhúsið.

Landsverk hevur síðani kappingina sent kommununi vinnandi uppskotið og dómsnevndarálitið frá kappingini, sí journal nr. 17/03628-36 og nr. 17/03628-38.

<u>Soleiðis verður greitt frá vinnandi uppskotinum:</u>

*Uppskot 95516 skarar framúr á øllum givnum økjum: Arkitektonisk hugsjón, funktionalitetur, samspæl við nærumhvørvið og byggibæri, heildarkostnað og umhvørvisatlit.*
*Tað hevur eitt týðiligt og snotiligt høvuðsbragd, sum sameinir og miðlar tað nógva virki í tjóðleikhúsinum. Logistikkurin og skipanin í tjóðleikhúsinum er sera sannførandi, og sum gestur fært tú eina stóra uppliving, og tað er lætt at vitja húsið. Bygningurin er gevandi í mun til sítt umhvørvi, tí hann við sínum terassum leiðir okkum inn í tjóðleikhúsins skala á sannførandi hátt, hann hevur bleytt dánað, spælandi og kortini rytmisk mynstur og er innbjóðandi á øllum fimm síðum, og bygningurin virkar bæði sum eitt nýtt útsýnisstað, haðani tú upplivir alt havnarrúmið, og sum trappusteinur til Skansan við sambandi til Skansan og sjónarringin. Henda sambinding uppraðfestir og sameinir Skansan sum leikara í tí stóra býarlandslagnum av nýggjum. Samstundis ger dómsnevndin við sínum vali eitt greitt tilmæli um, at tjóðleikhúsgrundøkið verður tillagað, og samsvarandi eigur busskoyring á Eystaruvág at endurskoðast, so at minkað verður um ferðslutunga dámin á tí øki, sum í framtíðini skal verða ein víðkaður miðbýur í Havn.*

<u>Somuleiðis verður skrivað soleiðis í niðurstøðunum hjá dómsnevndini:</u>

*Dómsnevndin metir, at um staðsetingin av Tjóðleikhúsinum á havnarlagnum verður tillagað nakað, verður samspælið við Skansan og Tinganes betur. Eitt hjartamál hjá nevndini hevur verið, at tann nýggi bygningurin ikki oyðileggur tað søguliga samspælið millum tey týdningarmiklu mentanarsøguligu og býarlandslagsligu støðini Tinganes og Skansan, men verður settur einastaðni á tí stóra havnarøkinum, sum letur upp fyri eygnasambandi, samstundis sum býarlívi, ferðslukrøv v.m., kunnu verða gingin á møti. Við at flyta tjóðleikhúsgrundøkið burtur frá høvuðsásinum millum Tinganes og Skansan kann tjóðleikhúsið gerast eitt nýtt triðja punkt, ið stuðlar uppundir hinum báðum. Hetta fer eisini at geva gongugøtuni betri tilknýti til Skansan.*

Í dómsnevndarálitinum verður sostatt viðmælt at flyta Tjóðleikhúsið eitt lítið vet nærri Kongabrúnni aftur fyri at varðveita søguliga samspælið millum Tinganes og Skansan. Landsverk hevur eftirfylgjandi heitt á kommununa um at fara í eina tilgongd at nágreina endaligu staðsetingina/byggiøkið, sum kann liggja til grund undir einum komandi leigu-/sølusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið.

**Skjøl:**

J. nr. 17/03628-27, Yvirlitskort heildarætlan_1til1000_A2_190222
J. nr. 17/03628-36, Vinnandi uppskotið hjá MAP Arkitektum_kapping aug_sep 2022.pdf
J. nr. 17/03628-38, Dómsnevndarálit-Tjóðleikhús við undirskriftum.pdf.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til,

- at heimila umsitingini at fara í eina tilgongd saman við Landsverki og teirra ráðgeva at finna endaligu staðsetingina til Tjóðleikhúsið á Eystara havnaøki, sum skal liggja til grund fyri leigu-/søluavtaluni millum Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið,
  og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina og at málið verður lagt fyri nevndina aftur.

**Havnanevndin 05. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum tó við tí viðmeking, at man tekur undir við at leiga og ikki selja undirlendið, og at man heldur seg til økið sum er samtykt frammanundan í havnanevndini.

**Ískoyti:**
Peningur bleiv í 2021/2022 játtaður til verkætlanina L62046 Heildarætlan fyri Eystara havnarøki til ráðgevar at koma við uppskotum. Arbeiðið við heildarætlanini er fyribils liðugt, og saldoin á verkætlanini er 80.500 kr.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62046 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 6275 | L0001 | Løgukarmur - Fríðkan av býnum | | 80.500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62046, Heildarætlan Eystara havnaøki, flyta avlopið á 80.500 kr á karmin L00001 á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur undir við at loka verkætlanina og at flyta avlopið á karmin L64040 á konto 6275.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 177<br><br>Formansins merki: |

# 49/23 Havnin sum súkklubýur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 58/19 | 19/01370-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 18/19 | 19/01370-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 25/19 | 19/01370-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 308/19 | 19/01370-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2019 | 200/19 | 19/01370-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 20/20 | 19/01370-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 22/20 | 19/01370-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 14/20 | 19/01370-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 241/21 | 19/01370-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 23/23 | 19/01370-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 46/23 | 19/01370-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 49/23 | 19/01370-1 |

**Upprunin til málið:**
Marin Katrina Frýdal, forkvinna í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fólkheilsa, umhvørvi, flytføri og fíggjarlig menning – súkkling er ein liður, ella eitt amboð, ið stuðlar undir hesum. Lykilin til eitt gott samfelag er í einum sterkum flytføri, har bilar ikki longur dálka luftina og taka so nógv pláss, sum teir gera nú á døgum. Økta framtíðar ferðslan skal loysast við súkkling, gongd og almennari ferðslu.

Vilja vit súkkling, tosa so ikki bara um súkkling, sigur Gil Penelosa. Tí tað snýr seg um fólkaheilsu, umhvørvi, flytføri og fíggjarliga menning. Súkkling er bara eitt av fleiri amboðum, sum arbeiðir fyri hesum og er ikki eitt endaúrslit í sjálvum sær. Gil Penelosa er stovnari og leiðari fyri almannagagnliga felagsskapinum 8 80 Cities í Toronto í Canada. Hugsanin er, at um ein megnar at skapa ein bý, har gott er at liva hjá bæði 8 og 80 ára gomlum, so er tað ein býur, sum er góður fyri øll.

Tórshavnar kommuna skal miðvíst og yvirskipað leggja til rættis, so Havnin verður ein góður súkklubýur. Strembað eigur at verða eftir, at Havnin gerst ein av heimsins bestu súkklubýum. Havnin er ein eyðsæddur súkklubýur, fjarstøðan er stutt og veðrið er milt. Hóast regn og vind, eru sera góð klæðir til endamálið, og súkklurnar eru sera væl útgjørdar til nógvu brekkurnar við nógvum kervum. Harumframt eru frálíkar el-súkklur eisini komnar á marknaðin. Tað skal vera lætt at velja súkkluna, ið er ein týdningarmikil partur av grøna skiftinum. At skilja súkkluferðslu frá bilferðslu er ein liður í hesi stremban.

Málið skal verða, at súkkling skal fella sum eitt trygt og natúrligt val hjá teimum flestu.

Nógvar gøtur eru gjørdar síðstu árini, sum eisini eru sera væl egnaðar at súkkla á, eins og breiðar gongubreytir nú verða strikaðar eftir heimildini, kommunan loksins hevur fingið; *Kunngerð nr. 138, Um súkklandi á gongubreytum, frá 19. oktober 2017*, soleiðis at bæði gongufólk og súkklandi kunnu nýta gongubreytirnar.

Skal Havnin skara framúr, sum ein veruligur súkklubýur, har súkkling er ein valmøguleiki hjá øllum, skal tað verða trygt, lætt og skjótt at súkkla. Lykilin er útbygging av eini samanhangandi súkkluleið, har ikki er neyðugt at stíga fótin niður á fast og har súkkling í mestan mun er atskild frá bilferðsluni.

Neyðugt er at gera bæði smá og stór átøk. Langtíðarætlanir verða lagdar í kommunu-/miðbýarætlanir, byggisamtyktir og í øllum skipanararbeiði.

**Uppskot til átøk at gera beinanvegin - *skjótt syftir seiðir*:**

1. Skráar verða gjørdir á øllum mótum, har gongubreytir/súkklubreytir enda á vanligum vegi o.tíl.
2. Súkkluparkering í miðbýnum, t.v.s. súkkluhús við streymi til el-súkklur, pumpu, skiftilykil o.ø. hentleikum - súkklur skulu standa trygt og turt.
3. Súkklur við í bussarnar.
4. Eggja til súkkluvinarlig arbeiðspláss – heilsufremjandi – lønandi – umdømi.
5. Eitt gott samanhangandi, lagaligt og væl útbygt ferðslutrygt súkklunet.
6. Kunning um súkkluleiðir við m.a. at gera betri kort til heimasíðuna, ið vísir hvar súkkluleiðirnar eru í býnum og millum Havnina og bygdirnar.
7. Áherðslu á heilsuliga týdningin á gerandisliga súkkling fyri øll.

**Uppskot um langtíðarætlað átøk:**

1. Súkkling við í kommunu-/miðbýarætlanir, byggisamtyktir v.m.
2. Allir nýbygningar skulu hava súkkluskúrar og atknýttar súkkluleiðir, sí j. nr. 2005-1437 og 2005-1436.
3. Við allar skúlar, dagstovnar og kommunal arbeiðspláss verða gjørd súkkluhús við hentleikum nevnd omanfyri.
4. Í útjaðaranum verða skipað súkkluparkering eins og í miðbýnum, t.v.s. súkkluhús við streymi til el-súkklur, pumpu, skiftilykil o.ø. hentleikum - súkklur skulu standa trygt og turt. Soleiðis at fólk, ið ferðast til og frá arbeiði, antin við Bygdaleiðum ella Bussleiðini, kunnu súkkla síðsta teinin.
5. Skipað fyri tiltøkum, sum kunnu vekja áhugan fyri at súkkla.

Ein súkklubýur er ein býur við meira plássi, minni larmi, reinari luft, glaðum og nøgdum íbúgvum. Súkkling er ikki eitt mál í sjálvum sær, men er hinvegin ein munagóður miðil til at skapa ein betri bý at liva í við plássi til fjølbroytni og menning.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í sambandi við striking av gongubreytum: *Kunngerð nr. 138, Um súkklandi á gongubreytum, frá 19. oktober 2017.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hetta er eitt sera breitt og umfatandi mál/átak, og eigur hetta at verða samskipað millum deildir og fyrisitingar á bestan hátt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ætlanirnar hjá Teknisku deild og Umhvørvisdeildini at strika gongubreytir (Rakstrar mál).

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-
**Umhvørvisárin**
-
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-
**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | x | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ein arbeiðsbólkur verður settur við umboðum frá Býarskipanardeildini, Teknisku deild og Umhvørvisdeildini at nágreina ítøkiligu átøkini, sum verða, í omanfyri nevnda teksti, lýst sum *Skjótt syftir seiðir*, at arbeiðisbólkurin tryggjar sær luttøku frá øðrum fyrisitingum, sum kunnu verða rakt av ella sum onkursvegna hava ein áhuga í verkætlanini, og at arbeiðsbólkurin vendir aftur í nevndina við eini ætlan fyri hvussu átøkini skulu raðfestast, fíggjarligu avleiðingunum av átøkunum og eini tíðarætlan fyri nær átøkini kunnu verða framd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Ískoyti:**

**Súkkling sum ítrótt og frítíðarvirksemi**
Í Tórshavnar kommunu eru trý súkklufeløg t.e. Tórshavnar Súkklufelag, Føroya Triathlonfelag og Fjallasúkklufelagið, ið eru skipaði undir Sersambandinum fyri Súkkling og triathlon, ið er limur í ÍSF

Í Tórshavnar Súkklufelag eru umleið 20 virknir limir. Í Føroya Triathlonfelag eru umleið 20 virknir limir og í Fjallasúkklufelagnum eru umleið 20 virknir limir. Onki súkklufelag er í løtuni virkið uttanfyri høvuðsstaðin.

Nakað av samskifti hevur verið við feløgini, ið m.a. ynskja sær høli til goymslu og felagsvirksemi. Harumframt hava feløgini verið partur av konseptmenningartilgongdini viðv. frítíðardepli á Glyvursnesi (Mál 18/03472 Forkanningar viðv. staðseting av ymsum frítíðarvirksemi í grótbrotinum á Glyvursnesi), umframt hugskot til menning av innandura súkkluforðabreyt til at venja motorikk v.m. Eisini er súkkling partur av tilgongdini í máli 19/00757 Ítróttapolitikkur fyri Tórshavnar kommunu. Umframt verkætlanin í máli 15/03842 Fjallasúkklufelagið: Umsókn um lendi til fjallasúkklurás.

Ætlanin er at halda fram við samskiftinum við feløgini um menning av virksemi og fyrireika møgulig mál til nevndarviðgerð.

**Spurnakanning um súkkling v.m.**
Umsitingin hevur júst fingið gjørt eina spurnakanning viðv. súkkling v.m. í kommununi. Hjálagda kanning sýnir at eitt stórt potentiali er í at fáa fleiri fólk at súkkla meiri, eisini sum ítrótt og frítíðarítrótt og at menna karmarnar fyri tí. Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga úrslitini í kanningini.

**Skjøl:**
*Úrslit frá súkklukanning*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Býarskipanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða kanningina við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmælum í vetur.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2020 er játtað 1.000. tkr á konto 6275 Fríðkan av kommununi, til at seta í gongd átøk í mun til ætlanina «Havnin sum súkklubýur», merking, broytingar í vegakervi og súkklutiltøk.

Arbeiðsbólkurin við umboðum úr býarskipanardeildini, teknisku deild og umhvørvisdeildini hava gjørt uppskot til ymisk samansett átøk at seta í verk í 2020. **Sí skjal 19/01370-22 Súkkluárið 2020.**

Átøkini snúgva seg um betringar fyri súkkling í vegakervinum, betri umstøður fyri súkkluparkering og tiltøk av ymiskum slag, sum varpa ljós á súkkling og burðardygga ferðslu, ið hava góða ávirkan á heilsu, trivnað og umhvørvi.
Átøkini verða gjørd í samstarvi við avvarðandi myndugleikar, felagsskapir, áhugabólkar og virki, sum kunnu luttaka í menningini av Havnini sum súkklubýur.

Átøkini í yvirlitinum súkkluárið 2020 setur ferð á tilgongdina at menna Havnina og leggur eisini lunnar undir framhaldandi arbeiði, hvussu súkkling og burðardygg ferðsla skal raðfestast í kommununi komandi árini.

**Skjøl:**
*Súkkluárið 2020,* journal nr. 19/01370-22

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at játta 1.000. tkr. av konto 6275, *Fríðkan av kommununi (súkklugøtur og skýli)*, L00001, Løgukarmur fyri árið,
- til nýggja verkætlan "Havnin sum súkklubýur", ið fevnir um at fremja átøkini sum lýst í yvirlitinum Súkkluárið 2020, umframt at geva arbeiðsbólkinum heimild til at seta átøkini í verk.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Í januar 2020 tók eitt samt býráð undir við at Tórshavnar kommuna skal miðvíst og yvirskipað leggja til rættis, so Havnin verður ein góður súkklubýur.
Í fíggjarætlanini fyri 2021 er 1000 t.kr. settar av til súkklugøtur og skýli og onnur átøk í mun til ætlanina Havnin sum súkklubýur undir konto 6275 fríðkan av kommununi.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 181<br><br>Formansins merki: |

Annika Olsen, Gunvør Balle og Elsa Berg mæla til at játta 1000 t.kr. av konto 6275 fríðkan av kommununi til verkætlanina Havnin sum súkklubýur, ið fevnir um at fremja átøk, sum eru til frama fyri Havnina sum súkklubý, umframt at umsitingin fær heimild at seta átøkini í verk.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Málið umrøtt.

**Íkoyti:**
Peningur bleiv í 2020 játtaður til verkætlanina L62040, Havnin sum súkklubýur, til at fremja ymisk átøk í býnum til frama fyri súkkling. Arbeiðið í sambandi við átøkini er liðugt, og saldoin á verkætlanini er 22.000 kr.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62040 | Havnin sum súkklubýur | 6275 | L00001 | Løgukarmur - Fríðkan av býnum | | 22.000 kr |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L62040, Havnin sum súkklubýur, flyta avlopið á 22.000 kr. á karmin L00001 á konto 6275, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur ikki undir við at loka verkætlanina.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Karl Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen

Blankt atkvøddu: Jákup Dam og Súsanna Olsen.

# 50/23 Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 126/18 | 18/01811-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 145/18 | 18/01811-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 129/18 | 18/01811-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 62/18 | 18/01811-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 259/18 | 18/01811-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 361/18 | 18/01811-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 325/18 | 18/01811-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 21/23 | 18/01811-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 45/23 | 18/01811-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 50/23 | 18/01811-1 |

**Upprunin til málið:**
Málið er byrjað sum framhald av málinum um keyp av lendi til bústaðarbygging, sum Sjálvsognarfelagið Kirkjubøarvegur hevur havt ynski um at keypa.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum felagið ynskti at keypa til bústaðarbygging, er ikki partur av eini størri heildarætlan, og er í løtuni ongin heildarætlan fyri økið og matriklarnar hjá kommununi í nærumhvørvinum.

Býurin veksur og byggilendini gerast færri í tali, tá hugsað verður um bygging innanfyri verandi bý. Tískil er eyðsætt at skipa alt økið, soleiðis at samanhangur verður ímillum bygging, vegasamband, atkomu, fríøki, parkering og virksemi í økinum. Her verður hugsað um alt økið og matriklarnar hjá kommununi omanfyri undir Gráasteini og niðan til byggingina “Mark”, sí kortskjalið *Skipan av økinum_Marknagil* (reyða linjan á kortinum er vegleiðandi). Avmarkaða kortskjalið fevnir um matrikklarnar 1112, 1108, 1107, 1170, 1160a, 1160c, 1172a og 1176.

Avmarkaða økið liggur í umráðispørtunum A1 og A2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum loyvir bústaðarbygging, bæði stakhúsum og íbúðum. Ein heildarætlan stuðlar undir visjónini í bústaðarpolitikkinum, at kommunan framhaldandi útvegar lendi til bústaðarbygging. Umframt bústaðarbygging er eisini møguligt at skipa økið til almennar stovnar, so sum ein møguligan dagstovn, røktarheim v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði eru (brot úr almennu byggisamtyktini):

1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

   *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

2. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m$^2$, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum.*

3. *Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.*

4. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,3*

5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m2 ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.*

   *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði eru:

1. *Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

2. *Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt nattúrliga avmarkað øki.*

3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

5. *Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Áheitan vegna Sjálvsognarfelagið Kirkjubøarvegur um keyp av lendi av matr nr. 1160a, Tórshavn til sethúsabygging, journal nr. 16/03590

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar. Heildarætlanin verður gjørd í samráð við býarverkfrøðingin og teknisku deild.

**Skjøl**
Skipan av økinum_Marknagil, journal nr. 18/01811-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at umsitingin kann fara undir at skipa avmarkaða økið til bústaðarbygging og almennar stovnar v.m., at gera eina heildarætlan fyri økið, umframt at játta kr. 200.000 av kt. 6475 til skipan av økinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:**Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ove Mortensen Arkitektavirkið og Arkitektar 99 hava gjørt eitt ávegis uppskot til útstykkingarætlan fyri økið, sí skjal *Presentatión 11-10-2018 TK.*

Endamálið við uppgávuni var, at samskipa alt økið so, at skilagóður samanhangur verður millum ymisku økini í útstykkingini, og samstundis gera eina yvirordnaða ætlan fyri skipan av økinum.

Sum tað fyrsta hevur verið arbeitt við at skipa økið við nøktandi vegatkomu, sum kann røkka øllum økinum, men samstundis eisini gagnnýta økið sum best. Úrslitið eru tvær vegatkomur, ein frá verandi Grásteinsgøtu og ein frá komandi innkomuvegi, sum bindur í Marknagilsvegin. Hendan skipanin hevur við sær, at tað ikki verður gjøgnumkoyrandi til alla útstykkingina frá tí eina vegnum, men metir umsitingin, at tað einans kann gagna útstykkingini við at tað ikki verða alt ov nógvir bústaðir knýttir í somu vegatkomu.

Síðani hevur tað verið arbeitt við at skipa økið við ymiskum slag av bústøðum, bæði í skapi, hædd og slag, umframt at lendið er lagt av til tveir stovnar í økinum. Uppskotið lýsir møguleikarnar fyri at byggja karré bygging við innara garði, ið verjir móti veður og vindi, blokkar, ið eru skiftandi í skurðið, bygging, ið veksur í skala frá sethúsastødd til íbúðarblokkar og lágari bústaðarbygging, ið veksur í hædd upp móti fjallasíðuni. Møguligt er at skipa ymisku byggingina við íbúðum, raðhúsum og sethúsabygging.

Harumframt er grøni parturin av økinum skrásettur, og uppskot til hvussu frílendini verða innarbeitt í útstykkingina er lýst, umframt at víst er á grøna kílan, sum kann styrkjast allan vegin oman í innara part av vesturbýnum.

Næsta stig í ætlanini at skipa økið er at kanna, um vegirnir kunnu liggja soleiðis, sum uppskotið leggur upp til og hvussu vegarbeiðið skal skipast. Mælt verður til, at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera hetta arbeiðið.

Neyðugt verður at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at ymiska bústaðarbyggingin kann fremjast og verður hetta gjørt í sambandi við arbeiðið at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at ávegis uppskot til útstykkingarætlan verður samtykt sum yvirskipað ætlan fyri økið, at byggisamtyktin, í sambandi við at hon verður

endurskoðað, verður broytt samsvarandi uppskotinum, at 100.000 kr. verða játtaðar av konto 6475 til uttanhýsis ráðgeva at kanna vegaføringina og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Peningur bleiv í 2018 játtaður til verkætlanina L64014, Skipan av økið omanfyri Marknagil og undir Fjalli. Ávegis útstykkingarætlan varð gjørd, og verkfrøðingar gjørdu eina sandsýnliggerð av vegaføringini. Síðani eru ætlanirnar sleptar, men um tað verður aktuelt, verður hetta tikið upp aftur seinni. Saldoin á verkætlanini er kr. 4.000 í halli.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6475 | L64014 | Skipan av økið omanfyri Marknagil og undir Fjalli | | Kr. 4.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina Skipan av økinum omanfyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, L64014, at fíggja hallið á kr. 4.000 av karminum LK62999, Fríðkan av býnum, á konto 6275 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 186<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 51/23 Útbjóðing av lendi til spæli- og ítróttarvirksemi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 24/23 | 23/00574-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 47/23 | 23/00574-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 51/23 | 23/00574-1 |

**Upprunin til málið**
Í kommunuætlanini fyri Tórshavnar kommunu eru øki til býarmenning raðfest. Stóratjørn er blivin raðfest sum eitt av teimum fyrstu økjunum til býarmenning. Arbeitt hevur verið við einum heilt nýggjum býarparti við Stórutjørn sí kort *'Økisbýtið'*. Ein partur av økinum er lagdur av til m.a. ítrótt, og ætlanirnar við hesum eru komnar so langt, at serstøk byggisamtykt fyri økið er gjørd, sum nú liggur til almenna hoyring.

**Lýsing av málinum**
Av tí at talan er um vindhart øki, er ætlanin fyrst og fremst at nýta økið til hallir og innandura ítrótt. Fyrsta verkætlanin í økinum er nógv umrødda Stórhøllin, men sambært ætlanini fyri økið er harumframt avlagt øki til tvær aðrar hallir, eitt nú høll til frælsan ítrótt og fótbóltshøll, sí kortið *"Ítróttarøki"*. Hugsanin er, at allar tríggjar hallir skulu staðsetast soleiðis í økið, at tær fáa gagn av hvørjari aðrari. Í løtuni er nógv orðaskifti um sjálva parkeringina. Hetta tí, at tørvur er á serliga nógvum parkeringarplássum til stóru tiltøkini, sum fara at verða í økinum. Ynskiligt er, at parkeringin verður samskipað, soleiðis at alt økið ikki verður ein stór parkeringarfløta.

Ynskiligt er at bjóða økið út til innandura spæli- og ítróttavirksemi. Endaliga skipanin av ítróttarøkinum er ikki liðug enn, og avhongur rættiliga nógv av endaligu staðsetingini av Stórhøllini. Kortið "Ítróttarøki" sýnir seinasta uppskot til staðseting av Stórhøllini. Ítøkiliga økið, sum ætlanin er at bjóða út, er tí ikki endaliga nágreinað, men er ætlanin at fara undir hetta í samstarvi við ein møguligan mennara.

Tórshavnar kommuna hevur fingið nakrar umsóknir um lendi til innandura spæli- og ítróttarvirksemi. Eitt nú padel og innandura spæliland.
- Padel er ein lutfalsliga nýggj ítróttagrein í Norðurlondum, sum er í ferð við at gerast sera væl umtókt. Padel er ein sameining millum tennis og squash og er ein ítróttagrein, sum nærum øll kunnu vera við til.
- Í nógv ár hevur almenningurin umbiðið eitt innandura spæliland. Tíllíkt virksemi er at síggja í flestu av okkara grannalondum, og tað hóskar seg væl til teir norðurlendsku býirnar. Flestu norðurlendsku býirnir kunnu flokkast sum vetrarbýir, eitt nú tí teir hava langar og myrkar vetrar og lutfalsliga stutt summur við nógvum regni og vindi. Tað merkir, at ein stóran part av árinum verða barnafamiljur og stovnar ikki beinleiðis eggjað til uttandura virksemi, og eitt innandura spæliland kundi verið við til at samsýna dagar. Hetta skal ikki skiljast sum, at vit ikki hava tørv á uttandura virksemi, tó seta vetrarbýirnir størri krøv til planlegging av uttanduraøkjum.

Hetta eru einans tvey dømi burtur úr einari ørgrynnu av øðrum áhugaverdum dømum um innandura spæli- og ítróttavirksemi. Í fyrstu syftu er ynskiligt, at umsitingin fær heimild til at bjóða lendi út til innandura virksemi fyri síðani at viðgera, hvat slag av innandura virksemi hevði gagnað størsta partinum av almenninginum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/03920 Stórhøll Føroya Arena

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara undir at bjóða lendi út í ítróttaøkinum við Stórutjørn til bygging av innandura ítróttarvirksemi umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at møguleiki verður at bjóða lendið út sum leigumál til bygging av ætlaða virkseminum í økinum.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

## 52/23 Bátahylurin í Álakeri - keyp av aldubrótara

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 07.02.2023 | 3/23 | 23/00611-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 53/23 | 23/00611-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 52/23 | 23/00611-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tá ið bátahylurin í Álakeri bleiv prosjekteraður, vórðu tekningar sendar til DHI fyri at gera simuleringar av, hvussu vindur o.a fór at ávirka kyrruna inni í bátahylinum. Talan var um sama simuleringsprogramm, sum var brúkt til Skansabryggjuna. Hetta var eisini fyri at vita, hvørja ávirkan grótkastið í Álakeri kom at fáa á havnarlagið annars.
Niðurstøðan var, at tað kundi verða eitt sindur ófriðarligt í innsiglingini og beint innanfyri, serliga tá ið áhaldandi vindur er av landsynningi.
Annars vísti simuleringin, at kyrran í bátahylinum skuldi verða eins góð og miðal kyrran er við bátaplássini á Skálatrøð, og at brimgarðurin ikki kom at hava neiliga ávirkan á havnarlagið annars.

Nú tá ið flótibrúgvarnar eru lagdar út, vísir tað seg, at kyrran í ávísum økjum inni í bátahylinum ikki samsvarar heilt við kanningarnar. Tá liggjandi vindur er av landsynningi, kemur aldan fram við grótkastinum, og sleppur inn í hylin, og ávirkar mest økið millum flótibrúgv nummar 3 og 4.
Hetta viðførir, at tað verður ov ókyrt á einum strekki millum flótibrúgv 3 og 4, sum ávírkar umleið 50 bátapláss somikið nógv, at fleiri teirra eru rýmdir undan veðrinum, og vilja ikki leggja seg har aftur.

Eftir at hava umrøtt málið, metir umsitingin hjá Tórshavnar havn, at ein aldubrótari í framhaldi av brimgarðinum kann verða ein háttur at minka um hendan trupulleika.
Upprunaliga simuleringin fyri bátahylin í Álakeri vísti, at kyrran økist við longdini á brimgarðinum. Ein aldubrótari í framhaldi av brimgarðinum fer tí mest sannlíkt eisini at økja um kyrruna, hóast tað ikki kann sigast við vissu, hvussu væl loysnin við aldubrótara kemur at roynast.

Tórshavnar havn hevur aldubrótarar liggjandi Úti í Bakka, í Kaldbaksbotni og við Sjógv í Kollafirði, og felags fyri hesar er, at teir hava virka sera væl.

Tá aldubrótarin er lagdur út, verður innsiglingin til bátahylin góðar 20 m breið í mun til um 45 m í dag.

Ein 22 x 4 metur aldubrótari við útlegging, ljós o.a, kostar umleið 1,3 mió kr, (J.Nr. 23/00611-3).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ein 22 x 4 metur aldubrótari við útlegging, ljós o.a, kostar umleið 1,3 mió kr.
Á íløgukarminum LK74999 “Smábátahavnir” eru í 2023 avsettur 3,5 mió.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnameistarin mælir til at keypa umrødda aldubrótara og at játtaðar verða kr. 1,0 mió av íløgum fyri 2023 (LK74999 “Smábátahavnir”), at írestandi kostnaðurin umleið 0,3 mió, verður fíggjaður av rakstri, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 07. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og biðja um tilboð frá minst trimum veitarum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

# 53/23 Keyp av skrivstovubygningi hjá P/F Faroe Ship á Eystaru bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 08.06.2022 | 15/22 | 22/00477-2 |
| 2 Havnanevndin | 07.02.2023 | 4/23 | 22/00477-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 52/23 | 22/00477-2 |
| 4 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 53/23 | 22/00477-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá P/F Faroe Ship um Tórshavnar havn vil keypa skrivstovubygningin hjá P/F Faroe Ship á Eystaru bryggju.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við, at nýggja havnalagið verður tikið í nýtslu, hevur P/F Faroe Ship avgjørt at flyta høvuðssæti í gráa pakkhúsið fyri at miðsavna virksemið á einum stað.
Faroe Ship hevur tískil boðið Tórshavnar havn at keypa bygningin fyri 14 mió.kr. við yvirtøku ultimo 2023. Eitt møguligt keyp av bygninginum verður fíggjað við lántøku.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Skrivstovubygningurin stendur á leigugrund, matr. nr 613t, ið er ogn hjá Tórshavnar havn.
Verandi bygningur er frá 1935. Í 2012 var bygningurin høvuðsumvældur og er annars væl viðlíkahildin, soleiðis at bygningurin nú er á hædd við nýggjar líknandi bygningar.
Sambært Faroe Ship er bygningurin í 2019 virðismettur til 16,5 mió.kr. Faroe Ship skrivar, at bygningurin kundi eisini verið settur alment til sølu.
Nú, ið útbygda Skansabryggjan verður tikin í nýtslu í næstum, verður virksemið á Eystaru bryggju og Skansabryggjuni umskipað.
Fyri at hava betri møguleika at skipa havnaøkið og kunna stýra hvat virksemi verður á havnarlagnum, metir Tórshavnar havn at tað er ein fyrimunur at Tórshavnar havn keypir nevnda skrivstovubygning og kann leiga hann útaftur til hóskandi leigara, heldur enn at ein "tilvildarligur" keypari keypir bygningin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.Nr. 22/00477-1: Teldupostur frá P/F Faroe Ship til Tórshavnar havn, d.f. 28/1-2022
J.Nr. 22/00477-3 : Skriv frá P/F Faroe Ship til Tórshavnar havn, d.f. 29/4-2022.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | Nei | Nei | Nei | Nei |
| **Umhvørvisavleiðingar** | Nei | Nei | Nei | Nei |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | Nei | Nei | Nei | Nei |
| **Sosialar avleiðingar** | | | Nei | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 191<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, Tórshavnar havn fær heimild at samráðast um at keypa skrivstovubygnngin frá FaroeShip fyri upp til 12 mió kr, og at úrslitið av samráðingunum verður at leggja fyri aftur havnanevndina til støðutakan.

**Havnanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samráðingarnar við P/F Faroe Ship eru nú komnar á mál og uppskot til keypssáttmála fyriliggur, j.nr. 22/00477-5.

Keypsprísurin er avtalaður til 12 mió kr. og yvirtøkudagurin til 2 mánaðar eftir at Faroe Ship er flutt út í sítt nýggja høvuðssæti í gráa pakkhúsi.

Á Fíggjarætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2023 eru avsettar 12 mió.kr. av íløgum til keyp av skrivstovubygninginum matr. 617t.

**Tilmæli**
Virkandi havnarmeistari mælir til at góðkenna keypssátmálan, j.nr. 22/00477-6 og at játta 12 mió.kr. av íløgum á FÆ2023 hjá Tórshavnar havn, projektnr. P45 «Keyp av skrivstovubygning. matr. 617t», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 07. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 192 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 54/23 Gjøld - Eldraøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 41/23 | 23/00874-1 |
| 2 Heilsu- og eldranevndin | 14.02.2023 | 7/23 | 23/00874-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 54/23 | 23/00874-1 |

**Upprunin til málið**
Kunngerð um broytingar i kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. er lýst at koma í gildið 1. apríl 2023.

**Lýsing av málinum**
Broytingar í kunngerðini geva kommununum heimild at áseta gjøld fyri heimatænasu, búpláss á eldrabústøðum, og fyri umlætting (stutttíðarpláss) Hendan heimildin hevur ikki ligið hjá kommunum áður. Kommunurnar hava leingi havt ynski um, at hava heimildina at áseta gjøld fyri tær tænastur sum kommunurnar hava ábyrgd av.

Gjøldini fyri heimatænastu, búpláss og umlætting vóru ásett í kunngerð nr. 126 frá 17. desember 2014 og eru ongantíð broytt. Sostatt eru somu gjøld galdandi fyri heimatænastu, búpláss og umlætting sum í 2015.

Vit teimum broytingum sum eru lýstar í kunngerðini sum kemur í gildið 1. apríl 2023 fáa kommunurnar heimild til sjálvar, - eftir ávísum leisti, sum er lýstur í kunngerðini- at áseta gjøld fyri heimatænastu, búpláss á eldrabústøðum og fyri umlætting.

Sambært broyttu kunngerðini sum kemur í gildið 1. apríl 2023 stendur í § 2 stk. 2 Gjøldini, sum skulu galda frá 1. Apríl 2023, skulu lýsast í seinasta lagi 1. mars 2023

Kommunufelagið hevur arbeitt við uppskoti til, hvussu gjøldini eiga at vera í dag og tilmælir kommunufelagið at nýta tann leistin og at lýsa nýggju gjøldini áðrenn 1. mars til gildiskomu 1. apríl 2023.
Í broyttu kunngerðini stendur í §4. Í seinasta lagi 1. desember lýsir kommunan gjøldini fyri komandi árið. Og í § 2 stk. 3 stendur: Tey gjøld fyri búpláss, umlætting og heimahjálp, ið vóru galdandi 1. apríl 2023 verða framvegis í gildi í teimum kommunum, har nýggj gjøld ikki eru lýst til at galda frá 1. januar 2024.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og heilsu-og umsorganarstjórin mæla til at lýsa broytingar í gjøldum fyri heimatænastu, pláss á eldrabústovni og fyri umlætting áðrenn 1. mars 2023 eftir uppskotið hjá kommunufelagnum, og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 14. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við heilsu- og eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Annika Olsen og Elsa Berg atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

| | Býráðsfundur<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 194<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 55/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>23. februar 2023 | Blað nr.: 196 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 56/23 Heildarætlan fyri dagstovnaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 75/22 | 22/01221-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 56/23 | 22/01221-1 |

**Upprunin til málið**
Tjóðveldi ynskir at fáa málið um trot á starvsfólkum á dagstovnaøkinum á skrá á næsta býráðsfundi 24.mars.

Tjóðveldi ynskir at býráðið samtykkir at gerast skal ein heildarætlan við ítøkiligum átøkum fyri at bøta um starvsfólkatroti á dagstovnaøkinum.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Fyrst varð atkvøtt um, hvørt málið skal fara til atkvøðugreiðslu, og fall málið við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Tjóðveldi, Framsókn og Fólkaflokkurin ynskir at fáa málið um trot á starvsfólkum á dagstovnaøkinum á skrá til býráðsfundin 23. februar 2023.

Tjóðveldi, Framsókn og Fólkaflokkurin ynskir at býráðið samtykkir at gerast skal ein heildarætlan við ítøkiligum átøkum fyri at bøta um starvsfólkatroti á dagstovnaøkinum.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Atkvøtt varð um málið skal fara til atkvøðugreiðslu, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam .

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21.00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Súsanna Olsen | |